| | | |
|---|---|---|
| | **TÓRSHAVNAR BÝRÁÐ**<br>**1. november 2012** | Blað nr.:<br>**10043**<br>Formansins merki: |

# GERÐABÓK

**Dato:** **1. november 2012** **kl. 16.30**
**Stað:** **Býráðssalurin**
**Málsnr: 240/12-277/12**

**FUNDARLEIÐARI:**
**Heðin Mortensen**

---

**VIÐ LUTTØKU AV:**
Heðin Mortensen
Bogi Andreasen
Marin Katrina Frýdal
Jógvan Arge
Jákup Símun Simonsen
Annfinn Brekkstein
Halla Samuelsen
Elin Lindenskov
Levi Mørk
Maria H. Olsen
Inga Dahl
Jan Christiansen
Sjúrður Olsen

**LUTTÓKU IKKI:**
Vagnur Johannesen, ið hevur farloyvi

**SKRIVARI:**
Ingibjørg Berg

**PROTOKOLLFØRARI:**
Janus Isfeldt

**LUTTÓKU EISINI:**
Bjørgfríð Ludvig
Eyðna Justinussen
Jóan Petur Hentze

# MÁL FYRI OPNUM HURÐUM KL. 17.00

**Býráðsformaðurin setti fundin og las upp dagsskránna.**

**248/12** **2012-0177**

**Vagnur Johannesen hevur boðað frá, at honum berst frá at røkja starv sítt sum býráðslimur í meira enn samfullar 14 dagar.**

Sambært § 18, stk. 3, í kommunulógini ger býráðið av, at treytirnar fyri innkallan av tiltakslimi, ið er Inga Dahl, eru loknar.

**Býráðið 1. november 2012:** Samtykt.

**249/12** **2012-0178**

**Mál beind í nevndir**

**Býráðið 1. november 2012:** Tikið til eftirtektar.

**250/12** **2012-0664**

**Góðkenning av mánaðarroknskapinum 2012**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Sambært kunngerð nr. 89 frá 15. oktober 2008 um roknskaparverk kommununnar o.t. § 10 skulu kommunur innraportera roknskapardátur hvønn mánað til Fíggjarmálaráðið.

Sambært § 9 skal kommunustýrið góðkenna tilfarið.

Roknskapurin fyri januar 2012 verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 21. mars 2012:** Framlagt og góðkent.

**Býráðið 29. mars 2012:** Framlagt og góðkent.

Roknskapurin fyri februar 2012 verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 26. apríl 2012:** Framlagt og góðkent.

**Býráðið 2. mai 2012:** Framlagt og góðkent.

Roknskapurin fyri mars 2012 verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 23. mai 2012:** Framlagt og góðkent.

**Býráðið 31. mai 2012:** Framlagt og góðkent.

Roknskapurin fyri apríl 2012 verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 20. juni 2012:** Framlagt og góðkent.

**Býráðið 28. juni 2012:** Framlagt og góðkent.

Roknskapurin fyri juni og juli 2012 verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 12. september 2012:** Framlagt og góðkent.

**Býráðið 13. september 2012:** Framlagt og góðkent.

Roknskapurin august og september 2012 verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 24. oktober 2012:** Framlagt og góðkent.

**Býráðið 1. november 2012:** Framlagt og góðkent.

**251/12** **<u>2012-1268</u>**

**<u>Fíggjarætlanin fyri 2013</u>**

Stjórnin hevur gjørt uppskot til karmar fyri 2013.

Uppskotið verður lagt fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 23. mai 2012:** Samtykt at arbeiða víðari við kørmunum fyri 2013.

**Fíggjarnevndin 20. juni 2012:** Samtykt at arbeiða víðari við kørmunum fyri 2013.

**Fíggjarnevndin 24. september 2012:** Framlagt og samtykt at leggja fyri býráðið.

**Býráðið 27. september 2012:** Framlagt

# Yvirlit

## Høvuðsyvirlit

| **Høvuðsyvirlit yvir fíggjarætlan** | | | | **2013** |
|---|---|---|---|---|
| | Rakstrarætlan | | | Løgu- |
| Túsund kr. | | Útreiðslur | Inntøkur | ætlan |
| **§ 1.** | **Kommunal fyrisiting** | **69.938** | - | - |
| | 11. Felagsútreiðslur | 66.621 | - | - |
| | 18. Almenn starvsfólk v.m. | 3.317 | - | - |
| **§ 2.** | **Almanna- og heilsumál** | **49.677** | - | - |
| | 20. Heilsumál | 16.496 | - | - |
| | 21. Almannamál | 33.181 | - | - |
| **§ 3.** | **Børn og ung** | **138.821** | - | **3.000** |
| | 24. Mentan | 6.399 | - | - |
| | 26. Barnaansing | 132.422 | - | 3.000 |
| **§ 4.** | **Undirvísing** | **36.531** | - | **6.000** |
| | 23. Útbúgving og gransking | 36.531 | - | 6.000 |
| **§ 5.** | **Mentan og frítíð** | **41.393** | - | **32.591** |
| | 23. Útbúgving og gransking | 10.343 | - | 1.300 |
| | 24. Mentan | 31.050 | - | 31.291 |
| **§ 6.** | **Teknisk mál** | **116.437** | - | **46.000** |
| | 11. Felagsútreiðslur | 55.259 | - | 2.000 |
| | 24. Mentan | 2.798 | - | 3.000 |
| | 30. Umhvørvi | 17.914 | - | 6.000 |
| | 38. Samferðsla og samskifti | 40.466 | - | 35.000 |
| **§ 7.** | **Kommunal virki** | **30.052** | - | **31.784** |
| | 30. Umhvørvi | 17.997 | - | 10.000 |
| | 31. Tilbúgving | 8.089 | - | - |
| | 37. Handil og vinna annars | 3.220 | - | - |
| | 38. Samferðsla og samskifti | 746 | - | 21.784 |
| **Tilsamans** | | **482.849** | - | **119.375** |
| § 20. | 22. Íbúðarmál | 22.500 | - | - |
| § 20. | 50. Rentur | 9.587 | 500 | - |
| § 20. | 52. Skattir og avgjøld | 2.000 | 635.811 | - |
| Tilsamans | | 516.936 | 636.311 | 119.375 |
| Yvirskot | | - | 119.375 | - |
| | | | | |
| **Rakstrar-, løgu- og útlánsætlan RLÚ** | | **-** | **0** | **-** |
| | | | | |
| § 25. | 62. Afturgjald av skuld | 16.732 | - | - |
| **Bruttokassaúrslit** | | **16.732** | **0** | **-16.732** |
| Fígging: | | | | |
| § 25. | 64. Útvegan av gjaldføri | - | 16.732 | - |
| Fígging íalt: | | - | 16.732 | 16.732 |
| **Samanlagt** | | **16.732** | **16.732** | **-** |

# Tekstur

## § 1 Kommunal fyrisiting

**A. Yvirlit**

*Játtanaryvirlit*

| Tús. kr | | Netto | Útreiðslur | Inntøkur |
| --- | --- | --- | --- | --- |
| Útreiðsluætlan | | 69.938 | 69.938 | - |
| **Felagsútreiðslur** | | | **66.621** | **-** |
| 1.11.11. | Samsýningar o.a. til kommunustýrislimir | | 3.388 | - |
| 1.11.12. | Val og valnevndir | | 50 | - |
| 1.11.14. | Kommunufyrisitingin | | 61.992 | - |
| 1.11.21. | Kommunufeløg | | 1.191 | - |
| **Almenn starvsfólk v.m.** | | | **3.317** | **-** |
| 1.18.11. | Tænastumannaeftirlønir | | 3.317 | - |
| *Yvirlit yvir høvuðssløg:* | | | | |
| Játtan tilsamans | | | 69.938 | - |
| Nettostýrt virksemi | | | 4.781 | 4.781 |
| Virksemi tilsamans | | | 74.719 | 4.781 |
| Rakstrarinntøkur | | | - | 4.481 |
| Flytingar millum almennar myndugleikar | | | 791 | 300 |
| Flytingarútreiðslur | | | 4.492 | - |
| Rakstrarútreiðslur | | | 69.436 | - |

## B. Játtanir

| | | Útreiðslur | Inntøkur |
| --- | --- | --- | --- |
| | | - Tús. kr. - | |

### Felagsútreiðslur

| | | Útreiðslur | Inntøkur |
| --- | --- | --- | --- |
| **1.11.11.** | **Samsýningar o.a. til kommunustýrislimir** | | |
| 110. | Samsýningar o.a. til kommunustýrislimir (Rakstrarj.) | 3.388 | - |
| **1.11.12.** | **Val og valnevndir** | | |
| 110. | Val og valnevndir (Rakstrarj.) | 50 | - |
| **1.11.14.** | **Kommunufyrisitingin** | | |
| 110. | Kommunufyrisitingin (Rakstrarj.) | 61.992 | - |
| **1.11.21.** | **Kommunufeløg** | | |
| 110. | Kommunufeløg (Stuðulsj.) | 1.191 | - |

### Almenn starvsfólk v.m.

| | | Útreiðslur | Inntøkur |
| --- | --- | --- | --- |
| **1.18.11.** | **Tænastumannaeftirlønir** | | |
| 110. | Eftirlønir (Stuðulsj.) | 3.317 | - |

# § 2 Almanna- og heilsumál

## A. Yvirlit

*Játtanaryvirlit*

| Tús. kr | | Netto | Útreiðslur | Inntøkur |
| --- | --- | --- | --- | --- |
| Útreiðsluætlan | | 49.677 | 49.677 | - |
| **Heilsumál** | | | **16.496** | **-** |
| 2.20.21. | Ymiskar heilsuútreiðslur | | 1.850 | - |
| 2.20.22. | Kommunulækna- og heilsutænastur | | 3.799 | - |
| 2.20.23. | Tannrøkt | | 10.847 | - |
| **Almannamál** | | | **33.181** | **-** |
| 2.21.12. | Stuðul til endamál innan almanna- og heilsumál | | 100 | - |

| | | | |
| --- | --- | --- | --- |
| 2.21.13. | Ymiskar almannaútreiðslur | 727 | - |
| 2.21.31. | Barnavernd | 22.377 | - |
| 2.21.61. | Eldrarøkt | 2.225 | - |
| 2.21.62. | Tilboð og tiltøk til eldri | 3.252 | - |
| 2.21.72. | Forsorg | 4.500 | - |

*Yvirlit yvir høvuðssløg:*

| | | |
| --- | --- | --- |
| Játtan tilsamans | 49.677 | - |
| Nettostýrt virksemi | 1.954 | 1.954 |
| Virksemi tilsamans | 51.631 | 1.954 |
| Rakstrarinntøkur | - | 1.298 |
| Flytingar millum almennar myndugleikar | 3.445 | 656 |
| Flytingarútreiðslur | 6.309 | - |
| Rakstrarútreiðslur | 41.877 | - |

## B. Játtanir

| | Útreiðslur | Inntøkur |
| --- | --- | --- |
| | - Tús. kr. - | |

## Heilsumál

| | | | |
| --- | --- | --- | --- |
| **2.20.21.** | **Ymiskar heilsuútreiðslur** | | |
| 110. | Ymiskar heilsuútreiðslur (Rakstrarj.) | 1.850 | - |
| **2.20.22.** | **Kommunulækna- og heilsutænastur** | | |
| 110. | Kommunulækna- og heilsutænastur (Rakstrarj.) | 3.799 | - |
| **2.20.23.** | **Tannrøkt** | | |
| 110. | Tannrøkt (Rakstrarj.) | 10.847 | - |

## Almannamál

| | | | |
| --- | --- | --- | --- |
| **2.21.12.** | **Stuðul til endamál innan almanna- og heilsumál** | | |
| 110. | Stuðul til endamál innan almanna- og heilsumál (Stuðulsj.) | 100 | - |
| **2.21.13.** | **Ymiskar almannaútreiðslur** | | |
| 110. | Ymiskar almannaútreiðslur (Rakstrarj.) | 727 | - |
| **2.21.31.** | **Barnavernd** | | |
| 110. | Barnavernd (Rakstrarj.) | 22.377 | - |
| **2.21.61.** | **Eldrarøkt** | | |
| 110. | Eldrarøkt (Rakstrarj.) | 2.225 | - |
| **2.21.62.** | **Tilboð og tiltøk til eldri** | | |
| 110. | Tilboð og tiltøk til eldri (Rakstrarj.) | 3.252 | - |
| **2.21.72.** | **Forsorg** | | |
| 110. | Forsorg (Stuðulsj.) | 4.500 | - |

# § 3 Børn og ung

## A. Yvirlit

*Játtanaryvirlit*

| Tús. kr | | Netto | Útreiðslur | Inntøkur |
| --- | --- | --- | --- | --- |
| Útreiðsluætlan | | 138.821 | 138.821 | - |
| Løguætlan | | 3.000 | 3.000 | - |
| **Mentan** | | | **6.399** | **-** |
| 3.24.12. | Tilboð og tiltøk til børn og ungdóm | | 6.399 | - |
| **Barnaansing** | | | **135.422** | **-** |
| 3.26.11. | Barnaansing | | 135.422 | - |

*Yvirlit yvir høvuðssløg:*

| | | |
|---|---|---|
| Játtan tilsamans | 141.821 | - |
| Nettostýrt virksemi | 35.297 | 35.297 |
| Virksemi tilsamans | 177.118 | 35.297 |
| Rakstrarinntøkur | - | 35.297 |
| Flytingar millum almennar myndugleikar | 8.882 | - |
| Flytingarútreiðslur | 12.565 | - |
| Rakstrarútreiðslur | 152.671 | - |
| Løguútreiðslur | 3.000 | - |

## B. Játtanir

| | Útreiðslur | Inntøkur |
|---|---|---|
| | - Tús. kr. - | |

### Mentan

| | | Útreiðslur | Inntøkur |
|---|---|---|---|
| **3.24.12.** | **Tilboð og tiltøk til børn og ungdóm** | | |
| 110. | Tilboð og tiltøk til børn og ung (Rakstrarj.) | 6.399 | - |

### Barnaansing

| | | Útreiðslur | Inntøkur |
|---|---|---|---|
| **3.26.11.** | **Barnaansing** | | |
| 111. | Barnaansing (Løguj.) | 3.000 | - |
| 112. | Aðrar útreiðslur í samband við barnaansing (Rakstrarj.) | 18.384 | - |
| 110. | Barnaansing (Rakstrarj.) | 114.038 | - |

# § 4 Undirvísing

## A. Yvirlit

*Játtanaryvirlit*

| Tús. kr | Netto | Útreiðslur | Inntøkur |
|---|---|---|---|
| Útreiðsluætlan | 36.531 | 36.531 | - |
| Løguætlan | 6.000 | 6.000 | - |
| **Útbúgving og gransking** | | **42.531** | - |
| 4.23.22. Fólkaskúlin | | 41.606 | - |
| 4.23.31. Endurgjald til lærlingaútreiðslur | | 925 | - |

*Yvirlit yvir høvuðssløg:*

| | | |
|---|---|---|
| Játtan tilsamans | 42.531 | - |
| Nettostýrt virksemi | - | - |
| Virksemi tilsamans | 42.531 | - |
| Flytingar millum almennar myndugleikar | 3.873 | - |
| Flytingarútreiðslur | 1.142 | - |
| Rakstrarútreiðslur | 31.516 | - |
| Løguútreiðslur | 6.000 | - |

## B. Játtanir

| | Útreiðslur | Inntøkur |
|---|---|---|
| | - Tús. kr. - | |

### Útbúgving og gransking

| | | Útreiðslur | Inntøkur |
|---|---|---|---|
| **4.23.22.** | **Fólkaskúlin** | | |
| 110. | Fólkaskúlin (Rakstrarj.) | 33.618 | - |
| 111. | Fólkaskúlin (Løguj.) | 6.000 | - |

| | | | |
|---|---|---|---|
| 112. | Verkætlanir og aðrar útreiðslur á fólkaskúlaøkinum (Rakstrarj.) | 1.988 | - |
| **4.23.31.** | **Endurgjald til lærlingaútreiðslur** | | |
| 110. | Endurgjald til lærlingaútreiðslur (Stuðulsj.) | 925 | - |

# § 5 Mentan og frítíð

## A. Yvirlit

*Játtanaryvirlit*

| Tús. kr | | Netto | Útreiðslur | Inntøkur |
|---|---|---|---|---|
| Útreiðsluætlan | | 41.393 | 41.393 | - |
| Løguætlan | | 32.591 | 32.591 | - |
| **Útbúgving og gransking** | | | **11.643** | **-** |
| 5.23.51. | Musikkskúlin | | 7.916 | - |
| 5.23.52. | Kvøld- og listaskúlar | | 3.727 | - |
| **Mentan** | | | **62.341** | **-** |
| 5.24.13. | Tilboð og tiltøk innan mentan og frítið | | 5.035 | - |
| 5.24.14. | Stuðul til ítróttar- og mentanarendamál | | 9.396 | - |
| 5.24.31. | Bókasavn | | 6.104 | - |
| 5.24.32. | Søvn og mentanararvur | | 74 | - |
| 5.24.61. | Svimjihøllin | | 5.855 | - |
| 5.24.62. | Ítróttaranlegg | | 35.877 | - |

*Yvirlit yvir høvuðssløg:*

| | Útreiðslur | Inntøkur |
|---|---|---|
| Játtan tilsamans | 73.984 | - |
| Nettostýrt virksemi | 12.143 | 12.143 |
| Virksemi tilsamans | 86.127 | 12.143 |
| Rakstrarinntøkur | - | 8.420 |
| Flytingar millum almennar myndugleikar | 5.238 | 3.643 |
| Flytingarútreiðslur | 9.396 | - |
| Rakstrarútreiðslur | 38.902 | - |
| Skattir og flytingarinntøkur | - | 80 |
| Løguútreiðslur | 32.591 | - |

## B. Játtanir

| | | Útreiðslur | Inntøkur |
|---|---|---|---|
| | | - Tús. kr. - | |

## Útbúgving og gransking

| | | | |
|---|---|---|---|
| **5.23.51.** | **Musikkskúlin** | | |
| 110. | Musikkskúlin (Rakstrarj.) | 6.616 | - |
| 111. | Musikkskúlin (Løguj.) | 1.300 | - |
| **5.23.52.** | **Kvøld- og listaskúlar** | | |
| 110. | Kvøld- og listaskúlar (Rakstrarj.) | 3.727 | - |

## Mentan

| | | | |
|---|---|---|---|
| **5.24.13.** | **Tilboð og tiltøk innan mentan og frítið** | | |
| 110. | Tilboð og tiltøk innan mentan og frítíð (Rakstrarj.) | 2.035 | - |
| 111. | Tilboð og tiltøk innan mentan og frítíð (Løguj.) | 3.000 | - |
| **5.24.14.** | **Stuðul til ítróttar- og mentanarendamál** | | |
| 110. | Stuðul til ítróttar- og mentanarendamál (Stuðulsj.) | 5.590 | - |
| 111. | Stuðul til íløgur (Stuðulsj.) | 3.806 | - |
| **5.24.31.** | **Bókasavn** | | |
| 110. | Bókasavn (Rakstrarj.) | 6.104 | - |
| **5.24.32.** | **Søvn og mentanararvur** | | |
| 110. | Søvn og mentanararvur (Rakstrarj.) | 74 | - |

| | | | |
|---|---|---|---|
| **5.24.61.** | **Svimjihøllin** | | |
| 110. | Svimjihøllin (Rakstrarj.) | 5.855 | - |
| **5.24.62.** | **Ítróttaranlegg** | | |
| 111. | Ítróttaranlegg (Løguj.) | 28.291 | - |
| 110. | Ítróttaranlegg (Rakstrarj.) | 7.586 | - |

# § 6 Teknisk mál

## A. Yvirlit

*Játtanaryvirlit*

| Tús. kr | | Netto | Útreiðslur | Inntøkur |
|---|---|---|---|---|
| Útreiðsluætlan | | 116.437 | 116.437 | - |
| Løguætlan | | 46.000 | 46.000 | - |
| **Felagsútreiðslur** | | | **57.259** | **-** |
| 6.11.31. | Umsiting og røkt av fastognum | | 45.311 | - |
| 6.11.32. | Fríðkan av kommununi | | 11.948 | - |
| **Mentan** | | | **5.798** | **-** |
| 6.24.51. | Kirkjugarður | | 5.798 | - |
| **Umhvørvi** | | | **23.914** | **-** |
| 6.30.11. | Umhvørvistiltøk v.m. | | 2.278 | - |
| 6.30.21. | Vatnveiting | | 6.398 | - |
| 6.30.41. | Kloakkir | | 15.238 | - |
| **Samferðsla og samskifti** | | | **75.466** | **-** |
| 6.38.11. | Vegir | | 60.594 | - |
| 6.38.12. | Gøtuljós | | 7.334 | - |
| 6.38.13. | Rakstrargøgn | | 7.538 | - |

*Yvirlit yvir høvuðssløg:*

| | Útreiðslur | Inntøkur |
|---|---|---|
| Játtan tilsamans | 162.437 | - |
| Nettostýrt virksemi | 10.687 | 10.687 |
| Virksemi tilsamans | 173.124 | 10.687 |
| Rakstrarinntøkur | - | 10.687 |
| Flytingar millum almennar myndugleikar | 4.503 | - |
| Flytingarútreiðslur | 600 | - |
| Rakstrarútreiðslur | 122.021 | - |
| Løguútreiðslur | 46.000 | - |

## B. Játtanir

| | | Útreiðslur | Inntøkur |
|---|---|---|---|
| | | - Tús. kr. - | |

### Felagsútreiðslur

| | | | |
|---|---|---|---|
| **6.11.31.** | **Umsiting og røkt av fastognum** | | |
| 110. | Umsiting og røkt av fastognum (Rakstrarj.) | 45.311 | - |
| **6.11.32.** | **Fríðkan av kommununi** | | |
| 110. | Fríðkan av kommununi (Rakstrarj.) | 9.948 | - |
| 111. | Fríðkan av kommununi (Løguj.) | 2.000 | - |

### Mentan

| | | | |
|---|---|---|---|
| **6.24.51.** | **Kirkjugarður** | | |
| 111. | Kirkjugarðar (Løguj.) | 3.000 | - |
| 110. | Kirkjugarðar (Rakstrarj.) | 2.798 | - |

### Umhvørvi

| | | | |
|---|---|---|---|
| **6.30.11.** | **Umhvørvistiltøk v.m.** | | |
| 110. | Umhvørvistiltøk v.m. (Rakstrarj.) | 2.278 | - |

| | | | |
|---|---|---|---|
| **6.30.21.** | **Vatnveiting** | | |
| 110. | Vatnveiting (Rakstrarj.) | 6.398 | - |
| **6.30.41.** | **Kloakkir** | | |
| 111. | Kloakkir (Løguj.) | 6.000 | - |
| 110. | Kloakkir (Rakstrarj.) | 9.238 | - |

## Samferðsla og samskifti

| | | | |
|---|---|---|---|
| **6.38.11.** | **Vegir** | | |
| 110. | Vegir (Rakstrarj.) | 28.594 | - |
| 111. | Vegir (Løguj.) | 32.000 | - |
| **6.38.12.** | **Gøtuljós** | | |
| 110. | Gøtuljós (Rakstrarj.) | 7.334 | - |
| **6.38.13.** | **Rakstrargøgn** | | |
| 110. | Rakstrargøgn (Rakstrarj.) | 4.538 | - |
| 111. | Rakstrargøgn (Løguj.) | 3.000 | - |

# § 7 Kommunal virki

## A. Yvirlit

*Játtanaryvirlit*

| Tús. kr | | Netto | Útreiðslur | Inntøkur |
|---|---|---|---|---|
| Útreiðsluætlan | | 30.052 | 30.052 | - |
| Løguætlan | | 31.784 | 31.784 | - |
| **Umhvørvi** | | | **27.997** | **-** |
| 7.30.42. | Renovasjón | | 27.997 | - |
| **Tilbúgving** | | | **8.089** | **-** |
| 7.31.11. | Sløkkiliðið | | 8.089 | - |
| **Handil og vinna annars** | | | **3.220** | **-** |
| 7.37.51. | Vinnumenning | | 3.220 | - |
| **Samferðsla og samskifti** | | | **22.530** | **-** |
| 7.38.14. | Havnir og lendingar | | 0 | - |
| 7.38.21. | Bussleiðin | | 22.530 | - |
| 7.38.22. | Parkeringsskipanin | | 0 | - |

*Yvirli t yvir høvuðssløg:*

| | | |
|---|---|---|
| Játtan tilsamans | 61.836 | - |
| Nettostýrt virksemi | 74.115 | 74.115 |
| Virksemi tilsamans | 135.951 | 74.115 |
| Rakstrarinntøkur | - | 67.711 |
| Flytingar millum almennar myndugleikar | 2.886 | 4.217 |
| Flytingarútreiðslur | 4.600 | - |
| Rakstrarútreiðslur | 96.681 | - |
| Skattir og flytingarinntøkur | - | 2.187 |
| Løguútreiðslur | 31.784 | - |

## B. Játtanir

| | | Útreiðslur | Inntøkur |
|---|---|---|---|
| | | - Tús. kr. - | |

## Umhvørvi

| | | | |
|---|---|---|---|
| **7.30.42.** | **Renovasjón** | | |
| 110. | Renovasjón (Rakstrarj.) | 17.997 | - |
| 111. | Renovasjón (Løguj.) | 10.000 | - |

## Tilbúgving

| | | | |
|---|---|---|---|
| **7.31.11.** | **Sløkkiliðið** | | |
| 110. | Sløkkiliðið (Rakstrarj.) | 8.089 | - |

# Handil og vinna annars

| | | | |
| --- | --- | --- | --- |
| **7.37.51.** | **Vinnumenning** | | |
| 110. | Vinnumenning (Rakstrarj.) | 3.220 | - |

# Samferðsla og samskifti

| | | | |
| --- | --- | --- | --- |
| **7.38.14.** | **Havnir og lendingar** | | |
| 111. | Havnir og lendingar (Løguj.) | 21.784 | - |
| 110. | Havnir og lendingar (Rakstrarj.) | -21.784 | - |
| **7.38.21.** | **Bussleiðin** | | |
| 110. | Bussleiðin (Rakstrarj.) | 22.530 | - |
| **7.38.22.** | **Parkeringsskipanin** | | |
| 110. | Parkeringsskipanin (Rakstrarj.) | 0 | - |

# § 20 Inntøkur

## A. Yvirlit

*Játtanaryvirlit*

| Tús. kr | | Netto | Útreiðslur | Inntøkur |
| --- | --- | --- | --- | --- |
| Útreiðsluætlan | | -602.224 | 34.087 | 636.311 |
| **Íbúðarmál** | | | **22.500** | **-** |
| 20.22.41. | Stuðul til rentuútreiðslur | | 22.500 | - |
| **Rentur** | | | **9.587** | **500** |
| 20.50.11. | Rentuútreiðslur | | 9.587 | - |
| 20.50.21. | Rentuinntøkur | | - | 500 |
| **Skattir og avgjøld** | | | **2.000** | **635.811** |
| 20.52.11. | Kommunuskattur | | - | 609.811 |
| 20.52.12. | Felagsskattur | | - | 18.000 |
| 20.52.13. | Skattur av eftirløn | | - | 8.000 |
| 20.52.39. | Aðrar inntøkur | | 2.000 | - |

*Yvirlit yvir høvuðssløg:*

| | Útreiðslur | Inntøkur |
| --- | --- | --- |
| Játtan tilsamans | 34.087 | 636.311 |
| Nettostýrt virksemi | - | - |
| Virksemi tilsamans | 34.087 | 636.311 |
| Flytingar millum almennar myndugleikar | 22.500 | - |
| Flytingarútreiðslur | 9.587 | - |
| Rakstrarútreiðslur | 2.000 | - |
| Skattir og flytingarinntøkur | - | 636.311 |

## B. Játtanir

| | | Útreiðslur | Inntøkur |
| --- | --- | --- | --- |
| | | - Tús. kr. - | |

# Íbúðarmál

| | | | |
| --- | --- | --- | --- |
| **20.22.41.** | **Stuðul til rentuútreiðslur** | | |
| 110. | Stuðul til rentuútreiðslur (Stuðulsj.) | 22.500 | - |

# Rentur

| | | | |
| --- | --- | --- | --- |
| **20.50.11.** | **Rentuútreiðslur** | | |
| 110. | Rentuútreiðslur (Ógreinað j.) | 9.587 | - |
| **20.50.21.** | **Rentuinntøkur** | | |
| 110. | Rentuinntøkur (Ógreinað j.) | - | 500 |

# Skattir og avgjøld

| | | | |
| --- | --- | --- | --- |
| **20.52.11.** | **Kommunuskattur** | | |
| 110. | Kommunuskattur (Ógreinað j.) | - | 609.811 |

| | | | |
|---|---|---|---|
| **20.52.12.** | **Felagsskattur** | | |
| 110. | Felagsskattur (Ógreinað j.) | - | 18.000 |
| **20.52.13.** | **Skattur av eftirløn** | | |
| 110. | Skattur av eftirløn (Ógreinað j.) | - | 8.000 |
| **20.52.39.** | **Aðrar inntøkur** | | |
| 110. | Aðrar inntøkur (Ógreinað j.) | 2.000 | - |

# § 25 Gjaldføri

## A. Yvirlit

*Játtanaryvirlit*

| Tús. kr | Netto | Útreiðslur | Inntøkur |
|---|---|---|---|
| Útreiðsluætlan | 0 | 16.732 | 16.732 |
| **Afturgjald av skuld** | | **16.732** | **-** |
| 25.62.11. Afturgjald av skuld | | 16.732 | - |
| **Útvegan av gjaldføri** | | **-** | **16.732** |
| 25.64.11. Útvegan av gjaldføri | | - | 16.732 |

*Yvirlit yvir høvuðssløg:*

| | | |
|---|---|---|
| Játtan tilsamans | 16.732 | 16.732 |
| Nettostýrt virksemi | - | - |
| Virksemi tilsamans | 16.732 | 16.732 |
| Fíggjarpostar | 16.732 | - |
| Broytingar í "VIRÐI" og "SKULD V.M." | - | 16.732 |

## B. Játtanir

Útreiðslur Inntøkur
- Tús. kr. -

### Afturgjald av skuld

| | | | |
|---|---|---|---|
| **25.62.11.** | **Afturgjald av skuld** | | |
| 110. | Afturgjald av skuld (Ógreinað j.) | 16.732 | - |

### Útvegan av gjaldføri

| | | | |
|---|---|---|---|
| **25.64.11.** | **Útvegan av gjaldføri** | | |
| 110. | Útvegan av gjaldføri (Ógreinað j.) | - | 16.732 |

# Íløguætlan

| | | 2010 | 2011 | 2012 | **2013** | **2010 - 2013** |
|---|---|---|---|---|---|---|
| §2 | Almanna- og heilsumál | 23.000 | 22.750 | 42.000 | - | 87.750 |
| §3 | Børn og ung | 1.000 | - | - | 3.000 | 4.000 |
| §4 | Undirvísing | 99.500 | 54.900 | 12.500 | 6.000 | 172.900 |
| §5 | Mentan og frítíð | 7.000 | 11.538 | 37.300 | 32.591 | 88.429 |
| §6 | Teknisk mál | 7.523 | 13.600 | 40.000 | 46.000 | 107.123 |
| §7 | Kommunal virki | 30.700 | 28.700 | 25.169 | 31.784 | 116.353 |
| | **Íalt** | **168.723** | **131.488** | **156.969** | **119.375** | **576.555** |

**Sundurgreinað ætlan:**

| | | | 2010 | 2011 | 2012 | **2013** | **2010-2013** |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| §2 | 2275 | Læknahølir | | | 2.500 | | 2.500 |
| §2 | 2375 | Tannlæknamiðstøð | | | 1.000 | | 1.000 |

| | |
|---|---|
| **TÓRSHAVNAR BÝRÁÐ**<br>**1. november 2012** | Blað nr.: **10055**<br>Formansins merki: |

| | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| §2 | 2575 | Kommunalar íbúðir | | | 1.000 | | 1.000 |
| §2 | 2775 | Boðanesheimið | 23.000 | 22.000 | 36.500 | | 81.500 |
| §2 | 2775 | Ellisheimið | | 750 | 1.000 | | 1.750 |
| §3 | 3175 | Frítíðarskúlar | 1.000 | | | | 1.000 |
| §3 | 3175 | Birkilund | | | | 3.000 | 3.000 |
| §4 | 4175 | Dagføring av skúlum | 8.500 | 11.000 | 12.500 | - | 32.000 |
| §4 | 4175 | Skúlin í Kollafirði | | 3.000 | | | 3.000 |
| §4 | 4176 | Skúlin við Løgmannabreyt | 7.000 | | | | 7.000 |
| §4 | 4176 | Skúlin á Hamrinum | 84.000 | 32.000 | | | 116.000 |
| §4 | 4176 | Sankta Frans smábarnaskúli | | 8.900 | | | 8.900 |
| §4 | 4176 | Vesturskúli | | | | 2.000 | 2.000 |
| §4 | 4175 | Eysturskúli Lon E | | | | 2.000 | 2.000 |
| §4 | 4175 | Hoyvíkar skúli | | | | 2.000 | 2.000 |
| §5 | 5175 | Musikkskúli | | 4.000 | 8.000 | 1.300 | 13.300 |
| §5 | 5375 | Reinsaríið | | 1.500 | 1.000 | 3.000 | 5.500 |
| §5 | 5375 | Skálatrøð framtíðarætlan | | | 3.000 | | 3.000 |
| §5 | 5375 | Müllers pakkhús | | | 1.000 | | 1.000 |
| §5 | 5375 | Boðanesgjógv mentanarøki | | | 1.000 | | 1.000 |
| §5 | 5475 | Býarbókasavnið kjallarin | | | 1.500 | | 1.500 |
| §5 | 5775 | Høllin á Hálsi | 3.000 | | 2.500 | 10.000 | 15.500 |
| §5 | 5775 | Høllin í Kollafirði | | 1.500 | 2.300 | | 3.800 |
| §5 | 5775 | Badmintonhøllin | 1.000 | | | | 1.000 |
| §5 | 5775 | Høllin í Hoyvík | | | | 2.291 | 2.291 |
| §5 | 5775 | Fimi | 3.000 | | | | 3.000 |
| §5 | 5775 | Tórsvøllur | | 4.538 | 4.000 | 10.000 | 18.538 |
| §5 | 5775 | Svimjihøll | | | 5.000 | 5.000 | 10.000 |
| §5 | 5775 | Oyggjaleikir/Golfvøllur | | | 5.000 | | 5.000 |
| §5 | 5775 | Vøllur í Hoyvík | | | 2.000 | 1.000 | 3.000 |
| §5 | 5775 | Høli til frælsan ítrótt | | | 1.000 | | 1.000 |
| §6 | 6175 | Søla av húsum | -4.000 | | | | -4.000 |
| §6 | 6176 | Søla av trøð | -4.000 | | | | -4.000 |
| §6 | 6275 | Fríðkan av býnum | 3.000 | 1.000 | 2.000 | | 6.000 |
| §6 | 6275 | Miðbýðarætlan | | | | 2.000 | 2.000 |
| §6 | 6275 | Miðbýarumhvørvi | | | 1.000 | | 1.000 |
| §6 | 6275 | Havnará | | 1.000 | | | 1.000 |
| §6 | 6475 | Byggibúning bústaðir | 16.153 | | | | 16.153 |
| §6 | 6575 | Kirkjugarðar | 2.000 | 1.000 | 1.000 | 3.000 | 7.000 |
| §6 | 6575 | Kirkjugarður í Hoyvík | | | 1.000 | | 1.000 |
| §6 | 6775 | Vatnveiting | 650 | | 1.000 | | 1.650 |
| §6 | 6875 | Kloakkir | 4.000 | 4.000 | 7.000 | 6.000 | 21.000 |
| §6 | 6975 | Byggibúning vinnan | -16.153 | | | | -16.153 |
| | | | 2010 | 2011 | 2012 | **2013** | **2010 - 2013** |
| §6 | 8175 | Glyvursvegur við brúgv | 1.000 | 2.600 | 10.000 | 25.000 | 38.600 |
| §6 | 8175 | Gongugøtan | | | 2.000 | | 2.000 |
| §6 | 8175 | Gøta til Hvítanes | | | 1.500 | | 1.500 |
| §6 | 8175 | Súkklubreyt | | | 1.000 | 1.000 | 2.000 |
| §6 | 8175 | Glyvursvegur slitlag | | | 1.000 | | 1.000 |
| §6 | 8175 | Rundkoyring við Óluvugøtu | | | 2.000 | | 2.000 |
| §6 | 8175 | Vegakervið Dvørgast./u Borgarah. | | | 2.000 | | 2.000 |
| §6 | 8175 | Eyst.ringv./Hvítanesv-ljósregulering | | | 1.500 | | 1.500 |
| §6 | 8175 | Sundsvegur dagføring | | | 2.000 | 6.000 | 8.000 |
| §6 | 8375 | Rakstrargøgn | 4.873 | 4.000 | 4.000 | 3.000 | 15.873 |
| §7 | 7175 | Renovatión | 7.000 | 4.000 | 2.000 | 10.000 | 23.000 |
| §7 | 7476 | Smábátahavn | | 2.000 | 2.000 | | 4.000 |
| | | | **145.023** | **108.788** | **135.800** | **97.591** | **487.202** |
| §7 | 7475 | Tórshavnar Havn | 23.700 | 22.700 | 21.169 | 21.784 | 89.353 |
| | | **Íalt** | **168.723** | **131.488** | **156.969** | **119.375** | **576.555** |

**Heilsu- og umhvørvisnevndin 2. oktober 2012:** Uppskot til ársfíggjarætlan 2013 fyri kontur 6610, 6611, 6710, 8210 og 7110 varð framlagt. Viðgerðin verður tikin uppaftur á eykafundi 22. oktober 2012.

**Ískoyti:**
Í framhaldi av viðgerðini frá fundinum í heilsu- og umhvørvisnevndini frá 8. oktober 2012, hevur umsitingin arbeitt við broyttari ársfíggjarætlan fyri kto. 7110, renovatión. Í mun til ta fyrru framløgdu ætlan fyri 2013, har samlaða játtan var álj. kr. 17.997.000,-, verður við dagførda uppskotinum lagdar 0,8 mió. kr. afturat rakstinum, so at játtanin verður kr. 18.794.000,-. Meirjáttanin metir umsitingin verða neyðuga, tí kommunala brennistøðin hevur gjørt sáttmála við arbeiðstakara um ruskinnsavnan, sum skal prístalsviðgerast eins og hædd skal verða tikin fyri øðrum bundnum útreiðslum. Víst verður til skjal j. nr. 2012-1268/13. Umsitingin greiðir annars frá.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og leiðarin á kommunalu brennistøðini mæla til at játta kr. 0,8 mió. kr. av framfluttum íløgukarmi innan renovatiónsøkið L00002 og at beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Heilsu- og umhvørvisnevndin 22. oktober 2012:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum og beinir málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 8. oktober 2012:** Umsitingin greiddi frá uppskotinum til fíggjarætlan.

**Sosiala nevnd 9. oktober 2012:** Samtykt at taka undir við fíggjarætlanini sum heild tó so, at samlaða játtanin til tilhaldini í Tórsgøtu, í Kollafirði og í Nólsoy verður hækkað við kr. 500.000, og at umsitingin á eykafundi leggur fram ætlan um fígging innan verandi karmar.

Nevndin ger haraftrat vart við, at fráboðað kunngerðarbroyting viðvíkjandi áseting av brúkaragjaldi til serstovnar hjá landinum (konta 2617) hevur við sær ein nýggjan fíggjartørv á kr. 2.000.000. Nevndin heitir á fíggjarnevndina um at fáa til vega fígging til endamálið.

**Sosiala nevnd 23. oktober 2012:** Nevndin samtykti hesar broytingar í sambandi við meirfígging kr. 500.000 til dagtilhaldini: 2740 Dagtilhaldið í Tórsgøtu 1.318 (+400), 2741 Dagtilhaldið i Kollafirði 110 (+50), 2742 Dagtilhaldið í Nólsoy 297 (+50), 2210 Kommunulæknatænastur 3.769 (-50), 2310 Barnatannrøktin 10.797 (-50), 2610 Barnaverndarnevndin 135 (-25), 2615 Pedagogisk frípláss 250 (-25), 2716 Gjald fyri pláss í øðrum kommunum 75 (-25), 2810 Fíggjarligt frípláss 4.375

(125). Restfíggingin til dagtilhald kr. 200.000 verður at fíggja við framflyting av kontu 2460 Stuðul til endamál innan almanna- og heilsumál.

**Mentamálanevndin 10. oktober 2012:** Ein meirluti: Jógvan Arge, Halla Samuelsen,
Elin Lindenskov og Annfinn Brekkstein samtykti at viðmæla framlagda uppskotið.

Ein minniluti: Bogi Andreassen tekur støðu á seinni fundi.

Halla Samuelsen viðmerkir, at umsókn er komin frá Venjingarskúlanum um játtan til
útgerð á fysikkstovuni og at hædd verður tikin fyri hesum.

**Tekniska nevnd 11. oktober 2012:** Uppskot til ársfíggjarætlan 2013 fyri hesar konti varð framlagt, 6810, 6811, 8110, 8111, 8112, 8113, 8114, 7510 og 7610. Nevndin staðfestir, at játtanin til konto 7510, Bussleiðin, er umleið kr. 830 tús. ov lág, um verandi tænastustøði skal haldast og kommunan skal halda sáttmálaskyldur sínar viðv. prístalsregulering. Umsitingin hevur gjørt metingar sum vísa, at tað væntast eitt avlop fyri 2012, og at írestandi upphæddin á kr. 830 tús. kann fíggjast av avlopinum, sum verður framflutt til 2013. Nevndin samtykti tí at taka undir við fíggjarætlanaruppskotinum fyri 2013 við teirri viðmerking, at játtanin til konto 7510 er ov lág, men at írestandi peningurin verður fíggjaður av væntaðum framfluttum avlopi frá 2012.

**Brunanevndin 11. oktober 2012:** Viðmæla býráðnum umvegis fíggjarnevndina, at samtykkja við 1. viðgerð.

**Ískoyti:** Niðanfyristandandi talva vísir broytingarnar ísv. viðgerðina í einstøku nevndunum av fíggjarætlanini fyri 2013.

| | **Rakstrarstað** | **Hækking** | **Lækking** |
|---|---|---|---|
| 2740 | Tilhaldið í Tórsgøtu | 400.000 | |
| 2741 | Dagtilhaldið í Kollafirði | 50.000 | |
| 2742 | Dagtilhaldið í Nólsoy | 50.000 | |
| 2210 | Kommunulæknatænastur | | 50.000 |
| 2310 | Barnatannrøktin | | 50.000 |
| 2610 | Barnaverndarnevndin | | 25.000 |
| 2615 | Pedagogisk frípláss | | 25.000 |
| 2716 | Gjald fyri pláss í øðrum kommunum | | 25.000 |
| 2810 | Fíggjarligt frípláss | | 125.000 |
| 2460 | Stuðul til endamál innan almanna- og heilsumál **(av framfluttari játtan 2012)** | | 200.000 |
| | | **1.300.000** | **1.300.000** |

**Fíggjarnevndin 24. oktober 2012:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Jógvan Arge og Elin Lindenskov, mælir býráðnum til at taka undir við fíggjarætlanini við omanfyristandandi broytingum frá nevndunum.

Ein minniluti, Sjúrður Olsen og Bogi Andreasen, tekur støðu á seinni fundi.

Harumframt biður ein samd nevnd teknisku nevnd um at umraðfesta íløgurnar á tekniska økinum, so íløgan til dagføring av Dvørgastígi verður framd í 2013. Víst verður í hesum sambandi til einmæltu samtyktina í býráðnum 2. mai 2012.

**Býráðið 1. november 2012:** Einmælt samtykt.

**252/12** **2012-2183**

**Fíggjarætlan fyri 2013 hjá Tórshavnar havn.**

Sambært kommunustýrisskipanaini skal fíggjarnevndin fyri 1. oktober leggja uppskot til fíggjarætlan fyri kommunustýrið til komandi fíggjarætlan.

Kommunustýrið skal viðgera uppskot til fíggjarætlan tvær ferðir við í minsta lagi 14 daga millumbili.

Fíggjarætlanin skal vera endaliga samtykt í seinasta lagi 1. desember.

**Havnarnevndin 24. september 2012:** Samtyktu fíggjarætlanina við 1. viðgerð, sum javnvigar við tkr. 50.610,-, og at senda hana til fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 24. september 2012:** Framlagt og samtykt at leggja fyri býráðið.

**Býráðið 27. september 2012:** Framlagt.

**Fíggjarnevndin 24. oktober 2012:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við fíggjarætlanini.

**Býráðið 1. november 2012:** Einmælt samtykt.

253/12 **2012-2298**

**Ársroknskapur og grannskoðanarprotokoll fyri 2011 hjá Westward Ho**

**Lýsing av málinum - samandráttur:**
Roknskapurin fyri 2010 verður latin Tórshavnar kommuna til góðkenningar sambært § 6 í reglugerð fyri Westward Ho.

Grannskoðaður roknskapur fyri Westward Ho fyri 2011 verður framlagdur.

**Fíggjarnevndin 24. oktober 2012:** Samtykt at mæla býráðnum til at góðkenna roknskapin.

**Býráðið 1. november 2012:** Einmælt samtykt.

254/12 **2012-1209**

**Meirnýtsla á deild 8114, Kavarudding í 2012**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Vegna nógvan kava og ov lítla játta heldur játtanin til kavarudding ikki í 2012. Kostnaðurin fyri kavarudding í 2011 var uml. 3 mió. kr. og netto játtanin fyri 2012 uml. 1,5 mió. kr. og primo apríl í ár var kontoin áleið brúkt.

Mett verður, at talan verður um eina meirinýtslu á uml. 1,5 mió. kr. fyri fíggjarárið 2012. Verður sama kavaveður næsta vetur og skal støðið á kavaruddingini ikki broytast, verður neyðugt at økja játtanina hjá deild 8114 við uml. 1,5 mió. kr.

Møguleikarnir fyri at fáa javnvág í roknskapin fyri kavaruddingina eru antin at fáa útvega eina eykajáttan ella at flyta pening av aðrari rakstrarkonto.

**Fíggjarstøðan pr. apríl 2012:**

| Deild | Bókað hendan mð | Bókað higartil | Ætlan higartil | Brúkt í pct (higartil) | Ætlan fyri árið | Brúkt í pct (árið) | Avlop |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 8112 Asfalt | 503 | 1.798 | 3.513 | 51,18 | 10.549 | 17,04 | 8.751 |
| 8114 Kavarudding | 132 | 1.635 | 997 | 164,06 | 2.334 | 70,05 | 699 |

**Tilmæli:**

Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og leiðarin á plan- og rakstrardeildiini mæla til at játta eina eyðkajáttan á 1,5 mió. kr. til Kavarudding deild 8114. Mælt verður í øðrum lagi til at flyta 1,5 mió. kr. frá Asfaltdeildini 8112, til kavaruddingina, deild 8114.

**Tekniska nevnd 22. mai 2012:** Nevndin samtykti at heita á fíggjarnevndina um at fáa til vega eyðkajáttan á 1,5 mió. kr. til kavarudding deild 8114, fyri 2012.

**Fíggjarnevndin 23. mai 2012:** Samtykt at beina málið aftur í teknisku nevnd at ávísa fígging.

**Ískoyti**
Avgerðin hjá fíggjarnevndini 23. mai 2012 um at beina áheitanin frá teknisku nevnd um eykajáttan aftur til nevndina merkir, at fíggjarnevndin ikki tekur undir við teknisku nevnd 22. Mai 2012, um at veita eykajáttan, og at peningurin tískil skal finnast innanfyri verandi fíggjarætlan.

Vísandi til at arbeitt hevur verið við asfaltætlanini burturav um summarhálvuna, er ikki longur rúm fyri at fíggja hallið á kavaruddingini av asfaltkonto'ini, soleiðis sum tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin annars mæltu til meðan rúm enn var fyri hesum á kontoini, hin 22. mai 2012.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og leiðarin á plan- og rakstrardeildini mæla til, at beina málið í býráðið, um fíggjarnevndina, at fíggja upphædd álj. kr. 1,5 mió. av kt. 8175 – íløga í vegir, avsett til Glyvursveg við brúgv (mál nr. 2006-3283), og at játtan til Glyvursvegin við brúgv verður tillagað samsvarandi, eftir at lisitatión hevur verið í okt. 2012, í langtíðar íløguætlanini fyri 2013 og 2014.

**Tekniska nevnd 4. september 2012:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum og beinir málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 12. september 2012:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við tilmælinum.

**Býráðið 13. september 2012:** Einmælt samtykt.

**Býráðið 1. november 2012:** Einmælt samtykt.

**255/12** **<u>2012-1592</u>**

**<u>Broyting av fíggjarætlanini fyri 2012 við eykajáttan</u>**

Býráðið hevur samtykt, at avdráttirnir í 2012 skulu gjaldast og at avdráttir uppá tkr. 11.500 skulu fíggjast við meirinntøkum í 2011 (jnr. 2012-0132). Avdráttirnir eru íalt 17.517. Sostatt restar fígging av 6.017. Harumframt hevur kommunan tapt eitt sakarmál, sum kemur at kosta tkr. 2.242. Sostatt er neyðugt við fígging uppá tkr. 8.259 íalt.

Nú roknskapurin fyri 2011 er liðugur kann staðfestast, at inntøkurnar eru tkr. 27.000 hægri enn mett í fíggjarætlanini.

**Tilmæli**
Miðfyrisitingarstjórin og fíggjarleiðarin mæla til, at meirinntøkurnar verða brúktar til fígging av nevndu útreiðslum og at fíggjarætlanin verður broytt soleiðis:
25.64.11 Útvegan av gjaldførið hækkar tkr.8.259
25.64.11 Upptøka av lánum lækkar tkr. 6.017
20.52.39 Aðrar inntøkur (20910) hækkar tkr. 2.242

**Fíggjarnevndin 28. juni 2012:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við tilmælinum.

**Býráðið 28. juni 2012:** Einmælt samtykt.

**Býráðið 1. november 2012:** Einmælt samtykt.

**256/12** **<u>2012-0111 (sí eisini mál nr 2001-0243) FNJ</u>**

**<u>Prosjektering av moldplássinum í Kollafirði</u>**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Í framhaldi av mál nr. 2001-0243 er avgerð er tikin um at skipa eitt moldøki í Kollafirði á leið har tað verandi moldøkið liggur. Talan er um økið vestanfyri Dalánna, t.e. millum Dalánna og uppdyrkingarvegin, ið Royndarstøðin hevur latið gera. Víst verður í hesum sambandi til uppskot til støðuplan j.nr. 2001-0243/25.
Ráðgevi hevur, saman við umsitingini, latið gera skitsu uppskot yvir økið, og er hetta lagt fram fyri Búnaðarstovuna tann 23.03.12, (sí j.nr. 2012-0111/7). Endaligt skipanaruppskot verður lagt fyri Búnaðarstovuna 15.06.12 at góðkenna. Uppskotið og samlað kostnaðarmeting, (sí j.nr. 2012-0111/8) verða framløgd á fundinum til støðutakan.

**Fíggjarlig viðurskifti.**
Samlaði kostnaðurin fyri útvegan av lendi og gerð av arbeiðinum verður mettur til kr. 15.665.181,00 íroknað mvg, evt. 16.228.306,00 íroknað mvg, um kloakkleiðing verður løgd í atkomuvegin. Verður haraftur ímóti talan um leigu av lendi verður mett, at arbeiðið kemur at kosta kr. 6.619.375,00 íroknað mvg, evt. 7.182.500,00 íroknað mvg, um kloakkleiðing verður løgd í atkomuvegin umframt eina árliga leigu til Búnaðarstovuna upp á umleið kr. 15.000. Leigumálið verður møguliga endurskoðað 5. hvørt ár.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og leiðarin fyri heilsu- og umhvørvisdeildina mæla til, at kostnaður fyri projektið verður sett av á ársfíggjarætlanini fyri 2013.

**Heilsu- og umhvørvisnevndin 19. juni 2012:** Málið útsett.

**Ískoyti:**
Búnaðarstovan hevur lagt fram ynski um, at kommunan grevur kava og saltar vegin frá landsvegnum oman til Búnaðarstovuna. Endalig støða er ikki tikin til hetta. Verkfrøðinagstovan, ið hevur projekterað moldmóttøkuplássið, hevur gjørt kostnaðarmeting fyri tað arbeiði, ið skal gerast fyri at moldmóttøkuplássið kann lata upp. Hetta er at roknað sum 1. av møguligum 5 byggistigum (kostnaðir uttan mvg):

| | |
|---|---|
| Atkomuvegur, uml. 650 m | 1.500.000,- |
| Vegur 1 við síðugreinum | 1.380.000,- |
| Vegur 2 uttan síðugreinar | 400.000,- |
| Ovasti vegur, st. 1 – 100 | 600.000,- |
| Skittvatnskloakk í atkomuveg, uml. 650 m | 400.000,- |
| Projekt + útboð | 220.000,- |
| **Kostnaður** | **4.500.000,-** |

Fylgjandi byggistig, um hildið verður fram, eru mett at kosta:

| | | |
|---|---|---|
| 2. byggistig | 2.120.000,- | |
| 3. byggistig | 2.120.000,- | |
| 4. byggistig | 2.175.000,- | |
| 5. byggistig | 1.220.000,- | |
| Samlaður kostnaður (íroknað 1. byggistig) | | 12.135.000,- |

1. byggistig kann lutvíst fíggjast av íløgukonto 7175 fyri renovasjón, har játtan til tyrvingarplássið á Glyvursnesi er, ið ikki verður brúkt í ár, áljóðandi kr. 2.369.000,-.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og leiðarin fyri heilsu- og umhvørvisdeildina mæla til, at kr. 2.369.000,- verða játtaðar av konto 7175 til moldplássið í Kollafirði og at arbeiðið

verður boðið út, og at írestandi fígging av 1. byggistigi, ið sambært meting verður mett til 2.131.000,-, verður raðfest á íløguætlan fyri 2013.

**Heilsu- og umhvørvisnevndin 4. september 2012:** Nevndin samtykti at 2.369.000,- verða játtaðar av konto 7175 til moldplássið í Kollafirði og at írestandi fígging av 1. byggistigi, ið sambært meting verður mett til 2.131.000,-, verður raðfest á langtíðaríløguætlan og at beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 12. september 2012:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við tilmælinum.

**Býráðið 13. september 2012:** Einmælt samtykt.

**Býráðið 1. november 2012:** Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum frá Jan Christiansen um, at beina málið aftur í Heilsu- og umhvørvisnevndina.

**257/12** **2010-1181 BAM**

**Ruskinnsavning: Umsókn frá Sp/f Jón Thomasen um at góðkenna útskifting av ruskbili**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Sp/f Jón Thomasen hevur sett fram ynski um at útskifta verandi ruskbilar, sum hann yvirtók frá Tom Hellisdal.

Í telduposti, dagfestur 6. mai 2010 (j.nr. 2010-1181/1), søkir hann í fyrsta lagi um at útskifta pappírsbilin við ein nýggjan ruskbil. Í øðrum lagi verður søkt um at útskifta báðar ruskbilarnar til vanligt rusk, tá nýggi pappírsbilurin er avprøvaður.

Sp/f Jón Thomasen ynskir at sleppa á fund at greiða frá sínum ætlanum.

Sáttmálin millum Tórshavnar kommunu og Sp/f Jón Thomasen um ruskinnsavning ásetur (kap.5, § 26), at um neyðugt verður at keypa og/ella útskifta bilar í sáttmálatíðini, rindar arbeiðstakarin allar útreiðslur í hesum sambandi. § 26 stk. 2 ásetur, at arbeiðsánarin (TK) skal góðkenna bilar, áðrenn teir verða keyptir og/ella útskiftir. Sambært § 33 hevur arbeiðsánarin yvirtøkurætt og -skyldu av ruskbilum, tá sáttmálin fer úr gildi (vegna uppsøgn, sáttmálaslit ella tá sáttmálaskeiðið er úti), tó hevur arbeiðstakarin ikki yvirtøkuskyldu av ruskbilum eldri enn 7 ár. Sáttmálin ásetir sostatt ikki, at verandi ruskbilar, ið eru yvirtiknir frá Tom Hellisdal, skulu nýtast alt sáttmálaskeiðið.

Notat við yvirliti yvir, hvat ið yvirtøkuvirðið av bilunum vil verða, tá sáttmálatíðin er úti, er gjørt (j.nr. 2010-1181/2).

Leiðarin á Kommunalu Brennistøðini metir tað vera rættast (og sjálvsagt), at arbeiðstakarin avger, hvussu maskinparkin eigur at vera samansett, tó treytað av krøvini til bilar sambært sáttmálanum verða hildin, og at Tórshavnar kommuna góðkennir bilarnar sambært sáttmálanum.

**Tilmæli:**
Leiðarin á kommunalu brennistøðini, leiðarin á heilsu- og umhvørvisdeildini og býarverkfrøðingurin mæla til, at Tórshavnar kommuna góðkennir útskiftingina av pappírsbilinum, og at mál um útskiftingina av ruskbilum verður tikið upp aftur seinni, eftir møguligari nýggjari umsókn frá sp/f Jón Thomasen. Mælt verður harumframt til at beina málið í fíggjarnevndina.

**Heilsu- og umhvørvisnevndin 25. mai 2010:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum og at beina málið í fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 16. juni 2010:** Samtykt at taka undir við heilsu- og umhvørvisnevndini.

**Ískoyti:**
Sp/F Jón Thomasen søkir í teldubrøvum, dagfest 31/8-2012 og 19/9-2012, um loyvi til at útskifta tveir 2-akslaðar ruskbilar árg. 2007, ið vórðu keyptir frá Tom Hellisdal, út við 2 aðrar nýggjar bilar.
Ætlanin hjá Jón Thomasen er at keypa 2 smærri bilar á somu stødd sum teir minnu kranabilarnir hjá komununi. Hesir eru 15-16 tons bilar við agregati sum er 10,5-11,5 M3. Nýggju bilarnir kosta 1,25 mió. pr. stk.

Grundgevingarnar hjá Jón Thomasen fyri at skifta bilarnar eru hesar:

- Verandi bilar, sum vórðu yvirtiknir frá Tom Hellisdal, vístu seg ikki at verða í so góðun standi sum sagt var,
- Verandi bilar eru heldur klossutir at koyra við í havnargøtun, meðan nýggju bilarnir eru minni, t.v.s. at teir skuldu sloppi betur runt í havnini, harvið skuldi veitingartrygdin blivið uppaftur betri enn hon er idag.
- Verandi bilar hava ikki automatgear sum er eitt sera stórt minus
- Nýggju bilarnir eru meiri umhvørvisvinarligir, t.v.s. euro 5 við eev, í mun til euro 4, sum teir gomlu bilarnir eru
- Nýggju bilarnir hava lægri innstigning (tvs. betri fyri førara og innsavnarar knø o.a.)

Viðvíkjandi yvirtøkuskyldu kommununar verður víst til tekstin omanfyri í sambandi við viðgerð í heilsu- og umhvørvisnevndini 25/5-2010.

Notat við útrokning av yvirtøkukostnaði er gjørt, j.nr. 2010-1181/11. Útrokningin vísir, at yvirtøkuvirðið tann 31-03-2015 (sáttmálaendi) verður umleið kr. 1,6 mió.

í alt fyri hesar báðar bilarnar. Harumframt hevur kommunan áður góðkent útskifting av pappírsbili, ið hevur eitt yvirtøkuvirði á 0,4 mió. tann 31-03-2015. Sostatt verður yvirtøkuskyldan fyri allar 3 bilarnar umleið kr. 2,0 mió. í alt, um henda útskifting verður góðkend.

Um sáttmálin verður longdur ávíkavist 1 og 2 ár, verður samlaða yvirtøkuskyldan fyri allar 3 bilarnar ávíkavist kr. 1,52 mió. og 1,04 mió.

Leiðarin á Kommunalu Brennistøðini metir tað vera rættast (og sjálvsagt), at arbeiðstakarin avger, hvussu maskinparkin eigur at vera samansett, hetta fyri at ruskinnsavningin loypandi verður effektiviserað mest møguligt við røttu amboðunum. Tó treytað av at krøvini til bilar sambært sáttmálanum verða hildin, og at Tórshavnar kommuna góðkennir bilarnar sambært sáttmálanum.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin, leiðarin á heilsu- og umhvørvisdeildini og leiðarin á Kommunalu Brennistøðini mæla til, at Tórshavnar kommuna góðkennir útskiftingina av hesum báðum bilum. Mælt verður harumframt til at beina málið í fíggjarnevndina.

**Heilsu- og Umhvørvisnevndin 2. oktober 2012:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum og at umsitingin samráðist um treytir hesum viðvíkjandi og beinir málið í fíggjarnevndina.

Bogi Andreasen var ikki við til viðgerð av málinum.

**Ískoyti:**
Bilarnir sum Sp/F Jón Thomasen søkir um at fáa útskiftar, vóru sýnaðir við yvirtøkuna, og vóru tá bert uml. 2 ára gamlir.

Útskifting av pappírsbilum og ruskbilum í sjálvum sáttmálaskeiðnum, hevur fíggjarligar avleiðingar fyri bæði kommununi og eigaran. Útskiftingin av pappírsbilinum er longu góðkend, og verður tí ongin broyting gjørd viðvíkjandi tí bilinum.

Við at selja verandi ruskbilar fyrr enn upprunaliga ætla, fær eigarin ein hægri brúktbilaprís fyri seldu bilarnar. Somuleiðis viðførir hetta eina forskjóting soleiðis, at bilarnir nú verða fevndir av sáttmálaásetingunum um yvirtøkuskyldu sambært §33 í arbeiðstøkusáttmálanum (j. nr. 2009-0754/63), og er eigarin sostatt púra leysur av bilunum við sáttmálaenda, og fær eitt hægri yvirtøkugjald, enn um verandi bilar ikki verða útskiftir. Samanumtikið hevur arbeiðstakarin tí helst ein fíggjarligan fyrimun av at sleppa at útskifta bilarnar longu nú.

Fyri kommununi viðførir henda forskjótingin, at kommunan við sáttmálaenda 31-03-2015, skal rinda eitt yvirtøkugjald, sambært §33 í arbeiðstøkusáttmálanum (j. nr. 2009-0754/63), og yvirtekur tá tveir uml. 3 ára gamlar ruskbilar, sum so aftur

skulu víðariførast í samband við ein nýggjan sáttmála, um verandi sáttmáli ikki verður longdur. Samanumtikið hevur kommunan helst ikki fíggjarligan fyrimun av at sleppa at útskifta bilarnar longu nú.

Tekniski stjórin hevur umrøtt umsóknina og uppskot til semju við Jón Thomasen, og tekur hann undir við niðanfyri standandi tilmæli.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin mælir til, at Tórshavnar kommuna góðkennir útskiftingina av hesum báðum bilum, við teirri treyt, at ásetingin í §33 í arbeiðstøkusáttmálanum (j. nr. 2009-0754/63) um yvirtøkuskyldu hjá kommununi, ikki verður galdandi fyri hesar tveir nýggju ruskbilarnar, tá sáttmálaskeiði endar 31-03-2015, og heldur ikki um sáttmálaskeiðið verður longt sambært §30 í arbeiðstøkusáttmálanum (j. nr. 2009-0754/63), men at eigarin sjálvur frítt kann selja bilarnar tá.

**Fíggjarnevndin 24. oktober 2012:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við tilmælinum.

**Býráðið 1. november 2012:** Einmælt samtykt.

**258/12** **2012-1900 KF**

**Broyting av byggisamtykt við Sundsvegin/Sortudýki og skipan av økinum við Kringvarpið, Norðurlandahúsið og nýggja Musikkskúlan**

**Lýsing av málinum - samandráttur:**
Í sambandi við at fleiri mál í seinasta hava verið undir viðgerð við niðasta part av Sundsvegnum og við Sortudýki, metir umsitingin at tað er rættast at samla alt hetta í eitt mál, soleiðis at býarskipanarliga viðgerðin verður fyri eitt náttúrliga avmarkað øki, og soleiðis at eitt betri yvirlit fæst yvir alt økið, og framtíðar nýtsluna av økinum. Talan er um málini, umsóknir frá Oddmar Færø (2012-0231), Annu Mohr (2011-1565) og P/F Búrøkt (2011-1404) um broytingar av byggisamtykt, broytingar av Sundsvegnum (2008-1294 og 2012-0370) og ætlanir um útbygging av Kringvarshúsunum (2004-2487) og bygging av nýggjum musikkskúla (2009-3106).

**Stutt lýsing av umsóknum og ætlanum í økinum:**
Oddmar Færø (2012-0231) ynskir at fáa broytt byggisamtyktina fyri ognina matr. nr. 1457a, Tórshavn, sum liggur vestan fyri Sundsvegin frá D1 øki til A3-øki.

Anna Mohr (2011-1565) ynskir at fáa broytt byggisamtyktina fyri ognina matr. nr. 1454a, Tórshavn, sum liggur vestan fyri Sundsvegin frá D1 øki til A-økið, t.d. A3-øki.

P/F Búrøkt (2011-1404) ynskir at fáa broytt byggisamtyktina fyri part av ognini, matr. nr. 1401a, sum liggur eystan fyri Sundsvegin, frá D1 til blandaða íbúðabygging. Umsóknin nevnir ikki ítøkiliga hvat broytingin skal verða, men umsitingin metir hetta svara til A3-øki.

Við Sortudýki hevur Kringvarpið (2004-2487) nú í fleiri ár havt ymiskar ætlanir um útbyggingar av teirra bygningi á matr. nr. 1452c. Nú fyriliggur ein meira ítøkilig ætlan um útbygging. Umsitingin hevur havt fund við KvF hin 22. aug. 2012, har teir kunnaðu um útbyggingarætlan teirra.

Býráðið hevur samtykt at fara undir bygging av nýggjum musikkskúla (2009-3106) í økinum eisini, á matr. nr. 1409 og 1453a.

Í sambandi við yvirskipaði ferðsluviðurskifti í sambandi við nýggjan innkomuveg til Havnar, kemur Sundsvegurin at verða ein týðandi partur av ferðslusambandinum millum Norðara Ringveg og nýggja innkomuvegin. Býráðið avgjørdi tí 14. des. 2011 at lata gera uppskot til dagføring av Sundsvegnum (2008-1294 og 2012-0370).

At enda hevur býráðið eisini í sambandi við fíggjarætlanarviðgerðina fyri 2011 (2010-2717), avsett pening til at fáa gjørt eina ætlan fyri frílendi til borgaran á økinum við Hoydalsá. Umsitingin hevur síðani arbeitt við at gera eina skipanarætlan fyri lendið í økinum, soleiðis at tey verða borgarunum í býnum til bestu náttúru- og frítíðarupplivingar, við íðkanarmøguleikum og rørslufremjandi tilboðum (2012-0881). Eisini gjørdi kommunan í 2009 eina avtalu við Innlendismálaráðið um partar av økinum, við tí fyri eyga at skapa Føroya største, samanhangandi fríøki líka frá Boðanesgjógv niðan í Villingadal.

**Býarskipanarlig viðurskifti:**
Upprunin til fríøkið fram við Hoydalsá er frá 1930´unum, tá farið varð undir eina skipan við urtagarðsstykkjum. Í 1972 samtykti býráðið at leggja eitt stórt samanhangandi øki, líka frá Boðanesi niðan í Villingadal, út sum Frílendi D1-øki í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavn, at nýta til almenning, náttúrufriðing og mentunarlig endamál. Í 1983 staðfesti Yvirfriðingarnevndin friðingarlinjur í økinum, og í 1995 var serstøk samtykt lýst á økið, um fríøkir, traðarbrúk og gróðursetingar.

Økið kring Kringvarpshúsið og Norðulandahúsið er í almennu byggisamtyktini lagt út sum C2-øki, ætlað til miðstaðarendamál, serstakliga stovnar, framsýningahallir, tónleikahallir og aðrar mentunarligar stovnar Ein partur av ognini hjá Kringvarpinum, er skógarfriðaður, og er gjørd ein serlig, skrivlig avtala um hetta økið millum Skógfriðingarnevndina og Kringvarpið.

Fyri ognirnar hjá kommununi, sum liggja eystan fyri Norðurlandahúsið, var gjørd ein serlig avtala millum kommununa og Norðurlandahúsið – eitt sokallað friðingarbræv. Norðurlandahúsið og kommunan hava viðgjørt hesa avtalu í sambandi við ætlanina at byggja Musikkskúla har, og hevur Norðurlandahúsið tikið undir við ætlanini.

Hinar ognirnar vestan fyri Sundsvegin, sum hetta málið fevnir um – t.e. matr. nr. 1453b, 1454a og 1457a, eru lagdar út sum frílendi D1-øki í almennu byggisamtyktini. Sama ger seg galdandi fyri matr. nr. 1401a, sum liggur eystan fyri Sundsvegin, og er beinleiðis partur av stóra frílendinum fram við Hoydalsá.

**Ferðsluviðurskifti viðurskifti v.m.:**
Ongin ivi er um, at framtíðar leikluturin hjá Sundsvegnum, sum mest týðandi parturin av ferðslusambandinum millum Norðara Ringveg og nýggja innkomuvegin, kemur at føra til munandi vøkstur í ferðsluni eftir Sundsvegnum. Framskrivingar eru gjørdar í sambandi við viðgerðina av málinum um nýggjan innkomuveg (2001-0407), sum stuðla uppundir hetta.

Tað er heldur ongin ivi um, at útbyggingarætlanin hjá Kringvarpinum, har ætlanin er at savna útvarp og sjónvarp í Sortudýki, fer at føra til munandi meira ferðslu til bygningin og tørv á parkeringsplássum, ikki bert fyri starvsfólk, men eisini í sambandi við sendingar við áskoðara-/áhoyraraluttøku. Sama ger seg galdandi fyri Musikkskúlan, har fleiri hundrað næmingar koma og fara frá undirvísing dagliga. Samstundis er tað ein trupulleiki, at Norðurlandahúsið langt frá hevur nøktandi parkeringsumstøður til sítt vanliga virksemi, og heldur ikki hevur møguleika at útbyggja meira til eitt nú parkeringspláss. Neyðugt er tí, at ein framtíðar ætlan fyri hetta økið, letur upp fyri at loysa hesar trupulleikar, tá virksemið í økinum verður so nógv økt.

**Viðmerkingar frá umsitingini:**
Ein týðandi munur millum D1-økið vestan fyri Sundsvegin (t.e. matr. nr. 1453b, 1454a, 1457a og part av 1458c) og D1-økið eystan fyri Sundsvegin (t.e. matr. nr. 1401a, 1401b, 1470bs og 1470m) er, at matriklarnir vestan fyri Sundsvegin liggja atskildir frá stóra D1-økinum fram við Hoydalsá, og liggja tí sum eitt sjálvstøðugt og náttúrliga avmarkað D1-øki uppat C2-økinum við Norðurlandahúsið, Kringvarpshúsið og komandi musikskúlan, meðan matr. nr. 1401a, eystan fyri Sundsvegin, er beinleiðis og samanhangandi partur av stóra frílendinum fram við Hoydalsá.

Ognirnar vestan fyri Sundsvegin, matr. nr. 1457a hjá Oddmar Færø (2012-0231) og matr. nr. 1454a hjá Annu Mohr (2011-1565) eru í dag ábygdar í ein ávísan mun og liggja í einum náttúrliga avmarkaðum øki, sum av Sundsvegnum er avskorið frá restini av samanhangandi D1 øki fram við Hoydalsá.

Her metir umsitingin, at grundarlag er fyri at broyta almennu byggisamtyktina soleiðis, at økið kring verandi sethús á matr. nr. 1457a hjá Oddmar Færø (2012-0231), matr. nr. 1454a hjá Annu Mohr (2011-1565) og matr. nr. 1453b hjá Jákup Garðshorn Mikkelsen kann broytast til A1-øki. Somuleiðis verður mett, at tann lítli parturin av matr. nr. 1458c hjá Ingu og Sámal Jákup Joensen, sum er D1-øki, kann broytast til A3, eins og restin av hesum matriklinum. Tó soleiðis, at fyri allar hesar matriklar er galdandi, at økið verður tillagað móti Sundsvegnum, samsvarandi uppskoti til dagføring av Sundsvegnum, sum tekniska nevnd, byggi- og býarskipanarnevndin, fíggjarnevndin og býráðið skulu taka støðu til í næstum.

Restina av ognini matr. nr. 1454a hjá Annu Mohr (2011-1565), verður mælt til at broyta til C2-øki, sum gevur møguleika fyri framhaldandi bygging til ymisk mentunarlig endamál í økinum, og fyri at fáa eina varandi og framtíðartryggjaða loysn á atkomu- og parkeringsviðurskiftunum til verandi og komandi mentunarstovnar í økinum.

Samstundis verður mælt til, í serstakari byggisamtykt, at gera neyvari ásetingar um m.a. skipaða inn- og útkoyring móti Sundsvegnum og Norðara Ringvegi frá bæði verandi sethúsum og mentunarbygningum í økinum, soleiðis at ferðslan til og frá hesum økinum ikki kemur at darva framtíðar høvuðsferðslu á Sundsvegnum og Norðara Ringvegi.

Í sambandi við útbyggingarætlanirnar av Kringvarpshúsinum, keypti KVF í 2006 góðar 3000 $m^2$ av skógfriðaðum lendi av matr. 1457a, at leggja saman við 1452c. Í hesum sambandi gjørdi KVF avtalu við Skógfriðingarnevndina um bygging her við ávísum treytum. Fyriliggjandi útbyggingarætlan hjá KVF tekur hædd fyri nevndu avtalu, og er ætlan teirra ikki at byggja inni á skógfriðaða økinum. Umsitingin mælir tí frá at broyta ásetingarnar fyri tann partin av matr. nr. 1452c, sum er skógfriðað øki, og at hesin parturin av matr. nr. 1452c tí framhaldandi verður frílendi D1-øki.

Ognin hjá P/F Búrøkt (2011-1404) matr. nr. 1401a, liggur uppat samanhangandi D1 økinum fram við Hoydalsá, og ein stórur partur liggur harumframt innan fyri tí av friðingarmyndugleikunum ásettu friðingarlinjuna og innanfyri serstøku byggisamtyktina fyri Hoydalsá. Eigarin hevur søkt um loyvi at fremja tætta bústaðarbygging her.

Umsitingin metir, at hetta økið ikki kann metast sum eitt serstakt og náttúrliga avmarkað økið á sama hátt sum økið vestan fyri Sundsvegin, men at tað tvørturímóti er ein samanhangandi partur av stóra D1-økinum líka frá Boðanesgjógv niðan í Villingadal. Hetta stóra náttúruøki er náttúrliga avmarkað av Norðara Ringvegi móti suðuri, av Sundsvegnum og verandi byggingum móti vestri, av Skræddaragøtu og verandi byggingum móti norðuri, og av Flatavegnum móti vestri og verandi byggingum móti vestri, á ovasta partinum av økinum.

Umsitingin metir, at tað er í andsøgn við ætlanina um eitt slíkt stórt, samanhangandi náttúruøki, sum býráðið í 1972 tók avgerð um, og sum býráðið í 1995 gjørdi serstaka byggisamtykt fyri, um núverandi býráð fer at taka burturav hesum stóra og náttúrliga avmarkaða fríøkinum, at gera um til byggiøki. Hetta vil somuleiðis verða í andsøgn við tí avtalu, sum kommunan gjørdi við Innlendismálaráðið í 2009, um at tær ognir, sum landið eigur í hesum økinum, verða partur av Føroya størstu frílendisætlan. Býráðið hevur eisini í 2012 bæði keypt onkra privata ogn í náttúruøkinum fram við Hoydalsá, og gjørt eina makaskiftisavtalu við landið í sambandi við økið til Skúladepilin í Marknagili, har kommunan fær fleiri landsognir í hesum stóra fríøkinum fram við Hoydalsá, júst við tí fyri eyga, at skapa karmarnar fyri at fáa eitt stórt samanhangandi náttúruøki.

Eisini metir umsitingin, at um tað fyrst verður givið loyvi til at broyta einstakar matriklar inni í hesum náttúrliga avmarkaða økinum til byggiøki, hevur býráðið ikki grundarlag fyri at nokta øðrum slíkum umsóknum í framtíðini, og er tí stórur vandi fyri, at ætlanin frá 1972 við hesum stóra og serliga náttúruøkinum fer fyri skeyti.

Umsitingin mælir tí frá at ganga umsóknini frá eigaranum av matr. nr. 1401a á møti, um at broyta økið til A3-øki, men at økið framhaldandi verður verandi partur av náttúrliga avmarkaða D1-økinum.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin mælir til:

1. at byggisamtyktin fyri ognirnar vestan fyri Sundsvegin, matr. nr. 1453b og 1457a verður broytt til A1-øki og fyri matr. nr. 1454a verður broytt partvís til A1 og partvís til C2-øki, sí kort.
2. at parturin av matr. nr. 1458c vestan fyri Sundsvegin, sum er D1-økið, verður broytt til A3-øki, eins og restin av matriklinum, og verður fevnt av verandi serstøku byggisamtykt fyri 1458a, 1458b og 1458c.
3. at byggisamtyktin fyri skógfriðaða partin av matr. nr. 1452c ikki verður broytt.
4. at byggisamtyktin ognirnar eystan fyri Sundsvegin, matr. nr. 1401a og 1401b, ikki verður broytt.
5. at gjørd verður ein serstøk byggisamtykt fyri økið vestan fyri Sundsvegin (t.e. matr. nr. 1409, 1410d, 1452c, 1453a, 1453b, 1453c, 1454a, 1454d og 1457a), tá útbyggingarætlanin hjá Kringvarpinum og musikkskúlin hjá kommununi, eins og linjuføring fyri dagføring av Sundsvegnum, eru komin í eina fasta legu, við atliti til m.a. framtíðartrygging av atkomuviðurskiftum og økisparkering v.m. sambært omanfyri standandi viðmerkingum frá umsitingini.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 3. september 2012:** Ein meiriluti: Levi Mørk, Jan Christiansen, Elin Lindenskov og Bogi Andreasen samtyktu at taka undir við 1, 2, 3 og 5 og beina málið í býráðið.

Eisini samtykti meirilutin at biðja um at umsitingin ger yvirlitskort yvir ognarviðurskiftini og friðingarlinjur í økinum at leggja fyri nevndina aftur á næsta fundi.

Ein minniluti: Jákup Símun Simonsen tekur undir við tilmælinum.

**Tekniska nevnd 4. september 2012:** Kunnað varð um málið.

**Býráðið 13. september 2012:** Einmælt samtykt at taka undir við punkt 1, 2, 3 og 5.

**Ískoyti**
Umsitingin leggur fram yvirlitskort sambært samtykt frá 3. september 2012.

**Tilmæli**
Tekniski stjórin vísir til tilmælið til fundin 3. september 2012, pkt. 4.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 8. oktober 2012:** Ein meiriluti: Levi Mørk, Bogi Andreasen og Jan Christiansen mælir til at matr. nr 1401a og 1401b frá friðingarlinjuni til Sundsvegin verður broytt til A1.

Ein minniluti: Elin Lindenskov og Jákup Símun Simonsen taka undir við tilmælinum.

Ein samd nevnd beinir málið í býráðið.

**Býráðið 1. november 2012:** Atkvøtt varð um meirilutatilmælið frá byggi- og býarskipanarnevndini, ið varð samtykt við 9 atkvøðum fyri og einari ímóti..

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Bogi Andreasen, Jógvan Arge, Levi Mørk, Maria Hammer Olsen, Annfinn Brekkstein, Inga Dahl, Jan Christiansen og Sjúrður Olsen.

Ímóti atkvøddi: Marin Katrina Frýdal

Greiddu ikki atkvøðu: Halla Samuelsen, Jákup Símun Simonsen og Elin Lindenskov.

**259/12** **2011-1404 KF**

**Umsókn frá P/F Búrøkt v/Kristian á Neystabø, um byggiloyvi til blandaða íbúðarbygging á matr. nr. 1401a, við Sundsvegin**

**Lýsing av málinum - samandráttur:**
Umsókn er komin frá P/F Búrøkt v/Kristian á Neystabø, dagfest 25. mai 2011, um byggiloyvi til blandaða íbúðarbygging á matr. nr. 1401a, við Sundsvegin.

Umsøkjarin hevur fingið svarskriv frá kommununi, dagfest 07. juli 2011, har sagt verður, at umsóknin ikki verður gingin á møti, tí at umsóknin ikki er í samsvari við ásetingarnar fyri økið.

Matr. nr. 1401a liggur ikki í byggiøki sambært almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu og serstøku byggisamtyktina fyri økið.

Av tí at økið ikki er útlagt til bygging, hevur umsitingin ikki viðgjørt málið til nevndarviðgerð, men givið noktandi svarð.

Við skrivi, dagfest 1. desember 2011, heitir umsøkjarin á byggi- og býarskipanarnevnd Tórshavnar býráðs um at broyta byggisamtyktina fyri økið á Sundsvegi 10, matr. nr. 1401A soleiðis, at byggiloyvi kann gevast til blandaða bústaðarbygging á økinum.

**Lógir, ásetingar o.a.:**
Í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu, liggur matr. nr. 1401a í umráðispartinum D1 í 3. grundumráði, har ásetingarnar eru:

*Umráðispartarnir D1 verða í síni heild lagdir til almenning, náttúrufriðingar-og mentunarlig endamál og tílíkt. Økið fram við Hoydalsá kann einans verða skipað og bygt sambært serstaka byggisamtykt fyri økið.*

Í serstøku byggisamtyktini fyri økið fram við Hoydalsá, liggur partur av matr. nr. 1401a (uml. 1/3) í umráðispartinum “traðir og velt lendi”, har ásetingarnar eru:

*Grein 5: Lendi veður kannað traðabrúki og veltum lutum í høvuðsheitinum so sum sýnt áviðfestu serkortunum.*
*Grein 8a: Á økinum skal ikki verða bygt.*

Sambært almennu byggisamtyktini §9 og serstøku byggisamtyktini grein 11, kann byggimyndugleikin geva smávegis frávik frá reglunum. Mett verður ikki at umsóknin liggur innanfyri hesa heimild.

**Upplýsingar frá umsitingini:**
Matr. nr. 1401a er 13.453 m² til víddar
Ætlanin er at byggja tilsamans 64 íbúðir

44 íbúðir á uml. 65 m², 12 íbúðir á uml. 85 m² og 8 íbúðir á uml. 45 m².
33 av íbúðunum kunnu brúkast av rørslutarnaðum.

Á ognini standa eini hús, umframt ein minni bygningur og eini summarhús sum umsøkjarin hevur víðkað munandi uttan byggiloyvi.

Málið um ólógliga bygda summarhúsið hevur fingið drúgva viðgerð av kommununi, Føroya Kærustovni og rættinum.

Málið byrjaði 8. mai 2002, tá ið Kristjan á Neystabø vegna P/F Búrøkt fekk skrivlig boð frá byggideild kommununar, um at steðga bygging av summarhúsið á matr. nr. 1401a Tórshavn, tí bygt varð uttan byggiloyvi. Hóast hetta bygdi Kristjan munandi víðari upp á summarhúsið, til hann varð steðgaður við fútabanni.

Fylgjandi 14 formligu viðgerðirnar hava verið:
- 3 skrivligar áheitanir frá kommununi, um at fáa borgaran at taka ólógligt bygdu summarhúsini niður
- Fútabann móti framhaldandi bygging
- Dómur frá Føroya rætti, har kommunan fekk viðhald í at summarhúsið skal rívast niður – borgarin valdi sjálvur ikki at kæra dómin til landsrættin,
- 3 byggiumsóknir til umsitingina, sum hvørja ferð hevur noktað vegna væntandi heimild
- 2 ferðir noktandi svar frá byggi- og býarskipanarnevndini upp á fráviksumbøn vegna væntandi heimild
- 2 kærur til Kærunevndina í Lendismálum, sum hvørgan varð tikin til eftirtektar
- 1 kæra til Kærunevndina í Lendismálum, ið varð avvíst
- 1 úrskurður frá fútarættinum um at summarhúsið nú skal rívast niður. Niðurstøðan í úrskurðinum frá 19. mai 2010 var hendan: "*Sagen fremmes således, at Pf Búrøkt skal opfylde konklusionen i dom af 31. oktober 2006 og nedrive det, der er bygget ulovligt på matr. nr. 1401a Tórshavn*."

Henda avgerð frá fútarættinum varð kærd til Eystara Landsrætt, ið er <u>síðsta hugsandi løgfrøðiliga viðgerð av málinum</u>.

Dómsviðgerðin verður í Eystara landsrætti 13. mars 2012, og snýr seg bert um støðutakan til omanfyrinevnda úrskurð frá Fútarættinum um niðurtøku av ólógligt bygda summarhúsinum á matr. nr. 1401a Tórshavn.

Kommunan hevur goldið rokningar til okkara advokat upp á kr. 314.000 + mvg og mett verður at tað koma rokningar afturat upp á kr. 50-70.000 + mvg. Tilsamans uml. kr. 375.000 + mvg.
Harumfram hevur kommunan brúkt heilt nógva tíð og orku upp á hetta mál.

**Frávik:**
Umsóknin inniber m.a. fylgjandi frávik:

**1)** Ætlanin er ikki í samsvari við ásetingarnar í Almennu byggisamtyktini, har matr. nr. 1401a liggur í umráðispartinum D1 í 3. grundumráði.

**2)** Ætlanin er ikki í samsvari við serstøku byggisamtyktina fyri økið fram við Hoydalsá. Uml. 1/3 av matr. nr. 1401a í umráðispartinum "traðir og velt lendi".

**Umhvørvisárin:**
Verður viðgjørt eftir umhvørvisflokki 1.

**Fíggjarligt:**
Kann hava stóran týdning fyri sakarmálið um ólógliga bygda summarhúsið, sum væntandi verður endaliga viðgjørt í Eystara landsrætti 13. mars 2012.

**Viðmerkingar frá øðrum deildum:**
Er ikki viðgjørt av øðrum deildum.
Skal m.a. viðgerast av plandeildini, teknisku deild og heilsu- og umhvørvisdeildini.

**Viðmerkingar frá øðrum myndugleikum:**
Málið er ikki sent øðrum myndugleikum til viðgerðar, men roknast skal við, at málið skal viðgerðast av øðrum myndugleikum.

**Skjøl:**
Umsókn og tekningar, j.nr. 2011-1404/1 og -3
Notat frá Jens Wang adv., j.nr. 2011-1404/6

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla nevndini til at avvísa málið og boðað umsøkjaranum frá, at málið kann verða tikið upp aftur eftir at sakarmálið um ólógliga bygda summarhúsið er avgreitt av Eystara landsrætti.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 13. februar 2012:** Málið tikið av skrá.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til, at nevndin tekur prinsipiella støðu til um byggisamtyktin fyri økið skal broytast fyri økið. Víst verður í hesum sambandi eisini til mál nr. 2012-0881.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 11. apríl 2012:** Ein meiriluti Levi Mørk, Jan Christiansen og Vagnur Johannesen samtyktu at umsitingin ger uppskot til broytingar av byggisamtyktini fyri D1 økið fram við Sundsvegnum niðan til Birnugøtu.

Ein minniluti Halla Samuelsen og Jákup Símun Simonsen taka støðu á seinni fundi.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 26. juni 2012:** Nevndin samtykti, at uppskot til broytingar av byggisamtyktini fyri D1 økið fram við Sundsvegnum niðan til Birnugøtu, verður at leggja fyri nevndina í august 2012.

Elin Lindenskov og Jákup Símun Simonsen vilja tryggja, at atlit verður tikið til breiðkan av Sundsvegnum, fjarhitaleiðingum og øðrum.

Levi Mørk og Jan Christiansen átala harliga, at umsitingin ikki hevur gjørt uppskot til broytan av byggisamtyktini, soleiðis sum samtykt varð í byggi- og býarskipanarnevndini 11. apríl 2012.

**Ískoyti:**
Býarskipanarliga viðgerðin av umsóknini er viðgjørd sum partur av eini heildarviðgerð av økinum í mál nr. 2012-1900, og verður víst til málslýsing og tilmælið í nevnda málið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 3. september 2012:** Ùtsett til næsta fund.

**Ískoyti**
Víst verður til ískoyti og tilmælið til fundin 8. okt. 2012 í j. nr. 2012-1900

**Byggi- og býarskipanarnevndin 8. oktober 2012:** Víst verður til samtykt í j. nr. 2012-1900.

**Býráðið 1. november 2012:** Tikið av skrá.

**260/12** **<u>2012-2253 KF</u>**

**<u>Víðkan av 1. gr. í ovara enda av Niels Finsens gøtu niðan til matr. nr. 341 “Færøernes Realkreditinstitut”</u>**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Tann parturin av Niels Finsens gøtu sum gongur frá Steinatúni niðan til “Færøernes Realkreditinstitut”, sum er eitt framhald av handilsgøtuni, er ein vælvirkandi gøta við lutfalsliga nógvum handlum. Seinnu árini eru fleiri bygningar á hesum vegastrekkinum útbygdir t.d. AUTO og Norðoyar Sparikassi og onkur við undantaksloyvi í mun til vídd og hædd ímeðan aðrir hava fingið noktandi svar upp á undantaksloyvi.

Í almennu byggisamtyktini gongur 1. gr. bert niðan til Kongagøtu og restin av hesum vegastrekkinum liggur í 2. Gr.

| Ásetingar fyri 1. gr. | Ásetingar fyri 2. gr. |
|---|---|
| Byggistig 0,6 | Byggistig 0,5 |
| Nettonýtslustig 1,0 | Nettonýtslustig 0,5 |
| Hædd til yvirgrind 10 m | Hædd til yvirgrind 7 m |
| Hædd til mønu 13 m | Hædd til mønu 10 m |

Umsitingin metir at hesin parturin av miðbýnum átti at fingið loyvi til at ment seg enn meira sum handilsgøta, við at loyva meira bygging her.

Skotið verður upp, at víðka 1. gr. fram við Niels Finsens gøtu frá Kongagøtu niðan til matr. nr. 341 "Færøernes Realkreditinstitut".

Tær ognirnar sum verða ávirkaðar av hesi broyting eru matr. nr. 341, 343, 345, 347, 350, 392b, 392a, 393b, 393a og 394, Tórshavn.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin mælir til at broyta almennu byggisamtyktina soleiðis, at 1. gr. verður víðkað fram við Niels Finsens gøtu, niðan til matr. nr. 341, Tórshavn sambært korti dagfest 27.09.2012.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 8. oktober 2012:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og at beina málið í býráðið.

**Býráðið 1. november 2012:** Einmælt samtykt.

**261/12** **<u>2012-0851 AMDO</u>**

**<u>Umsókn um byggiloyvi til nýggjan skrivstovubygning við Tinghúsvegin/ Bøkjarabrekku, matr. nr. 419, Tórshavn</u>**

**Lýsing av málinum - samandráttur:**
Umsókn er komin frá EM Ráðgeving ið søkir vegna Havnar Arbeiðsmannafelag, dagfest 21.05.2012, um byggiloyvi til nýggjan skrivstovubygning við Tinghúsvegin/Bøkjarabrekku, à matr. nr. 419.

Sum útgangsstøði er hetta prosjektið eitt víðari arbeiði út frá tí prosjekttilfari sum lá til grund fyri útbjóðingartilfarinum frá mai 2011 – J.nr. 2010-1335.

Nakrar broytingar verða gjørdar í mun til útbjóðingartilfarið, eftir ynski frá byggiharra, meðan nakrar av broytingunum verða gjørdar við atliti til byggihátt og brunaviðurskifti v.m..

Generellu broytingarnar verða sum niðanfyri lýst í punktum:
a) Berandi bygningslutir, sum vóru úr stáli verða broyttir til betongkonstruktiónir.
b) Betongdekkið í Ebenezer-garðinum verður tikið burtur, men verða svalarnir á vestursíðuni verandi.
c) Mekanisk ventilatión verður eisini gjørd í hornabygninginum, saman við ventilatiónini í nýggja bygninginum.
d) Ætlanin er, at elevatorskaktin skal brúkast sum føringsvegur til ventilatiónina.
e) Vesini á 3, 4 og 5 hædd, verða broytt soleiðis, at eitt av tveimum vesum lúka krøvini til vesir til rørslutarnað.
f) Verandi rýmingarleiðir í hornabygninginum, t.v.s. svalar og trappur v.m., verða ikki broytt ella bygd saman við rýmingarleiðum í nýggja bygninginum.
g) Trapputornið uttanfyri bygningin, verður flutt longur yvir móti Bøkjarabrekku, og snarað 90 gr.
h) Fundarhølið verður flutt yvir á nýggja bygningin.
i) Ventilatiónshús verður gjørt uppi á tekjuni, at húsa anlegginum til báðar bygningarnar.

Aðrar broytingar:

1. hædd, kjallarin
Kjallaraútveggurin móti Tinghúsvegnum, verður fluttur 2,5 m út, so at hesin hevur somu flukt sum útveggurin omanfyri.
Eisini verður kjallaraveggurin móti Bøkjarabrekku snaraður 90 gr. í mun til veggin móti Tinghúsvegnum.

2. hædd, í hornabygninginum (verandi bygningur)
Í hornabygninginum, har móttøkan er í dag, verða broytingar gjørdar, sí frágreiðing niðanfyri.

2. hædd, nýbygningur.
Felagsinngongdin hjá HAF og útleigarum verður endurskoðað, við atliti til at skapa betri pláss til vesir á 2 hædd.

5. hædd, hornabygningur (verandi bygningur)
Innrættingin av 5. hædd í hornabygninginum, verður broytt aftur til verandi innrætting. T.v.s. eingin broyting.

5. hædd, nýbygningur.
Fundarhølið verður hongt upp á trappuskaktina á vestursíðuni, og verður í hesum sambandi, onkur broyting gjørd av innrættingini á 5. hædd.

Verkætlanin umfatar, at taka verandi bygning á Tinghúsvegi nr. 7 og nr. 9 niður, og síðani at byggja nýggjan skrivstovubygning á sama stað í 5 hæddum (við

kjallara hæddini). Nýggi bygningurin skal byggjast saman við verandi bygningi á Tinghúsvegi nr. 5 (hornabygninginum).

Verandi hornabygningur verður ikki nervaður av verkætlanini, við undantaki av 2. hædd (veghæddini). Í sambandi við byggingina av nýggja skrivstovubygninginum, verður 2. hædd í verandi hornabygningi broytt soleiðis at:

- báðir bygningarnir fáa somu inngongd.
- móttøkan, ein skrivstova og te-køkurin hjá Landsverk verður flutt, til annað stað á somu hædd.
- 3. nýggjar skrivstovur og ein nýggjur te-køkur verða gjørd ístaðin.
- verandi elevator (allar hæddir) verður avmonteraður, og elevatorskaktin verður nýtt til føringsveg.

Nýggi bygningurin:
Nýggi bygningurin verður bygdur í 5. hæddum (við kjallarahæddini), á 258 m² gólvvídd hvør.

Nýggi bygningurin verður bygdur eftir reglum samsvarandi danska BR08 og eftir KBB-99.

Útveggirnir á 1. hædd (kjallarahæddini) verða stoyptir á staðnum, bjálvaðir og á framsíðu lagdir við pussi. Eisini er útveggurin móti Tinghúsvegnum á 2. hædd, stoyptur á staðnum, somuleiðis er eisini útveggurin móti Bøkjarabrekku staðstoyptur í fulla hædd. Hesir útveggir verða eisini bjálvaðir uttan, og lagdir við pussi. Framsíðurnar móti Tinghúsvegnum og inn móti Ebenezergarðinum annars, verða úr glas/alu fasadum.

Sí nærri konstruktiónslýsingar á tvørskurðum.
Berandi og stabiliserandi konstruktiónir verða í høvuðsheitum gjørdar úr betong, t.v.s. staðstoyptir betongveggir, pre. fab. betong súlur, betongbjálkar og betongholdekk. Sí nærri lýsing hesum viðv. í hjálagdu frágreiðing frá HMP verkfr.

Í sambandi við byggingina, verður m.a. gjørt nýtt felags reinsianlegg fyri Tinghúsveg nr. 5, nr. 7 og nr. 9. Eisini verður nýggjur oljutangi lagdur niður.

Sí nærri lýsing viðv. HVS og ventilatión í hjálagdu frágreiðing frá PB Consult verkfr..

Tað verður eisini gjørd mekanisk ventilatión til báðar bygningarnar. Í sambandi við hetta arbeiðið, verður nýtt ventilatiónsanlegg sett á takið á nýggja bygninginum.

Í sambandi við parkeringsviðurskifti, er byggiharri farin í samráð við Ebenezer, um at skipa felags parkeringsviðurskifti í Ebenezergarðinum.

Nýtslustigið: Vídd á matr. nr. 419 er 866 m² Mest loyvda nýtslustig er 3,0 samb. §4 stk. 2

Verandi bygningur uttan kjallara er 4 x 277 m² = 1.108 m²
Nýggi bygningurin uttan kjallara er 4 x 258 m² = 1.032 m²
Samlað nýtslustig: 1.108+ 1.032 / 866 = 2,47

**Byggipláss og skipan av ferðslu:**
Byggiplássið verður innrætta í Ebenezergarðinum (EBZ), við arbeiðs- og vesiskúrum, ruskbyngjum og tilfarsgoymslu v.m., umframt einum stationerum byggiplásskrana. Størri bygningskompunentar so sum betong elementir og súlur/bjálkar, vera ikki goymd á byggiplássinum, men koma á staði í samband við montering. Atkoman til byggiplássið verður frá Bøkjarabrekku, har verandi innkoyring til parkeringsplássið hjá EBZ, er í dag.

Byggiplássið verður í byggitíðini skilt frá alfaravegi, við arbeiðshegni og ella plátum, og vera skelti sett upp sum lýsa byggiplássið.

Í byggitíðini vanta vit, at vestara koyribreytin á Tinghúsvegnum verður stongd fyri ferðslu. Tó so, at tá útv. arbeiðið er liðugt, vanta vit ikki, at tað verður neyðugt at hava koyribreytina stongda longur. Vit ætla, at vestara koyribreytin á Tinghúsvegnum verður stongd fyri ferðslu, tá arbeiðið at taka verandi bygningi niður byrjar. Í samband við niðurtøkuna, verður eisini neyðugt, at steingja sunnaru gongubreytina, fram við bygninginum móti Bøkjarabrekku av, og vísa fótgangarum til norðaru gongubreytina.

Arbeiðið at taka verandi bygning niður, er í høvuðsheitum ætla, at vera gjørt frá EBZ. hettar fyri at nerva ferðslu og grannar sum minst. Tó so, at tað kann roknast við, at neyðugt verður, at gera okkurt arbeiðið frá t.d. Tinghúsvegnum.

Graviarbeiðið sum skal gerast móti Tinghúsvegnum og Bøkjarabrekku, verður gjørt í størstan mun frá EBZ. Móti Bøkjarabrekku verður bert grivið í gongubreytina, men verður neyðugt, at seta arbeiðsgirðingar upp uttast á sunnaru koyribreytinu, tó uttan at steingja Bøkjarabrekku. Móti Tinghúsvegnum, verður møguliga neyðugt at grava nakað inn í vestaru koyribreytina. Hetta grunda á leiðingar hjá Føroya Tele.

So hvørt bygningurin kemur upp um veghædd, vera arbeiðsstillasir sett um bygningin. Stillasið móti Bøkjarabrekku, verður gjørt soleiðis, at fótgangarar kunnu ganga undir stillasinum. Tó so, tá tungir bygningskompunentar so sum betongelementir v.m. verða monteraði, verður neyðugt at steingja gongubreytina av.

Sum nevnt omanfyri, vera betongelementir ikki goymd inni á byggiplassinum. Arbeiðstakari fer at hava ábyrgd fyri, at leggja so til rættis, at t.d. betongelementir vera goymd aðrastaðnis, á økið hjá arbeiðstakara ella aðrastaðnis. Í samband við

montagu av betongelementum, verður tørvur á størri mobilum krana, at lyfta betongelementini á pláss. Í hesum sambandi verður neyðugt at steingja Tinghúsvegin av fyri ferðslu, akførum og fótgangarum. Betongelementini vera tá koyrd til byggiplássið, til Tinghúsvegin, á vognum, og lyft upp á pláss av vogninum. T.v.s., at tá elementir vera monteraði, verður neyðugt at steingja Tinghúsvegin í um 1 dag í senn.

Tá ráðbygningur er reistur, alu- fasadur eru monteraðar og endin móti Bøkjarabrekku liðugt klæddur, verður ikki tørvur á stillasum, móti Bøkjarabrekku og Tinghúsvegnum, longur. Heldur ikki verður tørvur á vestaru koyribreytini av Tinghúsvegnum í samband við arbeiðið.

Eftir at bygningurin er liðugur uttan, verður arbeiðið skipa frá EBZ.

**Atkoma:**
Atkoman til bygningin útifrá, verður møgulig í tveimum støðum. Høvðusatkoman verður frá Tinghúsvegnum, meðan atkoma gjøgnum bakdyr verður frá parkeringsplássinum í EBZ. Báðar atkomur verða gjørdar, við atlitið til brúkarar við rørslitarni.

Sí tekning nr. 8.00, Innrættan av byggiplássi, dagf. 04.06.2012

**Í hesum sambandi verður søkt um at byggja við frávik.**
Søkt verður um undantaksloyvi at byggja eitt ventilatiónshús uppi á tekjuni, omaná 5. hædd. Ein partur, 1,5m – 2m, av ventilatiónshúsinum fer uppum horisontalu byggilinjuna ið er umleið 14 m, javnfjarð við lendið móti Tinghúsvegnum, ið er tað mest loyvda.

Í ásetingunum í serstøku byggisamtyktini fyri økið kann undantaksloyvi verða givið sambært, *§ 4. BYGGING, STØDD, STAÐSETING OG SNIÐ HÚSANNA, Stk. 3.* Hús mugu ikki verða bygd hægri enn ásett er í fylgiskjali 1, fyri hvørt einstakt byggifelt. Hægst loyvda byggihædd er ásett við kotum eftir markalinjuni, ið avmarkar økið ið byggisamtyktin fevnir um. Eingin partur av húsinum, yvirgrind ella møn o.s.f.v mugu koma upp um stiplaðu linjuna. Undantaksloyvi kann tó verða givið fyri elevatorhúsum, ventilatiónshúsum ella øðrum lágum, løttum og smærri bygningum, ið fella natúrligt inn í skapi á húsinum og sum byggimynduleikin metir ikki sjónligt økir um húsahæddina.

**Lógir, ásetingar o.a.:**
Økið liggur í serstøku byggisamtyktini fyri økið innanfyri Bøkjarabrekku, Tinghúsveg, Sverrisgøtu og Niels Finsens gøtu í 1. grundumráði í almennu samtyktini fyri Tórshavnar kommunu.

**Upplýsingar frá umsitinginí:**
Á matr. nr. 419 (fyrrverandi matr. nr. 414e, 414b) er ábygt skrivstovubygningur hjá Havnar Arbeiðsmannafelag, ið skal takast niður, og nýggjur byggjast ístaðin.

Á matr. nr 419 er ábygt skrivstovubygningur hjá Landsverk
Byggistig: Ongin áseting er í serstøku byggisamtyktini um byggistig, men loyvt er at byggja út í mark.
Nettonýtslustigið verður 2,47. Mest loyvda er 3,0.
Hædd til mønu á ventilatiónshúsinum verður umleið 15.5 m – 16 m. Mest loyvda er umleið 14 m.

Umsóknin um frávik er send til grannahoyring og freistin hjá grannunum at svara er sett til 8. juni 2012.

**Umhvørvisárin:**
Er viðgjørt eftir umhvørvisstigi 1

**Fíggjarligt:**
Ongar bindingar fyri kommununa.

**Skjøl:**
Umsókn til frávik, j.nr. 2012-0851/7
Chekklisti, j.nr. 2012-0851/11
Fráviksskjal, j.nr. 2012-0851/12
Støðumyndir, bentley.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at umsóknin verður gingin á møti vísandi til omanfyri nevndu frágreiðing.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 11. juni 2012:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
**Byggipláss og tíðarskeið fyri skipan av ferðslu.**
Prosjektið er eitt víðari arbeiði út frá tí prosjekttilfari sum lá til grund fyri útbjóðingartilfarinum frá mai 2011 – j.nr. 2010-1335. (sí: lýsing av málinum – samandráttur**).**

Í omanfyri nevnda útbjóðingartilfarinum frá mai 2011 var ætlanin at arbeiða frá garðinum frammanfyri Losjuni. Í nýggju umsóknini verður arbeiðið gjørt frá garðinum hjá Ebenezer, og tí eru fortreytirnar broyttar.

Býráðið tók 14.04.2011 avgerð um at nokta fyri at sperra Tinghúsvegin, men at seta umsøkjarunum sum treyt, at tunnil/brúgv verður at seta upp og at koyribreyt og gongubreyt verða gjørd, ovast á vegnum, á eystaru síðu á Tinghúsvegnum.

Hesaferð verður søkt um loyvi til partvís at sperra Tinghúsvegin, t.v.s. at sperra ovasta partin av Tinghúsvegnum gerandisdagar (uttan fríggjadag) eftir kl. 18 til midnátt ella so leingi sum montasjuarbeiðið varar. Loyvi skal fevna um

tíðarskeiðið februar til juli (eina viku áðrenn Ólavsøku 2013). Hetta treytað av góðkenning frá býráðnum.

**Tilmæli:**
Vísandi til avgerð býráðsins í j.nr. 2010-1335, og broyttu fortreytirnar sambært omanfyri standandi lýsing, mæla tekniski stjórin og leiðarin fyri byggideildina til at beina málið í býráðið um teknisku nevnd, til støðutakan til umsóknina um tíðaravmarkaða steinging av Tinghúsvegnum.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 8. oktober 2012:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um teknisku nevnd.

**Tilmæli:**
Vísandi til avgerð býráðsins í j.nr. 2010-1335, og broyttu fortreytirnar sambært omanfyri standandi lýsing, mæla tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin til at loyva umsøkjaranum at sperra ovasta part av Tinghúsvegnum mánadag til hósdag millum kl. 18.00 og 24.00 í tíðarskeiðnum febr. til hálvan juli 2013, og at beina málið í býráðið.

**Tekniska nevnd 11. oktober 2012:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum og beinir málið í býráðið.

Maria Hammer Olsen var ikki við til hetta málið.

**Býráðið 1. november 2012:** Einmælt samtykt.

- Nú fór Bogi Andreasen

**262/12** **<u>2012-1614 Løg/HH</u>**

**Mayfinn Norðoy og Oddvør Poulsen, søkja um at keypa matr. nr. 911h, Tórshavn. Stødd 31 m**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Yvirlit yvir ognirnar.

| Matr. nr. | stødd.m². | Eigari. |
|---|---|---|
| 912i | 1.200 | Mayfinn Norðoy og Oddvør Poulsen. |

| | | |
|---|---|---|
| 911h | 31 | Tórshavnar kommuna |
| 911l | 444 | Hilda Frýdal o.f.l. |

Innkoyringin til ognina hjá Mayfinn og Oddvør er smøl.

Tey hava tosað við eigararnar av ognini matr. nr. 911l, um at makaskifta, soleiðis at innkoyringin til matr. .nr. 912i, kann breiðkast.

Millum ognirnar liggur matr. nr. 911h, sum er ogn hjá kommununi.

Ætlanin er fyrst at keypa matr. nr. 911h, sum verður lagt saman við matr. nr. 912i, Tórshavn.

Tá ið samanleggingin er avgreidd, er ætlanin at makaskifta millum grannarnar.

**Tilmæli:**
Leiðarin á starvsfólka- og løgdeildini og miðfyrisitingarstjórin, mæla til at beina málið í byggi- og býarskipanarnevndina.

**Fíggjarnevndin 12. september 2012:** Samtykt at beina málið í byggi- og býarskipanarnevndina.

**Ískoyti:**
Økið søkt verður um at keypa, liggur sum ein sjálvstøðugur lutur mitt ímillum fleiri grundøkir. Eigarin av matr 911i hevur hildið seg eiga matr. nr. 911h eisini, og er ikki fyrrenn nú, ið ætlanin er at marknaumskipa blivin varugur við, at Tórshavnar kommuna stendur til at eiga 911h sum er umleið 31 fermetrar.

**Tilmæli**
Tekniski stjórin og leiðarin fyri byggideildina mæla til at kommunan selur matr. 911h sum er umleið 31 fermetrar, vísandi til at økið liggur sum ein sjálvstøðugur lutur millum nøkur grundøkir, og ikki skal nýtast til nakað av kommununi, og at beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 8. oktober 2012:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti.**
Vísandi til at økið er minni enn 300 m², er ikki neyðugt at søkja um loyvi frá Innlendismálaráðnum, men skal kommunan tryggja at økið verður selt fyri marknaðarprís.

Trupult er at áseta marknaðarvirði, tí at stykkið hevur einans atkomu gjøgum grannaognirnar.

Mett verður at fermeturprísurin eigur at vera um kr. 400,00.

**Tilmæli.**
Leiðarin á starvs- og løgdeildini og miðfyrisitingarstjórin mæla til at selja økið á umleið 31 fermetrar fyri kr. 400,00 fermeturin.

Sølan verður avgreidd við marknaðarumskipan og verður í fyrsta umfari løgd saman við matr. nr. 912i.

Keyparin rindar allar útreiðslur viðvíkjandi marknaðarumskipanini.

**Fíggjarnevndin 24. oktober 2012:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við tilmælinum.

**Býráðið 1. november 2012:** Einmælt samtykt.

**263/12** **2002-1781 HH**

**Umsókn frá Ester og Torkil Skála um sundurbýti av matr. nr. 804n, Dalavegur, Tórshavn**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Tey meta, at matr. nr. 804 n, Tórshavn, er í meira lagi og kunnu tískil hugsað sær at býtt tað sundur.

Núverandi matr. nr. 804 n, Tórshavn, verður minkað til umleið 775 m², og eitt nýtt matr. nr. verður upprættað til umleið 534 m².

Tinglýstur servituttur er á matr. nr. 804 n, um at innkoyringin er frá Pedda við Stein gøtu.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin mælir til at ganga umsóknini á møti treytað av, at felags innkoyring verður til báðar ognirnar, og at parkeringsplássið verður skipað soleiðis, at tað slepst undan at bakka út á Dalavegin, og at hetta verður tinglýst á ognirnar.

Eisini verður mælt til, at verandi deklaratiónin um innkoyring frá Pedda við Stein gøtu verður avlýst.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 4. september 2002:** Samtykt at taka undir við tilmælinum frá tekniska stjóranum.

**Ískoyti:**
Søkt verður um, at ein servituttur verður avlýstur, sum er lýstur á matr. 804h at innkoyring skal verða frá Pedda við Stein gøtu.

Torkil Skála og Esther Skála eiga matr. 804h Dalavegur Tórshavn, tey hava søkt um at sundurbýta matr. 804h og umsóknin er gingin á møti í byggi- og býarskipanarnevndini 4. september 2002, men málið er ongantíð avgreitt.

Samtykt er, at felags innkoyring skal verða til bæði stykkini frá Dalavegnum og at hetta verður tinglýst á bæði stykkini.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til, at nevndin heldur fast við samtyktina frá 4. september 2002, soleiðis at felags innkoyring verður til báðar ognirnar og at parkeringsplássið verður skipað soleiðis, at tað slepst undan at bakka út á Dalavegin, at hetta verður tinglýst á ognirnar, og at verandi deklaratiónin um innkoyring frá Pedda við Stein gøtu verður avlýst. Mælt verður eisini til at beina málið í teknisku nevnd og býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 30. august 2010:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og leiðarin á plan- og rakstrardeildini mæla til, at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini 30. august 2010.

**Tekniska nevnd 23. september 2010**: Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

**Býráðið 21. oktober 2010:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti :**
Eigarin av matr. nr. 804n, Ester Skála, hevur sent kommununi umsókn um sundurbýti av ognini. Málið er samtykt í Býráðnum, men hevur Umhvørvisstovan noktað sundurbýtið.

Umhvørvisstovan vísir til at matrikuleru viðurskiftini á Dalavegnum, litra ap, eru ikki greið har á staðnum, og er tað torført at finna eina góða og holla loysn á atkomuviðurskiftunum til eigindómarnar eystarumegin vegin, og at avgreiða fyrliggjandi sundurbýtisumsókn á skilagóðan hátt.

Partur av vegnum, liggur inni á matr. nr. 804a, og er atkoman til matr. nr. 804n, gjøgnum part av matr. nr. 804a.

Tórshavnar kommuna hevur heitt Íbúðargrunnin um at handa kommununi, umleið 355 fermetrar burturav matr. nr. 804a, Tórshavn.

Tað kann viðmerkjast at kommunan vanliga ikki rindar fyri keyp av tílíkum slag, men yvirtekur kommunan allar viðlíkahaldskyldur av vegnum og gongubreytini.

Íbúðargrunnurin hevur játtað og undirskrivað marknaumskipan við Tórshavnar kommunu.

**Fíggjarlig viðurskifti:**
Marknaumskipanin er mett at kosta uml. kr. 4000,00, sum Tórshavnar kommuna eigur at gjalda.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og leiðarin á byggideildini vidmæla marknaumskipanina millum Tórshavnar kommunu og Íbúðargrunnin at marknaumskipa 355 fermetrar av 804a til litra ap Dalavegur og beina málið til fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 8. oktober 2012:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og at beina málið í fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 24. oktober 2012:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við tilmælinum.

**Býráðið 1. november 2012:** Einmælt samtykt.

**264/12** **<u>2012-2318</u>**

**<u>Framflytingar 2011 á grein 2</u>**

Til tess at rætta upp ymsar meirnýtslur frá 2011 á kontum á grein 2, og sum eisini hava ávirkan á fíggjarstøðuna fyri 2012, er uppskot at gera nakrar innanhýsis framflytingar av meir- og minninýtslum á grein 2.

Á kontu 2613 Børn sett heiman í fosturfamilju var meirnýtslan í 2011 kr. 926.000, sum í stóran mun er orsakað av, at fleiri børn eru sett heiman. Nøkur av hesum børnum áttu av røttum at verið á samdøgurstovni, men av tí at landið ikki hevur nokk av stovnsplássum, hevur tað verið neyðugt við fosturfamilju, sum fyri kommununa er ein meiri kostnaðarmikil loysn. Hetta sæst eisini aftur á kontu 2617 Brúkaragjøld, serstovnar, har minninýtslan hevur verið kr. 609.000.

Á kontu 2614 Familjustovan var meirnýtslan í 2011 kr. 195.000. Játtanin hevur verið ov lítil í mun til normeringina. Fyri 2012 er játtanin samsvarandi tørvinum og eigur tí at halda.

Á kontu 2742 Dagtilhaldið í Nólsoy var meirnýtslan í 2011 kr. 36.000. Av hesum eru kr. 24.000 framflutt hall frá 2010. Á dagtilhaldinum er eitt starvsfólk hálva tíð. Játtanin hevur ikki verið í nóg góðum samsvari við virksemið. Fyri 2012 er játtanin samsvarandi tørvinum og eigur tí at halda.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og sosialdeildarleiðarin mæla til, at meirnýtslan í 2011 á kontu 2613, kontu 2614 og kontu 2742 verður fíggjað av framfluttu minninýtsluni í 2011 á kontu 2612, kontu 2617, kontu 2615, kontu 2745 og kontu 2716, soleiðis at:

| Konta | Heitið | Verður hækkað | Verður lækkað |
|---|---|---|---|
| 2613 | Børn sett heiman í fosturfamilju | 926.000 kr. | |
| 2614 | Familjustovan | 195.000 kr. | |
| 2742 | Dagtilhaldið í Nólsoy | 36.000 kr. | |
| 2612 | Barnavernd | | 300.000 kr. |
| 2617 | Brúkaragjald, serstovnar | | 600.000 kr. |
| 2615 | Pedagogisk fríplláss | | 120.000 kr. |
| 2745 | Døgurðaskipan | | 62.000 kr. |
| 2716 | Gjald fyri pláss í øðrum kommunum | | 75.000 kr. |
| **Í alt** | | **1.157.000 kr.** | **1.157.000 kr.** |

**Sosiala nevnd 9. oktober 2012:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 24. oktober 2012:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við sosialu nevnd.

**Býráðið 1. november 2012:** Einmælt samtykt.

**265/12** **2002-0627**

**Sjálvsognarstovnurin Vardar íbúðir**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Sjálvsognarstovnurin Vardar íbúðir heitir í skrivi, j. nr. 200200627-1, á kommununa um, at fyrireikingar verða gjørdar til eina útstykking við vardum íbúðum á Boðaneshamri.

Umsitingin hevur fyrr arbeitt við at skipa økið og hevur tá umhugsað at lagt eina slíka útstykking har.

Sigast skal tó eisini, at ikki hevur verið gjørt meira við málið. Tekningin sum verður víst til í umsóknini er gjørd á byggideildini, men er ikki annað enn eitt skipanaruppskot, har ongar kanningar viðvíkjandi bindingum, tekniskar leiðingar o.a. eru gjørdar.

Hetta má alt gerast, áðrenn endaliga kann sigast, um hetta er gongd leið.

Økið liggur í A1 í almennu byggisamtyktini - lág bústaðarbygging.
Er eisini í serstøku byggisamtykt nr. 7 undir eind A2.

**Eindirnar A. - Stakhúsabygging**
Ognirnar norðanfyri og eystanfyri puntastrikuna p-q á fylgiskjali nr. 1, koma undir leiðbeinandi byggiskipan.

Á ognunum, har ikki er álagt byggiskipan, er galdandi:

Byggistigið má ikki fara upp um 0,25.

Hús mugu í mesta lagi verða bygd í einari hædd við kjallara og nýttum lofti.

Hæddir til yvirsyll frá ávíkavist hægsta og lægsta jørðildi móti húsagrundini mugu ikki verða hægri, enn at báðar tær nevndu hæddirnar samanlagdar verða í mesta lagi 8,0 m.

Húsini skulu hava vanliga reising við skjøldrum. Reisingin skal vera millum 15°-45° reyst.

Á hvørjari ogn skal avleggjast øki til í minsta lagið 2 bilpláss.

Hetta merkir, at einhvør bygging á økinum, má skipast eftir einum leisti, har bygt verða stakbygningar, líknandi stakhúsabygging.

Hjálagt er kort, ið lýsir skipanarætlanina, j. nr. 200200627-2.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til, at nevndin tekur undir við, at øki kann leggjast av, og at nevndin beinir málið í sosialu nevnd at taka støðu til, um ein verkætlan skal gerast á økinum.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 22. mars 2004:** Samtykt at taka undir við tilmælinum frá tekniska stjóranum og býararkitektinum og at beina málið í sosialu nevnd.

**Tilmæli:**
Vísandi til umsóknina frá sjálvsognarstovninum, dagfest 20. februar 2002, og samtyktina í byggi- og býarskipanarnevndini tann 22. mars 2004, mælir sosial-deildarleiðarin sosialu nevnd til at taka undir við, at økið verður lagt av til endamálið, og at málið verður beint í fíggjarnevndina.

Eisini verður mælt til, at kommunan biður sjálvsognarstovnin um eina frágreiðing, um hvørjar ætlanir stovnurin hevur í hesum sambandi, og hvussu stovnurin ítøkiliga ætlar at skipa verkætlanina.

**Sosiala nevndin 30. mars 2004:** Samtykt at taka undir við tilmælinum hjá sosialdeildarleiðaranum og beina málið í fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 13. mai 2004:** Samtykt at taka undir við sosialu nevnd.
**Nevndin fyri Vardar íbúðir 18. mars 2005:** Samtykt at heita á sosialu nevnd um at útvega fígging at fáa gjørt byggiprogram.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og sosialdeildarleiðarin mæla nevndini til at játta kr. 100.000,00 av konto 40-3197 (Tiltøk á eldraøkinum) og at heita á byggi- og býarskipanar-deildina um at fáa gjørt byggiprogram.

**Sosiala nevndin 5. apríl 2005:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Arbeiðsbólkur settur av býararkitektinum hevur latið gjørt byggiskrá, sum verður løgd fyri nevndina til støðutakan.

Selmar Nielsen var og greiddi frá byggiskránni.

**Sosiala nevndin 7. februar 2006:** Vísandi til at økið, har ætlanin er at byggja vardu íbúðirnar fyri eldri, ikki er lagt av til stovnsøki, varð **s**amtykt at heita á byggi- og býarskipanarnevndina um, at ásetingarnar fyri økið verða broyttar til stovnsøki, og at samsvarandi tillagingar verða gjørdar í byggiskánni, sum verður løgd fyri nevndina aftur til góðkenningar.

**Ískoyti:**
Økið, ið talan er um, liggur sum A1 øki í Almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu. Økið er eisini umfatað av serstøku byggisamtykt nr. 7. Her liggur tað sum A2-øki

Sambært gr. 2 í serstøku byggisamtykt nr. 7 skulu eindirnar A1 og A2 ikki verða nýttar til annað enn sethús. Á hvørjari ogn mugu einans verða bygd eini stakhús, við í mesta lagi tveimum ibúðum.

Sosiala nevnd heitir á byggi- og býarskipanarnevndina um, at ásetingarnar fyri hetta øki verða broyttar til E (øki til alment endamál) í serstøku byggisamtyktini.

Aðrir almennir stovnar liggja innan fyri serstøku byggisamtykt nr. 7. T.d. liggja Lágargarður og Tjarnagarður í E-økinum, Adventistaskúlin liggur í C3-øki og Eysturskúlin í C2-øki.

Føroya Arbeiðarafelag hevði í 2005 eina umsókn um at fáa teirra ognir, sum eisini liggja innanfyri serstøku byggisamtykt nr. 7, broyttar til C3-øki. Hendan umsókn var ikki gingin á møti (mál nr. 2005-0288). Hetta málið er tó eitt sindur øðrvísi, av tí at ognirnar hjá Føroya Arbeiðarfelag liggja ímillum verandi sethús, ímeðan økið, har ætlanin er at byggja vardar íbúðir, ikki er so tætt bygt enn.

Tó er neyðugt at hava í huga, at ein tílík broyting í byggisamtyktini fyri kommunal øki kann verða brúkt ímóti Tórshavnar kommunu.

29. november 2004 samtykti byggi- og býarskipanarnevndin at endurskoða ella avtaka serstøku byggisamtykt nr. 7. (mál nr. 2004-2762)

**Tilmæli:**
Býararkitekturin mælir til at heita á bygginevndina um at tillaga verkætlanina eftir ásetingunum fyri økið í tann mun tað ber til.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 1. mai 2006:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Bygginevndin hevur í tann mun, tað ber til, roynt at tillaga verkætlanina eftir ásetingunum fyri økið.

Tillagaða verkætlanin verður løgd fyri nevndina til støðutakan.

**Sosiala nevnd 13. juni 2006:** Nevndin tekur undir við tillagaðu verkætlanini og beinir málið í byggi- og býarskipanarnevndina og teknisku nevnd.

Heitt verður á bygginevndina um at viðgera uppskotið saman við eldraráðnum.
**Tilmæli:**
Býararkitekturin mælir nevndini til at taka undir við verkætlanini fyri tann partin sum viðvíkir byggihátt, snið og staðseting.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 4. september 2006:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Bygginevndin hevur viðgjørt uppskotið saman við Eldraráðnum, sum við smærri viðmerkingum tekur undir við verkætlanini.

Bygginevndin mælir til at dispositiónsuppskot verður gjørt, og at farið verður

undir projektering av verkætlanini, og at játtaðar verða kr. 2.000.000,00 til projektering, svarandi til um leið 10% av samlaða kostanðinum.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og sosialdeildarleiðarin mæla nevndini til at taka undir við tilmælinum frá bygginevndini, og at játtaðar verða kr. 2.000.000 av íløgum á eldraøkinum

**Sosiala nevnd 3. oktober 2006:** Samtykt at taka undir við tilmælinum frá trivnaðarstjóranum og sosialdeildarleiðaranum og mæla býráðnum, um fíggjarnevndina, at játta kr. 2.000.000 til projekteringina.

**Tilmæli:**
Býarverkfrøðingurin mælir til at arbeiða víðari við ætlanini.

**Tekniska nevnd 5. oktober 2006:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum hjá býarverkfrøðinginum um at arbeiða víðari við ætlanini.

**Fíggjarnevndin 18. oktober 2006:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við sosialu nevnd og at játta kr. 2.000.000 av íløgum í 2007.

**Býráðið 26. oktober 2006:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**Nýtt:** Formaðurin ynskir málið á skrá til kunningar.

**Sosiala nevnd 6.desember 2011:** Kunnað var um málið. Samtykt at biðja Heidi Poulsen, arkitekt á komandi fundi at kunna nevndina um projektið.

**Sosiala nevnd 07. februar 2012:** Heidi Poulsen frá MAP arkitektum greiddi nevndini frá projektinum. Samtykt at heita á umsitingina um at taka upp samráðingar við Húsalánsgrunnin um møguleikar fyri fígging v.m.

**<u>Byggiøkið á Óðinshædd til Eldrabústaðir og eldrarøkt.</u>**

Forkvinnan ynskir hetta mál á skrá í sambandi við ætlan um at byggja 20 eldraíbúðir á matriklunum 1318a og 1319b, ið Tórshavnar kommuna eigur. Nærhendis eru trý stór røktarheim – Lágaragarður, Tjarnargarður og Boðanesheimið, og tí er hugskot at seta øki á Óðinshædd av til eldrabústaðir og aðra bygging innan eldrarøkt, eitt nú depil til rehabilitering, umlætting v.m.

**Sosiala nevnd 13. mars 2012:** Málið umrøtt

**Ískoyti:**
Samskifti hevur verið við Húsalánsgrunnin um møguleikarnar fyri samstarvi um fígging og bygging av lutaíbúðum og leiguíbúðum. Húsalánsgrunnurin sýnir í

hesum sambandi stóran áhuga fyri byggiætlanini á Óðinshædd og hevur uppskot um at skipa hetta sum lutaíbúðir í samstarvi við kommununa.

Ætlanin hjá Húsalánsgruninum er at fáa bygt fleiri lutaíbúðareindir í Havn. Fyriliggjandi projekt á Óðinshædd er ætlan um 20 eldraíbúðir. Spurningur hevur tikið seg upp, hvussu ynskiligt tað er at byggja stórar íbúðareindir, sum eru eyðmerktar til ávísar málbólkar, heldur enn at spjaða málbólkarnar, sum í størst møguligan mun endurspegla fólkasamansetingina í samfelagnum sum heild.

Saman við øðrum lutaíbúðaætlanum í Havn kann kommunan á henda hátt røkka tørvinum á bíligum íbúðum hjá fleiri málbólkum í senn, eitt nú støkum, støkum uppihaldarum, yngri familjum, ið seta búgv fyri fyrstu ferð, lesandi, eldri, fólki við serligum tørvi o.ø.

Kunnandi fundur hevur verið við umboð fyri nevndina fyri Sjálvsognarstovnin vardar íbúðir, sum upprunaliga tók stig til ætlanina á Òðinshædd/Boðaneshamri, um at broyta endamálið frá vardum íbúðum til eldri til at verða lutaíbúðir til allar málbólkar, men har øll neyðug atlit verða tikin til, at atkomuviðurskifti, innrætting v.m. eisini hóskar til málbólkar við serligum avbjóðingum. Umboðini høvdu einki at viðmerkja til hetta.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og sosialdeildarleiðarin mæla til, at byggiætlanin á Óðinshædd verður skipað saman við Húsalánsgrunninum sum lutaíbúðir til allar málbólkar, og at málið saman við uppskoti um fíggingararleist verður lagt fyri býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Sosiala nevnd 17. apríl 2012:** Nevndin tekur undir við, at byggiætlanin á Óðinshædd skal endurspegla fólkasamansetingina í samfelagnum sum heild. Nevndin samtykti eisini, at uppskot til fíggingarleist og samstarv við Húsalánsgrunnin annars um hesa byggiætlan verður at leggja fyri sosialu nevnd aftur.

**Nýtt:** Málið á skrá 30.mai 2012 sum kunningarmál

**Sosiala nevnd 30. mai 2012:** Andras Róin og Bogi Jacobsen, umboð frá Húsalánsgrunninum, vóru og kunnaðu um byggiætlanir viðv. luta- og leiguíbúðir.

**Ískoyti:**
Húsalánsgrunnurin hevur arbeitt víðari við byggiætlanini á Boðaneshamri samsvarandi samtyktini um, at byggingin skal endurspegla fólkasamansetingina í samfelagnum sum heild. Uppleggið er, at Húsalánsgrunnurin yvirtekur alla byggiætlanina, herundir allan byggikostnaðin.

Støða skal tí takast til formliga at avhenda grundstykkið, matrikklarnir 1318a og 1319b, til Húsalánsgrunnin. Ætlanin er at selja Húsalánsgrunninum stykkið

sambært galdandi prísi. Av tí at stykkið ikki ætlast boðið út, skal sølan góðkennast av Innlendismálaráðnum.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og sosialdeildarleiðarin mæla til at selja Húsalánsgrunninum matrikklarnar 1318a og 1319b til bygging av íbúðum.

**Sosiala nevnd 9. oktober 2012:** Samtykt at mæla býráðnum um fíggjarnevndina at taka undir við tilmælinum við tí ískoyti, at ítøkilig bygging verður framd innan tvey ár, og at kommunan tilskilar sær rætt til at leiga ella keypa íbúð har til bráðfeingis almannamál fyrst og fremst barnavernd.

**Ískoyti:**
Kommunan hevur frammanundan selt eitt óbygt grundøki á Berjabrekku til sjálvsognarstovnin Sinnisbata, fyri kr. 156,00 fermeturin. ( Sí mál nr. 2001-2687) og verður mett at kommunan í hesum føri kann selja ogninar til Húsalánsgrunnin fyri nevnda prís.

Skeytið verður áteknað servituttbindandi við eini áseting um 2 ára byggifreist, frá tinglýsingardegi, og at grundstykki kann fella aftur til kommununa, móti at keypspeningurin uttan rentur verður afturgoldin. Fellur grundstykkið aftur av hesi orsøk, og keyparin hevur byrjað bygging, kann hann fáa prógvaðar útreiðslur endurgoldnar uttan rentur í tann mun, tað gjørda arbeiðið kemur seljaranum ella øðrum keypara av sama grundstykki til góðar.

**Tilmæli:**
Leiðarin á starvs- og løgdeildini og miðfyrisitingarstjórin mæla til at selja Húsalánsgrunninum.

Matr. nr. 1318a, vídd 1.994 m² fyri kr. 311.064,00 og
Matr. nr. 1319b, vídd 3.518 m² fyri kr. 548.808,00

Sølueprísurin verður ásettur til kr. 156,00 fermeturin, og skal keyparin rinda útreiðslur til tinglýsing harumframt.

Tilmælið er treytað av at loyvi fæst frá Innlendismálaráðnum.

**Fíggjarnevndin 24. oktober 2012:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við tilmælinum.

**Býráðið 1. november 2012:** Einmælt samtykt.

**266/12** **1999-1642**

**Golfvøllurin**

**Lýsing av málinum - samandráttur.**
Ætlanin er, at stórur partur av flagnum og undirliggjandi tilfar frá Tórsvølli skal flytast út á golføkið á Glyvursnesi. Tað verður Tórshavnar Golfklubbi, sum ger neyðugu fyrireikingarnar at taka ímóti nógva tilfarinum. Partur av hesum er at leggja dren, at javna økið og leggja onkran arbeiðsveg.

Í hesum sambandi søkir Golfklubburin um at leysgeva part av játtanini à 3,3 mió kr., sum felagið fekk í stuðli í 1999. Søkt verður um 250.000 kr. Sjálvt arbeiðið at leggja flagið verður gjørt vi sjálvbodnum arbeiði.

Útreiðslur í sambandi við flutning frá Tórsvølli verður fíggjað av Tórsvallar-verktætlanini. Í útboðstilfarinum skal lýsast neyvt, hvussu flag og tilfar skal fáast upp og leverast á Glyvursnesi, so at klubburin kann arbeiða hetta víðari.

Nevnda játtan á 3,3 mió er ikki beinleiðis tøk á fíggarætlanini, og rúm er ikki fyri játtanini á kontu 5370 Stuðul til íløgur. Hinvegin er játtan 5 mió kr. sett av á íløguætlanini til golfvøll. Av tí at hetta arbeiðið er at meta sum partur av nýggjum golfvølli, er skilabest, at stuðulin verður játtaður av hesi játtan.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at játta Tórshavnar Golfklubba 250.000 kr. í stuðli til at gera fyrireikingar úti á Glyvursnesi at leggja flag og tilfar frá Tórsvølli av kontu 5775 Ítróttaranlegg.

**Mentamálanevndin 29. mars 2012:** Sambært nýggjari kostnaðarmeting verður fíggjartørvurin hjá felagnum til fyrireikingararbeiðið á Glyvursnesi 400.000 kr., og nevndin samtykti at mæla býráðnum um fíggjarnevndina at játta Tórshavnar Golfklubba upp til hesa upphædd av kontu 5775 Ítróttaranlegg.

**Fíggjarnevndin 29. mars 2012:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini og at játta Tórshavnar Golfklubba upp til 400.000 kr. av konto 5775 Ítróttaranlegg.

**Býráðið 29. mars 2012:** Einmælt samtykt

**Ískoyti:**
Neyðugt er nú av álvara at seta gongd á fyrireikingarnar til golfbreyt á Glyvursnesi, skal breytin verða liðug í góðari tíð undan oyggjaleikum.

Gjørd er arbeiðsætlan, har eisini Tórshavnar Golfklubbi og Ítróttasamband Føroya taka lut í fyrireikandi arbeiðinum. Arbeiðið í hesum fyrsta stiginum fevnir serliga um at fáa avklárað lendisspurningin, um at menna konsept fyri sjálva golfbreytina

bæði ítróttaliga, arkitektoniskt, umhvørvisliga (eitt nú burðardygg vatnveiting, flora v.m.), ferðavinnuliga og fíggjarliga, herundir skipan av rakstri, rakstraræltan og møguleikar fyri eksternari íløgufígging, og um samstarv við útlendskar partar og serfrøði bæði í Skottlandi, Íslandi og Danmark, har fleiri viðkomandi sambond longu eru knýtt.

Annað áleikandi mál er, at ferðslan eftir vegnum frá Hamrinum og til golfvøllin á Glyvursnesi er nógv økt. Vegurin er tó í slíkum standi, at tað gevur teim koyrandi trupulleikar. Gjørd er kostnaðarmeting at fáa lagt avfresað asfalt eftir vegnum, og kemur hetta at kosta um kr. 50-75.000.

Á íløgukontu 5775 ítróttaranlegg eru kr. 4,6 mió tøkar til golfbreyt. Til tess at fáa fyrireikingarnar í gongd verður mett neyðugt við játtan kr. 500.000, harav játtan eisini kann verða brúkt til avfresa asfalt í mesta lagi upp til kr. 75.000.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at játta kr. 500.000 av kontu 5775 ítróttaranlegg til L57016 Golfvøllur ætlað omanfyri nevndu endamálum.

**Mentamálanevndin 10. oktober 2012:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 24. oktober 2012:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini.

**Býráðið 1. november 2012:** Einmælt samtykt.

**267/12** **<u>2012-0322</u>**

**<u>Tekniskt høli til frælsan ítrótt á Tórsbreyt</u>**

Á íløguætlanini 2012 eru avsettar 1 mill. kr. til tøknihøli til frælsan ítrótt á Tórsbreyt. Hølið skal nýtast til ta teknisku útgerð, sum krevst til tíðtøku, upptøku v.m. í sambandi við kappingar og venjing. Ætlanin er at byggja ein lítlan bygning oman á verandi bygning á suðursíðuni á Tórsbreyt.

Gerast skal neyvari lýsing av tørvi og stødd í samráð við feløgini innan frælsan ítrótt. Heitt verður á býararkitektin um at skipa hetta arbeiðið.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til, at farið verður undir at fyrireika bygging av tekniskum høli til frælsan ítrótt á Tórsbreyt.

**Mentamálanevndin 8. februar 2012:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
MAP arkitektar hava kannað tørv og møguleikar, sum eisini lúka nýtslukrøvini hjá frælsu ítróttini, og sum heldur seg innanfyri játtanarkarmin. Útbjóðingartilfar er klárt at senda út, og mælt verður til at bjóða arbeiðið út í innbodnari lisitatión til hesar arbeiðstakarar: Bjarni Poulsen, Húsavarðatænastan, ÁTS, Valaverk, Kappar og Hans V. Lützen. Úrslitið verður at leggja aftur fyri mentamálanevndina til støðutakan.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at bjóða arbeiðið út í innbodnari lisitatión til omanfyri nevndu arbeiðstakarar.

**Mentamálanevndin 5. september 2012:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Mánadagin 8. oktober var lisitatión uppá heildarveiting at byggja tøknibygning á Tórsbreyt. Heitt var á 6 feløg um at geva tilboð. 5 søgdu seg vera áhugað, men tá avtornaði vóru bert tvey sum lótu tilboð inn. Tað vóru Kappar Byggivirki sp/f og P/F H.V.Lutzen.

Tilboðini vóru:
Kappar Byggivirki kr 631.327,00
P/F H.V.Lutzen kr 655.592,00

Ráðgevin hevur kannað tilboðini og hevur ikki staðfest eyðsýndar feilir, og mælir til at takað upp samráðingar við Kappar Byggivirki, sum hevur lægsta tilboði.

**Fíggjarlig viðurskifti:**
Á ìløguætlanini fyri 2012 eru, konto 5775, er avsett kr. 1,0 mió til verkætlanina. Við grundarlagið í lægsta tilboðnum hevur umsitingin gjørt samlaða kostnaðarmeting, íroknað, projektering, eftirlit, prístalsregulering, ókent, mvg o.a. er metingin at arbeiði kann gerast innanfyri avsetta fíggjarkarmin. Víst verður til arbeiðsskjal 2012-0322.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til, at taka av lægsta tilboðnum, og at játta kr. 1,0 mió av av konto 5775 til verkætlanina. Eisini verður mælt til at heimilað umsitingini at taka upp samráðingar og gera sáttmála við arbeiðstakaran um arbeiðið, og at gera avtalu við ráðgevan um projekteringina og eftirlit, innanfyri fíggjarkarmin, og at beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 10. oktober 2012:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 24. oktober 2012:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini.

**Býráðið 1. november 2012:** Einmælt samtykt.

**268/12** **2004-0214**

**Nýggjur fólkaskúli við Løgmannabreyt**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Tórshavnar kommuna hevur avgjørt at byggja nýggjan 2-sporaðan fólkaskúla við frítíðarskúla til 1.-9. flokk í Hoyvíkshaganum. Frítíðarskúlin skal hýsa 1. og 2. flokki.

Í heildarætlanini skal pláss leggjast av til svimjihyl, sum møguliga kemur seinni.

Eftir starvsskipanini hjá kommununi í byggimálum fær mentamáladeildin eina byggiskrá til vega. Henda byggiskrá verður síðani grundarlag undir útinning av verkætlanini, sum byggideildin hevur ábyrgdina av.

Endamálið við byggiskránni er:

- at orða og samskipa tørv, ynski og krøv arbeiðsánarans
- at útgreina, í hvønn mun tað ber til at ganga hesum tørvi, ynskjum og krøvum á møti
- at vísa á prinsipployysnir á hesum grundarlagi

Við tí í huga at støðug menning og broyting er innan skúlaøkið, og at roknast kann við umskipaðum virksemi, tá nýggir karmar loyva hesum, er lítið sannlíkt, at tað ber til at gera eina neyva meting nú av, hvussu virksemið verður, tá ætlaða bygg-ingin verður tikin í nýtslu. Tí er dentur lagdur á at skapa so víðar og broytiligar umstøður sum gjørligt til skúlan.

Arbeiðsbólkurin, ið hevur staðið fyri byggiskránni, hevur viðgjørt stakspurningar saman við fólki við serligum innliti, tá tað hevur verið mett neyðugt.

Byggiskráin er býtt upp í 4 partar:

1. Almennur partur
2. Námsfrøðiligur partur
3. Hølisskrá

4. Byggitøkni

**Grundøki**
Kommunan hevur lagt av eitt øki við Løgmannabreyt til skúlan. Víddin er sambært korti 17.600 m². Økið er ogn hjá Tórshavnar kommunu.

Støddin tykist hóskandi, tá hugsað verður um tørvin á byggilendi (nakað minni enn 5.000 m², tí bygt verður væntandi í meira enn einari hædd), fríøki (minst eini 10 m² fyri hvønn næming) og ferðslu (vegir, gøtur, bilpláss). Tá farið verður undir at gera byggiuppskot, má kortini metast um støddina við atliti til byggihátt, landslag og ferðslu.

**Kostnaður**
Bygningsstøddin er ásett av Tórshavnar kommunu. Støddin er grundað á eina brutto gólvvídd uppá 11 m² fyri hvønn næmingin. Afturat hesum kemur pláss til frítíðarskúla í 1. og 2. flokki, og pláss til skúlabarna-tannlækna.

Samlaða næmingatalið, tá skúlin er fult útbygdur, kann setast til eini 450. Tá er roknað við 18 flokkum við 25 næmingum.

Út frá hesum kann væntast, at samlaða gólvvíddin verður umleið 5.400 m².

**Kostnaðarkarmur**
Sum grundarlag undir framhaldandi ráðleggingini ber helst til at siga, at samlaða íløgan uttan meirvirðisgjald verður:

5.400 m² av gólvvídd fyri 5.400 m² x kr. 18.000 = 97,2 mill. kr.

Hetta má kortini metast sum ein vegleiðandi karmur, til støða er tikin til, hvussu byggiætlanin skal fremjast.

**Tíðarætlan**
Skotið verður upp, at skúlin skal byggjast í einum, men byggingin skal leggjast soleiðis til rættis, at yngstu flokkarnir sleppa í skúla skjótast gjørligt, og hinir so hvørt byggingin verður liðug.

Eftir tíðarætlanini verður allur skúlin liðugur á sumri 2006.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamáladeildarleiðarin mæla til at góðkenna fyriliggjandi byggiprogramm, at projektering verður sett í verk beinanvegin, og at peningur verður játtaður til hetta av íløguætlanini 2003 og 2004.

**Mentamálanevndin 16. september 2003:** Samtykt at taka undir við tilmælinum frá trivnaðarstjóranum og mentamáladeildarleiðaranum og leggja málið fyri býráðið.

Eisini samtykt at heita á plandeildina um at skipa soleiðis fyri, at yngstu flokkarnir sleppa í skúla í august 2005, og hinir flokkarnir so hvørt byggingin verður liðug.

**Býráðið 25. september 2003:** Einmælt samtykt at taka undir við mentamálanevndini við tí ískoyti, at málið verður lagt aftur fyri býráðið, tá dispositión og projektuppskot eru liðug.

**Tilmæli:**
Vísandi til omanfyri nevnda mæla tekniski stjórin og býararkitekturin til:

1) at verkætlanin verður gjørd í ”partnering”.

2) at projektuppskot verður gjørt at leggja fyri nevndina aftur til góðkenningar saman við kostnaðarmeting og cachflow.

3) at arbeiðið verður boðið út, tá projektuppskotið er gjørt, og at teir bjóðandi verða 3 entreprenørar, sum hava royndir innan partnering.

4) at ein treyt í útbjóðingartilfarinum verður, at teir bjóðandi í størsta mun skulu nýta føroyskar undirarbeiðstakarar.

5) at tilboðini, sum koma inn, verða løgd fyri nevndina aftur til støðutakan við tilmæli frá stýrisbólkinum.

6) at stýrisbólkurin verður mannaður soleiðis:
Eitt umboð fyri arbeiðsánaran,
Eitt umboð fyri arkitektin,
Eitt umboð fyri verkfr. (møguligt)
Eitt umboð fyri entreprenørin

7) at arkitektaráðgevi verður settur beinanvegin, og verkfrøðingaráðgevar tá tørvur er á tí.

8) at kommunan setur ein samskipara/skrivara í starv á planleggingardeildini í fulla tíð til burturav at taka sær av verkætlanini, og at hetta starv verður lýst leyst. Starvið skal verða tíðaravmarkað frá febr./mars 2004, til byggingin er liðug og avhendað.

9) at projektleiðari verður valdur av stýrisbólkinum, tá hesin, eftir útbjóðing hevur sett organisatiónina saman.

Umframt omanfyri nevnda mæla tekniski stjórin og býararkitekturin til, at mentamálanevndin tekur støðu til:

10) um ítróttarhøll ella fimleikahallirnar skulu gerast.

11) um graslíkisvøllur við rennibreyt, gummivøllur til rennufjalir og umstøður til nakað av frælsum ítrótti skal verða við í verkætlanini.

**Mentamálanevndin 19. november 2003:** Samtykt at taka undir við tilmælinum frá tekniska stjóranum og býararkitektinum, men spurningurin um útbjóðingarhátt verður viðgjørdur á einum seinni fundi.

Eisini samtykt at taka undir við, at ein dupult fimleikahøll verður gjørd og at taka undir við at graslíkisvøllur við rennibreyt, gummivøllur til rennifjalir og umstøður til nakað av frælsum ítrótti skal verða við í verkætlanini.

**Mentamálanevndin 3. desember 2003:** Samtykt at fara undir projekterings-arbeiðið beinanvegin og gera uppskot til arbeiðs- og tíðarætlan at leggja fyri nevndina á fyrsta fundi 2004.

Málið verður sent til byggideildina.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til, at nevndin tekur støðu til hvønn av omanfyri nevndu møguleikum skal arbeiðast eftir.

**Mentamálanevndin 10. februar 2004:** Samtykt at umsitingin arbeiðir víðari við uppskoti 2 at leggja fyri nevndina skjótast gjørligt og beina málið í byggideildina.

**Mentamálanevndin 3. mars 2004:** Samtykt at byggja ein skúlabygning við verandi Hoyvíkar skúla, sambr. støðumynd, dagfest 3. mars 2004, sum skal kunna hýsa yngstu flokkunum og frítíðarskúla.

Eisini samtykt at játta kr. 100.000,00 av íløgujáttanini 2004 til ger av dispositiónsuppskoti at leggja aftur fyri nevndina skjótast gjørligt, og beina málið til byggideildina.

**Ískoyti:**
Árni Winther, ark., hevur gjørt dispositiónsuppskot.

**<u>1. Inngangur</u>**
Tórshavnar kommuna hevur latið gera eina byggiskrá, sum lýsir ætlanina at byggja ein nýggjan skúla í Hoyvíkshaganum. Byggiskráin er í fýra pørtum og dagfest juni 2003. Byggiætlanin er síðani viðgjørd politiskt og námsfrøðiliga. Eftir ársskiftið varð arbeiðið at fáa til vega eitt skipanaruppskot sett í verk.

Stórur tørvur er á nýggjum skúla í økinum. Kortini hevur kommunan mett, at ein so stór verkætlan skal umhugsast gjølla, áðrenn farið verður undir byggingina. Tí verður arbeitt við at fáa skúlastovur tøkar við verandi Hoyvíkar skúla frá skúlaár-

inum 2005/2006 til yngstu flokkarnar. Hesir flyta so í nýggja skúla, tá hann er klárur at taka í nýtslu.

Ætlanin er at byggja nýggja skúlan so skjótt, hetta verkliga letur seg gera, og fíggjarorkan hjá Tórshavnar kommunu loyvir.

**2. Grundøki**

Í heildarætlanini fyri Hoyvíkshagan hevur Tórshavnar kommuna lagt eitt økið av til nýggjan fólkaskúla. Økið er eystan fyri Løgmannabreyt, niðan fyri innkoyringina til útstykkingina, ið nú er í gerð. Eystast er hagalendi við jøvnum halli suðureftir, í miðjuni eitt gil við einum hamarskapilsi upp frá eystureftir, og eystasti parturin er ein slætti við jøvnum halli suðureftir. Ein lítil graslíkisvøllur er inn frá Løgmannabreyt.

Á grannaøkinum eystanfyri er partur av ætlaðu miðstaðarbyggingini, sum gongur oman og niðan frá Vegnum Langa.

Samlaða støddin á økinum, sum er sett av til skúlan, er umleið 17.600 m².

**3. Innrættingin námsfrøðiliga**

Hølisskipanin byggir á tann partin av byggiskránni, ið lýsir námsfrøðiligu hugtøkini, sum skúlin skal virka eftir. Arbeiðsbólkurin, ið tilevnaði byggiskránna, hevur havt høvi at gera viðmerkingar, meðan arbeitt hevur verið við skipanaruppskotinum.

Grundhugsjónin er: “at byggiháttur og innrætting skúlans er fyriskipað soleiðis, at tað ber til at hava eina fjølbroytta undirvísing, ið verður lagað eftir tørvi og fortreytum næminganna.”

Hølini eru av hesi orsøk ymisk í skapi, stødd, hædd, tilfari, litum og ljósi.

Flokkarnir hoyra til “heimsrustir”, sum umfata:

- 1.-3. flokk við frítíðarskúla
- 4.-5. flokk
- 6.-7. flokk
- 8.-9. flokk

Serhøli er í fakdeplum, sum hava hvør sínar bygningskarmar, svarandi til ymiska tørvin.

**4. Lendisskipan**

Tilkoyring er skipað í samstarvi við vegaumsitingina soleiðis, at børn trygt kunnu verða sett av í lumma framvið Løgmannabreyt, og bilarnir fáa vent í komandi rundkoyring beint omanfyri.

Bilar, ið skulu steðga, koyra eysturum við tilkoyring frá nýggja miðstaðarøkinum har. Pláss er fyri umleið 60 parkeringsplássum. Økið eystanfyri er harumframt lagt av til ítróttarendamál.

Vestanfyri er góður sólargangur og møguleiki at skapa lívd, so her eru spælipláss og fríøki til næmingarnar. Sunnanfyri er útiøki uppat matarhøll, og skermað útiøki til yngstu næmingarnar í skúla og frítíðarskúla.

Í byggiskránni var kravt, at øki skal ávísast til eina nýggja svimjihøll. Mælt verður til, at henda verður partur av miðstaðarøkinum, sum liggur høgliga fyri hjá skúlanum og almenninginum, og kann brúka somu parkeringspláss, tá skúlin ikki er í nýtslu

**4. Umfatan**

Í byggiskránni grein 5.1 vóru nakrar metingar gjørdar um samlaðu gólvvíddina, grundaðar á ein karm uppá 11 m² fyri hvønn næming, ið Tórshavnar kommuna hevur víst á. Samlaða støddin var út frá hesum sett til 5.400 m², har umleið 450 m² vóru til heilsurøkt og frítíðarskúla.

Eisini var í hesi grein í byggiskránni sagt: “*So hvørt byggiætlanin gerst meira ítøkilig, verður mett um, hvussu støddarkarmurin hóskar.”*

Í skipanaruppskotinum eru ynski og krøv til innrætting samanfatað í eini ítøkiligari byggiætlan, har hvør einstøk funktión er vigað eftir námsfrøði, bygging og stødd/kostnaði.

Fyri at halda støddarkarmin, eru nakrar raðfestingar gjørdar í byggiskránni.

Mett verður, at heimaøkini ikki kunnu gerast munandi minni um námsfrøðiliga grundhugsanin ikki skal fara fyri skeyti. Somuleiðis er støddin á flestu fakhølum á markinum til tað sum krevst.

Hinvegin er økið til ítrótt minkað samanborið við ásetingarnar í byggiskránni, har ynski varð tvær hallir nakað størri enn vanligar himleikahallir, umframt pláss til amboð, neyðug skiftirúm o.a.

Orsøkin til hesa minking er partvís, at ítróttarøki er sera plásskrevjandi fyri hvønn næming, og partvís tí, at á donsku skúlunum, ið bygdir eru sambært somu fortreytunum, er eitt ikki so stórt multirúm til ítrótt, ístaðin fyri eina ella fleiri fimleikahallir/ítróttarhallir.

Hølisyvirlit:

| | |
|---|---|
| Heimrustir | 2.141 m² |
| av hesum frítíðarskúli | 237 m² |
| Felagsøki og fyrisiting | 1.608 m² |

| | |
|---|---|
| Ítróttur | 685 m² |
| Fakdeplar | 890 m² |
| Heilsurøkt | 126 m² |
| Bruttostødd tilsamans | 5.450 m² |

**4. Byggitøkni**

Sum grundarlag undir byggiháttinum eru hesar fortreytir valdar:

- Tað er av stórum týdningi, at tilfar og konstruktiónir tola ætlaðu nýtsluna. Hetta hevur týdning bæði fyri at skúlin ikki alt fyri eitt sær slitin út, so næmingarnir ikki virða bygningskarmarnar, og fyri at viðlíkahaldið ikki skal gerast ov stórt.
- Fyri at avmarka íløguna mest møguligt, verða einfaldar loysnir valdar, allastaðni har tað ber til.

Vit ímynda okkum lættar konstruktiónir, helst úr stáli og timbri, við neyðugum stoyptum konstruktiónum. Bygningsskapið ger, at tryggar loysnir kunnu veljast til at fáa tett móti avfalli og vindi.

Støða er ikki tikin til uttandura klæðing av veggjum og tekju. Tilfarið skal tola veðurlag og slit av nýtsluni, og avmarka viðlíkahaldið. Skilaveggir úr plátum við neyðugari styrki og ljóðdoyving. Loftini eru klødd við ljóðdoyvandi gipsplátum. Gólv løgd við t.d. linoleum, í duri flísar. Innhurðar við massivum hurðabløðum.

Roknað er við, at heimrustir, heilsurøkt og verkstaðsbygningur verða sjálvstøðugar brunaeindir í eini hædd við rýmingarleiðum beinleiðis út í lendið. Hetta er mest einfalda loysnin. Brunatrygd í felagsøkjum skal tryggjast eftir samráðing við myndugleikarnar við atliti til nýtslumøguleikar og kostnað.

Hóast ongi lógarfest krøv eru, verður mælt til, at rørslutarnað fáa brúkt skúlan. Hetta er gjørligt við vístu skráunum og lyftu.

Krøvini til inniklima eru lógarfest. Sambært reglunum skal mekaniskt luftskifti verða í nýggjum skúlum. Tó ber til at víkja frá hesum, um tað er sannlíkt, at inniluftin verður nóg góð við øðrum tiltøkum. Við okkara royndum á økinum mæla vit til, at loftshæddin verður stór og teldustýrt natúrligt luftskifti tryggjað. Fortreytin fyri, at hetta riggar er, at sólskermingin er munagóð.

Roknað er við fjarhita. Mælt verður til at kanna, um tað loysir seg at brúka tekjuna til orkuískoyti við sólorku.

Bygningurin skal fyrireikast til tráðleysa samskiftisútgerð.

**5. Tíðarætlan**

Verkætlanin verður útint við støði í tíðarætlan, *Fylgiskjal 2,* til byggiskránna. Staðfestast kann, at fyrireikingararbeiðið viðvíkjandi uppskotsstiginum ikki varð

klárt at byrja sum ætlað, og at tað hevur tikið drúgvari tíð enn mett. Kortini forðar hetta ikki fyri, at komandi arbeiði verður gjørt innanfyri tey ætlaðu tíðarskeiðini frá nú at rokna.

Tá støða er tikin til, hvussu skúlin verður tikin í nýtslu, og tá greitt er, hvussu íløgukarmurin fyri hesa bygging sær út í mun til heildarkarmin hjá kommununi, verður tíðarætlanin endurskoðað.

**6. Kostnaður**

Verður metingin í byggiskránni (grein 5.2.) endurskoðað við somu fortreytum (m.a. príslegu várið 2003), við støði í støddini sambært *4. Umfatan* verður úrslitið:

5.450 m² av gólvvídd fyri kr. 18.000 = 98,1 mill kr.

Ein meira nágreinilig meting, sum byggir á veruligar nøgdir sambært hesi verkætlan, skal gerast í næsta arbeiðsstiginum, tá yvirskipað støða er tikin til bygningskonstruktiónir og –innleggingar.

**Víddin økjast**

Skal samtyktin í mentamálanevndini uppfyllast um, at skúlin skal innihalda eina dupulta fimleikahøll, má víddin økjast við 175 fermetrum.

Meirkostnaðurin fyri hesar fermetrarnar er 3,2 milliónir krónur, roknað út frá somu fortreytum sum samlaða kostnaðarmetingin.

Heildarætlanin verður ikki ávirka annars av hesi øking.

Árni Winther, arkitektur, kemur at greiða frá uppskotinum.

Mentamálanevndin 30. juni 2004: Samtykt at mæla býráðnum, um fíggjarnevndina, til at góðkenna skipanaruppskotið frá mai 2004, tó við tí broyting at ein dupult fimleikahøll verður gjørd, sum krevur umleið 175 m² afturat, og at høli til tannlækna og heilsukanningar verður víðkað við umleið 50 m².

**Fíggjarnevndin 19. august 2004:** Samtykt mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini.

**Býráðið 2. september 2004:** Ein minniluti, Høgni Mikkelsen, mælir til at taka undir við tilmælinum um at byggja nýggjan fólkaskúla í Hoyvíkshaganum tó við teirri broyting, at ásetingin, um at skúlin bert skal fevna um 1. til 9. flokk, verður tikin burtur. Í staðin fyri verður mælt til at beina málið aftur í mentamálanevndina til nýggja viðgerð og støðutakan til, um ikki skúli eigur at vera fyri næmingum í 1. til 10. flokki í Hoyvíkshaganum.

Atkvøtt var um kravið frá Heðini Mortensen um at beina málið aftur í mentamálanevndina, sum var samtykt við 6-2 atkvøðum.

Fyri atkvøddu Jan Christiansen, Heðin Mortensen, Schumann Hjaltalin, Sjúrður Olsen, Beate L. Samuelsen og Jákup S. Joensen. Ìmóti atkvøddu Leivur Hansen og Elin Lindenskov.

**Ískoyti:**
Býráðið samtykti á fundi 25. september 2003 at taka undir við mentamálanevndini, at kommunan fór at byggja nýggjan 2-sporaðan fólkaskúla við frítíðarskúla til 1.-9. flokk í Hoyvíkshaganum.

Grundarlagið undir samtyktini var, at mentamálanevndin á fundi 25. september 2002 samtykti, at skúlin við Løgmannabreyt verður ein 2-sporaður skúli frá 1.-9. flokk, og at núverandi Hoyvíkar skúli verður ein 2-sporaður skúli frá 1.-9. flokk.

Somuleiðis varð samtykt, at 10. flokkarnir fara oman í Eysturskúlan. Eisini fara næmingarnir í Kollafirði í 8. og 9. fl. at vera í skúlanum í Kollafirði.

Í sambandi við avgerðina um at hava framhaldsdeild í Hoyvík og Kollafirði verða skúlastovur tøkar á Eysturskúlanum, sum gevur møguleikar at víðka og menna samstarvið í 10. flokkunum. Næmingarnir úr Hoyvík, Kaldbak og Kollafirði fara at ganga í 10. flokki á Eysturskúlanum, men talan kann eisini verða um at víðka samstarvið at fevna um aðrar skúlar.

Í skrivi, dagfest 6. apríl 2004, frá Mentamálaráðnum til Tórshavnar kommunu um 10. flokk sigur Mentamálaráðið m.a.

"Ráðleggingarnevnd Fólkaskúlans, ið skrivaði Álit um nýggja fólkaskúlalóg í 1997, sum er grundarlagið undir verandi fólkaskúlalóg, hevur m.a. víst á, at tað hevði helst verið best, um teir uml. 600 næmingarnir í 10. flokkunum í Føroyum høvdu verið savnaði í ein ella tveir fólkaskúlar, tí bert á tann hátt hevði tann einstaki næmingurin í størst møguligan mun fingið síni lærugreinaynski uppfylt. Ætlanin við at 10. flokkur skuldi verða heilt valfríur, var júst tann, at tann einstaki næmingurin skuldi í nógv størri mun enn áður kunna seta sína egnu útbúgving saman. Skal hetta eydnast er neyðugt við stórum skúlaeindum, antin sum skúlasamstarv ella við at savna allar 10. floks næmingarnar í Tórshavnar kommunu í einum stórum skúla."

Byggideildin hevur kannað, hvat meirkostnaðurin verður, um ynski er at taka tríggjar 10. flokkar við í verkætlanina.

Sambært teimum fortreytum, sum higartil eru nýttar at meta um kostnaðar-karmin, sær ein øking soleiðis út sambært arkitektavirkinum Árni Winther:

| | | | |
|---|---|---|---|
| Øking av víddini: | 75 næm. * 11 m² pr. næm. | = | 825 m² |
| Meirkostnaður: | 825 m² * 18.000 pr. m² | = | 14.85 mill. kr. |

Vit gera vart við, at hesin kostnaður má metast sum ein grundíløga til at hýsa 75 næmingum afturat. Vit hava ikki kannað serstøk krøv til 10. flokkar, heldur ikki hava vit verið í samband við arbeiðsbólkin hjá byggiharranum hesum viðvíkjandi.

Um ein so stór øking/broyting í verkætlanini skal gjøgnumførast, er sjálvsagt, at vit eiga at endurskoða skipanaruppskotið frá mai 2004.

Í skúlaárinum 2004/2005 eru 186 næmingar í 10. fl. Tað eru 26 næmingar (ein fl.) færri enn síðsta skúlaár.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at halda fram við upprunaligu ætlanunum at byggja nýggjan 2-sporaðan skúla við Løgmannabreyt til 1.–9. flokk og frítíðarskúla til 1. og 2. flokk vísandi til:

<u>at</u> fólkaskúlalógin frá 1997 mælir til størri skúlaeindir í 10. flokkunum, sum mentamálaráðið eisini mælir til.
<u>at</u> skúlastovur verða tøkar í Eysturskúlanum, tá ið næmingarnir í 8. og 9. flokki í Hoyvík og í Kollafirði í framtíðini ikki koma at ganga har.
<u>at</u> meirkostnaðurin verður umleið 15 mill. kr. um 10. flokkur verður við verkætlanini.
<u>at</u> neyðugt verður at endurskoða alt skúlaprojektið, sum aftur fer at hava við sær, at verkætlanin dregur út.

**Mentamálanevndin 6. oktober 2004:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið, um fíggjarnevndina, í býráðið.

**Fíggjarnevndin 7. oktober 2004:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini.

**Býráðið 21. oktober 2004:** Ein minniluti, Høgni Mikkelsen, tekur undir við byggiætlanini, men mælir til, at pláss eisini verður fyri 10. flokki.

Fyrst var atkvøtt um minnilutatilmæli hjá Høgna Mikkelsen sum fall við 1 atkvøðum fyri og 10 atkvøðum ímóti. Fyri atkvøddi Høgni Mikkelsen. Ímóti atkvøddu Jan Christiansen, Heðin Mortensen, Jákup S. Joensen, Sjúrður Olsen, Beate L. Samuelsen, Tórfinn Smith, Elin Lindenskov, Hildur Eyðunsdóttir, Jógvan Arge og Leivur Hansen. Bjarti Mohr greiddi ikki atkvøðu.

Síðani var atkvøtt um tilmæli hjá Mentamálanevndini tann 30. juni 2004 sum var einmælt samtykt.

**Mentamálanevndin 19. oktober 2005:** Árni Winther, arkitektur og Palli Henriksen, samskipari, kunnaðu um málið.

**Ískoyti:**
Kunnað verður um kostnaðin av skúlanum

**Mentamálanevndin 24. mai 2006:** Bygginevndin kunnaði um kostnaðarmetingina, og hvussu langt arbeiðið er komið.

**Ískoyti:**
Arbeiðið at byggibúna økið var boðið út í innbodnari lisitatión millum 5 fyritøkur. 4 fyritøkur valdu at geva tilboð.

Tilboðini eru (uttan mvg):

| | |
|---|---|
| Articon | kr. 8.656.258,00 |
| H.V. Lútzen P/F | kr. 8.710.130,00 |
| P/F J. & K. Petersen | kr. 7.862.666,35 |
| Samtakið TH & ZRJ | kr. 7.067.578,00 |

Árni Winther, arkitektar, hava saman við Landsbyggifelagnum og Sofus M. Jacobsen kannað og eftirroknað tilboðini. Hesir meta samlaðu tilboðshæddina sum lága, men forsvarliga. Kostnaðarmetingin segði kr. 7.885.160,00.

Til kunningar verður sagt frá, at bygginevndin hevur samtykt at bjóða arbeiðið við skúlan út í tveimum umførum afturat: Rábygningur fyri seg og liðugtgeran fyri seg. Hetta verður gjørt fyri at fáa skúlan lidnan til tíðina, t.v.s., at projekteringin kann halda fram, sjálvt um spakin er settur í.

**Tilmæli**
Bygginevndin mælir til at taka av lægsta tilboði áljóðandi kr. 7.067.578,00 frá Samtakinum TH (Tórhallur Hansen) & ZRJ (Zacharias R. Jacobsen) og játtað kr. 8.500.000,00 til arbeiðið, íroknað ókent 10%, byggileiðsla, eftirlit og mvg 6,25%.

**Fíggjarnevndin 21. juni 2006:** Miðfyrisitingarstjórin var á fundinum og greiddi frá málinum.

Samtykt at mæla býráðnum til, um mentamálanevndina, at taka undir til tilmælinum frá bygginevndini.

**Mentamálanevndin 26. juni 2006:** Samtykt at taka undir við tilmælinum frá bygginevndini um at taka av lægsta tilboðnum áljóðandi kr. 7.067.578,00 frá Samtakinum TH (Tórhallur Hansen) & ZRJ (Zacharias R. Jacobsen) og játta kr. 8.500.000,00 til arbeiðið, íroknað ókent 10%, byggileiðsla, eftirlit og mvg 6,25% og beina málið í býráðið.

Nevndin harmast um at røtt mannagongd ikki er brúkt.

**Býráðið 29. juni 2006:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**Ískoyti**
Vísandi til at verkætlanin at byggja nýggjan skúla við Løgmannabreyt, hevur verið boðin út millum fimm arbeiðstakarar at geva tilboð uppá, hevur bygginevndin at verkætlanini, havt samskifti við allar tilboðsgevararnar. Víðari hava umboð fyri bygginevndina og tekniski stjórin havt fundir við lægsta tilboðsgevaran fyri at kanna tilboðið nærri. Eisini hava ivamál frá báðum pørtum verið umrødd, og útgreinaði. Vísandi til hjálagda notat, ið er niðurstøðan hjá umboðunum hjá TK, j. Nr. 2004-0214/ dagfest Tórshavn 23. febr. 2007, mælir bygginevndin býráðnum, umvegis mentamálanevndina og fíggjarnevndina, til at fara í samráðingar um endaligan sáttmála við Búsetur um tilboð B, longra byggitíðin uppá 30 mðr., áljóðandi kr. 98.271.956, uttan mvg.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at taka undir við tilmælinum frá bygginevndini.

**Mentamálanevndin 7. mars 2007:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið, um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 14. mars 2007:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini.

**Mentamálanevndin 21. mars 2007:** Tekniski stjórin, býararkitekturin og bygginevndin kunnaðu mentamálanevndina um málið.

**Tilmæli frá bygginevndini:**
Bjørgfríð Ludvig, Jógvan Arge og Jan Christiansen mæla til at halda fast við síðstnevnda ískoyti, tó soleiðis at fyrivarni hjá Føroya Handverksmeistarafelag kann kapitaliserast.

Mikael H. Viderø, Ingibjørg Berg og Høgni Joensen mæla til at annulera lisitatiónina og bjóða arbeiðið út av nýggjum, har skúlin við Løgmannabreyt og Argja skúli verða boðin út saman í partalag.

**Mentamálanevndin 26. mars 2007:** Nevndin samtykti at taka undir við at fara í samráðingar um endaligan sáttmála við Búsetur um tilboð B, tó soleiðis at fyrivarni nr. 8 hjá Føroya Handverksmeistarafelag kann kapitaliserast.

**Fíggjarnevndin 26. mars 2007:** Útsett.

**Ískoyti**
Eftir fleiri samráðingarfundir millum kommununa og Sp/f Búsetur kann staðfestast, at grundarlag var ikki fyri at koma til eina semju um kapitalisering av fyrivarni nr. 8. Tórshavnar kommuna hevur síðani bjóða sær til at gera semju grunda á upprunaliga tilboði hjá Búsetur. Men heldur ikki tað hevur borið á mál, og á fundi hin 28. mars 2007 hevur Sp/f Búsetur boða borgarstjóranum frá, at teir

ikki meta at møguligt er at koma til eina semju um ein sáttmála, og eru samráðingarnar sostatt endaðar úrslitaleysar.

Sostatt er talan um eina nýggja støðu.

Eftir samrøðu við tekniska stjóran mælir borgarstjórin til fyrst at annulerað útbjóðingina. Harnæst verður mælt til, at víðka um arbeiði við at gera vendipláss og busslummar á Løgmannabreyt til avseting av skúlabørnum v.m. og at gera ætlaða sparkivøllin sunnanfyri skúlan eisini, og at bjóða hetta út sum eitt samlað arbeiði í tveimum stigum, soleiðis at fyrsta stigi fevnir um eina prækvalifisering og næsta stigi fevnir um eina innbodna lisitatión millum teir tilboðsgevarar sum verða kvalifiseraðir, og at beina málið í mentamálanevndina, teknisku nevnd og byggi- og býarskipanarnevndina til avgreiðslu.

**Býráðið 28. mars 2007:** Samtykt at viðgera mál nr. 42/07 sum seinasta mál, aftaná mál nr. 49.

Kl.20:20 bleiv fundurin niðurlagdur.

Kl. 20:24 fundur uppafturtikin.

Samtykt uttan atkvøðugreiðslu, at taka undir við tilmæli frá Leivur Hansen til býráðið um, at heita á borgarstjóran at halda ein fund afturat við Sp/f Búsetur, í eini roynd at finna eina semju í málinum, og at bygginevndin verður við á fundi.

**Mentamálanevndin: 23. apríl 2007:** Borgarstjórin greiddi frá, at hann eftir býráðsfundin 28. mars 2007, hevði fingið skriv frá Sp/f Búsetur, sum greiðir frá, at metingin, hann hevði havt av at samráðingarnar vóru endaðar úrslitaleyst, var grundað á misskiljing millum partarnar, og at samráðingar tískil framhaldandi eru millum partarnar.

Borgarstjórin og formaðurin í bygginevndini greiddu frá gongdini í málinum. Tekniski stjórin gjøgnumgekk sáttmálauppskot, dagfest 23. apríl 2007, og greiddi frá síni støðu til málið.

**Fíggjarnevndin 23. apríl 2007:** Tekniski stjórin gjøgnumgekk sáttmálauppskot, dagfest 23. apríl 2007, og greiddi frá síni støðu til málið.

**Býráðið 23. apríl 2007:** Marin Katrina Frýdal og Hildur Eyðunsdóttir, vísa til tilmælið frá borgarstjóranum til býráðið tann 28. mars 2007 og mæla til, at taka undir við hansara tilmæli um at annulera útbjóðingina v.m., ið fall við 4 atkvøðum fyri og 8 ímóti

Fyri atkvøddu: Hildur Eyðunsdóttir, Marin Katrina Frýdal, Katrin Dahl Jakobsen og Elin Lindenskov

Ímóti atkvøddu: Heðin Mortensen, Jógvan Arge, Leivur Hansen, Bjarti Mohr, Beate L. Samuelsen, Sjúrður Olsen, Høgni Mikkelsen og Jan Christiansen.

Greiddi ikki atkvøðu: Annika Olsen

Við støði í býráðssamtyktini 28. mars 2007, mælir borgarstjórin til at gera sáttmála og ískoytissáttmála nr. 1 við Sp/f Búsetur um bygging av skúla við Løgmannabreyt fyri tilsamans 107.456.475,00 kr. uttan mvg. Tilmælið varð samtykt við 12 atkvøðum fyri og ongari ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Jógvan Arge, Leivur Hansen, Hildur Eyðunsdóttir, Katrin Dahl Jakobsen, Elin Lindenskov, Annika Olsen, Bjarti Mohr, Beate L. Samuelsen, Sjúrður Olsen, Høgni Mikkelsen og Jan Christiansen.

Greiddi ikki atkvøðu: Marin Katrina Frýdal

**Ískoyti:**
Kunnað verður um málið.

**Mentamálanevndin 2. oktober 2007:** Útsett.

**Uppískoyti:**
Játtaðar higartil eru 8,6 mió kr. til jørðarbeiði. Harafturat hevur býráðið samtykt at taka av tilboði uppá kr. 107.456.475,00 til høvuðsarbeiðstøkuna.

Afturat hesum kemur:

| | | |
|---|---|---|
| 1) Projekt, eftirlit og byggileiðsla | kr. | 12.353.846 |
| 2) Eykaðarbeiðir (-kend og ókend) og prísvøkstur, -mett | kr. | 14.485.855 |
| 3) Innbúgv íroknað tannlæknaserútgerð, -mett | kr. | 11.500.000 |
| 4) List og prýi (~1,5% av byggikostnaði) | kr. | 1.717.861 |
| 5) Jørð og íbindingargjøld, -fyribils | kr. | 4.995.965 |
| Samlað | kr. | 45.053.527 |
| Bygging (Jørðarbeiði og høvuðsarbeiðstøka) | kr. | 115.456.475 |
| Íalt fyri verkætlanina | kr. | 160.501.002 |

*-Neyvari útgreining verður framløgd á fundinum.*

Samlaða upphæddin fyri verkætlanina kemur sostatt uppá 160,5 mió.kr., og er fyriløgd bygginevndini t. 8. nov.´07.

Metingin og játtanin t. 30.juni 2004 byggir bert á byggikostnað íroknað projektering. Skulu tølini frá 2004 samanberast við innkomnu tilboðini íroknað projekt, eru samsvarandi upphæddir øktar úr 102 til 115 mió.kr. t.v.s. ein øking á góð 12%. Hesin meirkostnaður er orsakað av hækkaðum kostnaðarstøði í millumliggjandi trimum árunum, umframt ta fermetra øking ið er ískoytt niðanfyri.

Tað verður viðmerkt, at hædd ikki er tikin fyri eykaðarbeiði, 14,5 mió.kr. í samanberingini. Orsøkin er, at henda óvissa eisini var galdandi tá upprunaliga mett var um kostnað.

**Ískoyti:**
Vegna seinni tilkomin krøv og ynskir frá m.a. Mentamálaráðnum, Brunaumsjón Landsins, krøv til frítíðarskúlan og tænastudepil, umframt goymslur er víddin á skúlanum nú 6.200 fermetrar mótvegis 5.675 fermetrar í skipanaruppskotinum frá 2004, tó verður øll økingin ikki fult komplettera í fyrsta umfari, -men fyrireika er at ganga framtíðar krøvum á møti.

**Skúlin við Løgmannabreyt**

FÍGGJARTØRVUR juni 2007-2009

*Rev. Nov.´07*

| **Skúlin við Løgmannabreyt: konto 1033-33010**<br>Fíggjartørvur 2007-2009 | ~brúkt higartil<br>1.000. kr. | 2007 rest<br>1.000. kr. | 2008<br>1.000. kr. | 2009<br>1.000. kr. | SUM<br>1.000. kr. |
| --- | --- | --- | --- | --- | --- |
| Bygging smbr. sáttmála, íroknað príshækkan 2,5% p.a. | 6.878 | 21.835 | 64.646 | 23.416 | 116.774 |
| Eykaðveitingar, kendar og ókendar, + 2,1 mió.kr. frá byggibúnan | 0 | 1.698 | 6.541 | 3.495 | 11.735 |
| Innbúgv, serútgerð tannlækni, list og serfyriskipan | 0 | 0 | 7.018 | 6.700 | 13.718 |
| Projekt, rest íroknað eftirlit og byggileiðslu | 8.354 | 1.065 | 2.482 | 1.387 | 13.287 |
| Jarðarkeyp og íbindingargjøld | | 4.996 | | | 4.996 |
| Árligur tørvur | 15.231 | 29.595 | 80.687 | 34.998 | 160.510 |

*GG: -alllar upphæddir eru uttan MVG*

**Tilmæli:**
Mettur kostnaður fyri skúlan við Løgmannabreyt verður kr. 160.510.000,- umframt meirvirðisgjald.

Býráðið hevur higartil játtað kr. 8,1 mió uttan mvg, og tikið av sáttmálum afturat hesum fyri kr. 107.456.475 uttan mvg. Haraftrat verður roknað við 45.053.527 kr. til projekt, eftirlit, byggileiðslu, eykaarbeiðir, innbúgv, list, prýði, jørð og íbindingargjøld.

Bygginevndin mælir mentamálanevndini til at játta kr. 152.410.002 uttan mvg (107.456.475+45.053.527 kr) til byggingina og beina málið, um fíggjarnevndina, í býráðið.

**Mentamálanevndin 14. november 2007:** Samtykt at taka undir við tilmælinum frá bygginevndini og beina málið, um fíggjarnevndina, í býráðið.

**Fíggjarnevndin 21. november 2007:** Samtykt at mæla býráðnum til at játta kr. 161.623.000 íroknað mvg sambært yvirliti yvir fíggjartørv, dagfest nov. 2007, av konto fyri íløgum.

**Býráðið 22. november 2007:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
**Broytingar í bygginginí.**
Mentamálaráðið hevur ásett, at lærarastørvini á skúlanum skulu skipast sum dagsverk, og krøv eru tí sett til arbeiðsumstøðurnar hjá lærarunum í hesum sambandi. Hetta merkir, at pláss skal vera fyri, at allir lærarar skulu hava hølir til at arbeiða á skúlanum frá 8-16.

Hetta kravið var ikki við í projekteringini av skúlanum og tí heldur ikki við í kostnaðarmetingini, sum býráðið samtykti.

Tað vóru tó eyka hølir í skúlanum, sum vóru ætlað til goymslu. Bygginevndin tók avgerð um at seta vindeygur, hurðar og yvirljós í hesi hølir, soleiðis at møguleiki varð fyri at innrætta hølini til arbeiðsrúm hjá lærarum. Hølini eru trý í tali.

Mett verður, at meirkostnaðurin fyri at komplettera øll 3 arbeiðsrúmini, er kr. 1,3 mió., - uttan projektering.

Við tað, at hetta kravið ikki er við í kostnaðarmetingini av skúlanum, er neyðugt at finna sparingar.

Møguleiki er fyri at útseta/spara serútgerð til tannlækna, tað er stólar, røntgen v.m. Mett virði kr. 1,4 mió.kr. Hetta ber í sær, at skúlatannlækni ikki kann virka á skúlanum, men børnini kunnu busta tenn o.a. í skúlanum eins og í hinum skúlunum.

Við hesum verða umleið 1,4 mió. kr. spardar. Gjørt verður vart við, at onnur krøv eisini er komin eftir, at kostnaðarmetingin varð gjørd, sum bygginevndin arbeiðir við.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin, deildarleiðarin fyri mentamáladeildina og bygginevndin mælir til at útseta/spara serútgerð til tannlækna, og komplettera trý arbeiðsrúm til dagsverk hjá lærarum.

**Mentamálanevndin 1. apríl 2009:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 22. apríl 2009:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini.

**Býráðið 30. apríl 2009:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Mentamálanevndin verður kunnað um støðuna í verkætlanini "Skúlin við Løgmannabreyt".

**Mentamálanevndin 8. september 2009:** Bjørgfríð Ludvig, miðfyrisitingarstjóri, greiddi frá.

**Ískoyti:**
Jógvan Arge ynskir málið á skrá.

**Fíggjarnevndin 14. apríl 2010:** Hans Pauli Henriksen kunnaði um málið. Samráðingar eru við Búsetur um eina endaliga semju í málinum, og er freistin ásett til 27. apríl at finna semju. Víst verður serliga á, at asfalteringin skal fáast frá hondini sum skjótast.

**Mentamálanevndin 28. apríl 2010:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti:**
Status í málinum: Eftir av játtanini til bygging av skúlanum eru 11,3 mió. kr. Av hesum skulu umleið 4 mió. kr gjaldast til Búsetur sambært sáttmála. Partar av hesum er afturhald fyri manglar, serliga trupulleikar við vindeygum, hurðum og ventilatiónsskipan. Eftir eru so 7, 3 mió. kr.

Bygginevndin var av tí fatan, at flest írestandi arbeiðir, so sum dagsværk, skúrar o.a. kundi gerast liðugt fyri tær 7,3 mió. kr.

Eftirfylgjandi er Búsetur komin við eykakrøvum á kr. 8 mió. – eitt ár eftir avhandan. Kommunan hevur avvíst eykakrøvini, í høvuðsheitum vísandi til, at krøvini eru fyrnað og at partar av teimum er avroknaði sambært sáttmála.

Fundur var millum partarnar 6. mai, har øll krøvini blivu gjøgnumgingin og flest krøv avvíst. Niðurstøðan varð, at Búsetur skuldi venda aftur og boðað frá, um málið verður lagt fyri gerðarrætt.

Eingin fráboðan er enn komin frá Búsetri.

Út frá verandi støðu verður ikki mett, at grundarlag er fyri at gera semju í málinum.

**Tilmæli:**
Vísandi til íkomnu støðuna við Búsetur mælir bygginevndin mentamálanevndini og fíggjarnevndini til at loysa upp fyri støðuna soleiðis:

- At 3 mió. kr. verða avsettar til møguligt gerðarrættarmál.

- At restupphæddin 4,3 mió. kr. verða brúktar til neyðug arbeiðir á skúlanum. Tað snýr seg um dagsverk til lærarar, skúrar til ávíkavist frítíðarskúlan og rusk, tannbusting og disk til kantinuna.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at taka undir við tilmælinum frá bygginevndini.

**Mentamálanevndin 3. juni 2011:** Meðan málið varð viðgjørt fór Maria Hammer Olsen av fundi.

Ein meiriluti Jógvan Arge, Halla Samuelsen og Jákup Símun Simonsen taka undir við tilmælinum og beina málið í fíggjarnevndina.

Ein minniluti Annfinn Brekkstein tekur ikki undir við tilmælinum, men mælir til at gjalda Búsetur kr. 4 mió. sambært sáttmálanum, ið eru afturhildnar.

**Fíggjarnevndin 8. juni 2011:** Samtykt at taka undir við meirilutanum í mentamálanevndini við teirri broyting, at 2,5 mió. kr. verða brúktar til at gera neyðug arbeiðir á skúlanum liðug.

**Ískoyti:**
Á bygginevndarfundi 9. november 2011 samtykti bygginevndin at mæla mentamálanevndini til at loka verkætlanina - Nýggjur skúli við Løgmannabreyt , L 41005, og at restupphæddin, 10.934.374 kr. verður flutt á aðra konto til nýggja verkætlan.

Av restupphæddini  skal ein partur rindast til arbeiðstakara, umframt aðrar smærri reguleringar. Samlaða upphæddin til hetta er 3.071 tkr. Eftir eru so 7.864 tkr.

Nøkur arbeiði eru í gongd. Tey eru dagsverk til lærarar, tannbusting, ymisk liðugtgerð.t.d. skelting. Kostnaðurin fyri hesi arbeiði er mettur til 2.634 tkr. Tá arbeiðini, sum eru í gongd, eru gjørd, eru 5.300 tkr. eftir.

Aftrat hesum arbeiðum mælir bygginevndin til, at skúrur við grovverkstaði til frítíðarskúlan verður gjørdur, rusk-, maskin- og súkkluskúrur verður gjørdur, at diskur til kantinuna verður gjørdur, og eitt arbeiði í skúlagarðinum verður gjørt. Metti kostnaðurin fyri hesi arbeiði er 2.500 tkr. Eftir á verkætlanini verða so 2.730 tkr.

Eykakrøv liggja, sum semja ikki er um. Kommunan hevur avvíst hesum krøvum, men møguleiki er fyri, at arbeiðstakarin leggur málið fyri gerðarrætt.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at taka undir við tilmælinum frá bygginevndini at loka verkætlanina og at restupphæddin verður flutt til at fíggja nevndu arbeiðini viðvíkjandi skúrum, kantinu og skúlagarði.

**Mentamálanevndin 14. november 2011:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í fíggjarnevndina.

**Ískoyti:**
Uppgerðin er broytt, og upphæddirnar sostatt broyttar.

Upphæddin til arbeiðstakara og reguleringar er 3.652 tkr. Eftir eru so 7.283 tkr.

Metti kostnaðurin til dagsverk, tannbusting og ymiska liðuggerð er 2.753 tkr., og tá eru eftir 4.529 tkr.

Metti kostnaðurin fyri tey arbeiðini, sum bygginevndin mælir til verða gjørd aftrat, er óbroyttur tvs. 2.500 tkr. Eftir á verkætlanini eru sostatt 2.029 tkr.

**Fíggjarnevndin 16. november 2011:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini við teirri broyting, at eftir at verkætlanini eru 2.029 tkr. At leggja fyri býráðið til kunningar.

**Býráðið fyri læstum hurðum 24. november 2011:** Útsett.

**Býráðið fyri læstum hurðum 14. desember 2011:** Framlagt.

**Ískoyti:**
Kostnaðarmeting av arbeiðinum at gera skúr við grovverkstaði til frítíðarskúlan, rusk-, maskin- og súkkluskúr og arbeiði í skúlagarðinum er dagførd.

Kostnaðarmeting:

| | |
|---|---|
| Skúrur til rusk, amboð og súkklur | 579.750 |
| Skúrur til FTS | 789.988 |
| Arb. í skúlagarðinum | 659.400 |
| Ráðgeving, eftirlit, teknisk umsiting, fyrireiking fram til skúrarnar, mvg og óvæntað | 470.000 |
| Til samans | **2.499.138** |

16. november 2011 samtykti fíggjarnevndin at taka undir við mentamálanevndini, at ein upphædd á 2.500.000 kr. varð nýtt til at fíggja skúr við grovverkstaði, rusk-, maskin- og súkkluskúr, kantinu og eitt arbeiði í skúlagarðinum.

Sambært kostnaðarmetingini røkkur upphæddin ikki til øll arbeiðini, og tí verður biðið um, at upphæddin á 2.500.000 kr. verður nýtt til skúrarnar og skúlagarðin.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til, at upphæddin á 2.500.000 kr. verður nýtt til skúrarnar og skúlagarðin.

**Mentamálanevndin 10. oktober 2012:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 24. oktober 2012:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini.

**Býráðið 1. november 2012:** Einmælt samtykt.

- Nú kom Bogi Andreasen

**269/12** **2012-0732**

**HIT húsið – House of innovation Tórshavn**

Ætlanin er at kanna møguleikan fyri at seta á stovn Íverksetarahús í Tórshavn. Tað er alneyðugt, at fleiri vinnuvirkir verða sett á stovn í kommununi, og kundi hetta tiltakið stuðla undir tí.

Íverksetarahúsið kann betra um vakstrarmøguleikarnar hjá íverksetarum. Kommunan er við til at skapa eitt umhvørvið, soleiðis at íverksetarar kunnu læra av hvørjum øðrum v.m. Samstundis er møguleiki fyri at savna vitan, sum kann stuðla íverksetarum, eitt nú innan fígging, útflutningur, marknaðarføring, patent v.m.

Kommunan innrættar íverksetarahúsið við skrivstovum, fundarhøli, køki, atgongd til streym, net og printara. Telduútgerð og telefonir útvega íverksetarar sjálvir.

Virsksemið má ikki vera kappingaravlagandi. Tí er neyðugt at seta karmar upp fyri húsið. Millum annað má støða taka til:

- Hvussu leingi kann ein íverksetari vera inni í húsinum?
- Hvussu nógvar fermetrar ella fólk kann ein fyritøka hava inni í húsinum?
- Skulu avmarkingar setast fyri, hvør kann vera í húsinum?
- Húsaleiga?

Kommunan setir hús til taks, men virksemið skal hvíla í sær sjálvum.

Møguligt skal vera at leiga eitt skrivaraborð í ein dag, ella eitt høli í mdr. Etableraðar fyritøku skulu eisini kunna leiga fundarhøli t.d. til videoráðstevnur. Møguleiki eigur eisini at vera fyri at skapa samstarv millum íverksetarar og fyritøkur í kommununi.

Húsið skal verða smart, eggja til skapan og bjóða uppá hentleikar, tíðarrit o.l. so uppfinnaratýpur, designarar, rithøvundar, app-mennarar trívast.

Íverksetarahús kann setast á stovn í Kongagøtu. Uppstarturin verður fíggjaður av konto 7310 Vinnustrategi. Kommunan kundi heitt á Áka Johansen, fyrrverandi sendimann og starvsfólk á Menningarstovuni um at orða upprit til karm fyri húsið, sum verður at leggja fyri fíggjarnevndina aftur á næsta fundi.

**Ískoyti**
Umsitingin hevur saman við arkitekti gjørt nærri kanningar av møguleikanum at gera Kongagøtu 7 um til íverksetanarhús. Mett verður, at verkætlanin letur seg fremja, men at tað má gerast í stigvíst, grundað á fíggjarlig viðurskiftir og tørv.

Í fyrsta byggistigi verða tvær hæddir innrættaðar. Tvær tær seinnu hæddirnar og fasada verða innrættaðar seinni, tá írestandi fígging er fingin til vega, vónandi partvíst frá sponsorum millum vinnulívið í býnum og/ella íleggjarum aðrastaðni.

Tvær tær fyrstu hæddirnar verða innrættaðar av nýggjum. Gjørt verður eitt fundarhøli, ein køkur/upphaldsrúm, tvey vesi, har annað er til rørslutarnaði, og eitt kopi/goymslurúm. Restin verður innrættað til einkult skrivstovur og felagsskrivstovuhøli.

Eins og gjørt verður í grannalondum, verður skipað fyri samstarvi við verandi vinnulív og útbúgvingarstovnar í Tórshavnar kommunu um ráðgeving, verkætlanir og virksemi húsinum í heila tikið. Fróðskaparsetur Føroya og Vinnuhúsið hava víst áhuga fyri ætlanini.

Ætlanin er at skipa fyri nøkrum sponsurpakkum, ið gera tað møguligt hjá vinnuni at stuðla íverksetanarhúsinum og afturfyri fáa umrøðu í faldarum, heimasíðu, apps o.l. hjá húsinum. Ynski er eisini um at byggja upp eitt størri samstarvsforum millum vinnu og umsiting í høvuðsstaðnum.

Reglugerð verður gjørt fyri húsið, sum ásetur, hvør hevur ábyrgdin av húsinum, hvør kann fáa innivist í húsinum, undir hvørju treytum og hvussu longi. Sett verður upptøkunevnd at meta um, hvørt hugskot hjá íverksetarum eru somikið búgvið og burðadygg í longdini, at viðkomandi kann fáa innivist.

Leigikostnaður og hvat fæst fyri leiguna, depositum, uppsagnartíð o.l. verður ásett í standard leigusáttmála.

Umvæling av húsinum er mett at kosta uml. 4 mió. kr. Fyrsti partur er mettur til uml. 2 mió. kr.

**Tilmæli:**
Stjórnin mælir býráðnum til, umvegis fíggjarnevndina, at taka undir við, at húsið í Kongagøtu 7 verður brúkt til íverksetarahús.

Fyrsti partur verður fíggjaður soleiðis:
Konto 7310 Vinnustrategi, framflutt frá 2011 kr. 1,25 mió.
Konto 7310 Vinnustrategi, játtan 2012 kr. 0,4 mió.
Konto 1313 Teknisk fyrisiting, framflutt frá 2011 kr. 0,5 mió.

Biðið verður um, at kr. 0,5 mió verða fluttar frá 1313 til 7310 sum eyka játtan.

**Fíggjarnevndin 21. mars 2012:** Umrøtt.

**Ískoyti:**
Tíðin stendur ikki í stað og tíðin hevur ikki arbeitt fyri Tórshavnar kommuna seinastu árini. Almennir stovan og skúlar verða fluttir á bygd og fiskivinnan er fánað burtur. Meiri lív kundi verið í miðbýnum og barnatalið minkar.

Kommunan eigur at viðvirka til, at dynamikkurin og skapanarhugurin, ið er í einum býi, sum hevur rætta lutfallið millum privatu vinnuna og almen starvspláss, hevur betri sømdir. Samstarvið millum Tórshavnar kommunu og vinnulívið má betrast.

Vit mugu í tættan dialog við vinnuna, so at vinnulívið kennir, at vit eru viðspælarar. Vit mugu gera karmarnar um vinnulívið meira fjøltáttaðar, og hava eitt breiðari fokus.

At gera keikant og stór ídnaðarstykki er gott, men fyri eina framsøknað kommunu er neyðugt við einum breiðum vinnulívspolitikki. Vit mugu skapa betri vakstrararmøguleikar hjá teimum, ið hava góð hugskot.

Her er HIT-húsið ein sera góð byrjan og eitt ógvuliga sterkt signal at senda. Eitt signal, ið ikki kann undirmetast og sum ein høvuðsstaður kann branda seg við.

**Tilmæli**
Stjórnin mælir býráðnum til, umvegis fíggjarnevndina, at taka undir við, at húsið í Kongagøtu 7 verður brúkt til íverksetarahús og at fíggja húsið soleiðis:

Fyrsti partur verður fíggjaður soleiðis:
Konto 1110 Býráð kr. 200.000

Konto 1311 Miðfyrisitingin kr. 300.000
Konto 1560 Tænastumannaeftirlønir kr. 200.000
Konto 7310 Vinnustrategi, kr. 942.000
Konto 5373 Skálatrøð framtíðarætlan kr. 1.000.000

**Fíggjarnevndin 24. oktober 2012:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við tilmælinum.

**Býráðið 1. november 2012:** Atkvøtt var¨um ilmælið frá fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 12 atkvøðum fyri og ongari ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Bogi Andreasen, Marin Katrina Frýdal, Jógvan Arge, Halla Samuelsen, Jákup Símun Simonsen, Elin Lindenskov, Levi Mørk, Maria Hammer Olsen, Anfinn Brekkstein, Inga Dahl og Sjúrður Olsen.

Greiddi ikki atkvøðu: Jan Christiansen.

**270/12** **2012-1344**

**Eigarafelagið Stóragerði.**

**Lýsing av málinum - samandráttur:**
Býlingurin umfatar 22 grundstykki/raðhús burturav matrikli 1045a, Tórshavn.

Eigarafelagið fyri økið Stóragerði í Havn, varð stovnað 12. apríl 2012.

Viðtøkurnar vóru samtyktar á stovnandi aðalfundinum.

**Tilmæli:**
Leiðarin á starvs- og løgdeildini og miðfyrisitingarstjórin mæla fíggjarnevndini og býráðnum til at góðkenna viðtøkurnar fyri Eigarafelagið Stóragerði.

**Fíggjarnevndin 24. oktober 2012:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við tilmælinum.

Bogi Andreasen luttók ikki í viðgerðini av hesum máli.

**Býráðið 1. november 2012:** Einmælt samtykt.

**271/12** **<u>2010-2190</u>**

**<u>Spillivatnsætlan fyri Tórshavnar kommunu 2011-2015</u>**

**Lýsing av málinum - samandráttur:**
Umsitingin hevur latið gera spillivatnsætlan fyri Tórshavnar kommunu sambært krøvum í kunngerð nr. 111 frá 7. september 2009 um spillivatn. Ætlanin umfatar:

- Lýsing av spillivatnsskipanini, íroknað bygnað, tilfar, aldur, reinsing og kloakkeringsøkið
- Slag og nøgd av spillivatni, ið verður og fer at verða leitt gjøgnum leiðingarnar
- Útleiðingarstøð og umhvørvi rundanum, t.d. botn- og vatngóðsku og streymviðurskifti
- Ampar og umhvørvisárin frá skipanini og útleiðingini
- Eftirlit og røkt av spillivatnsskipanini
- Meting um væntaða menning í kommununi hvat fólkatali og ídnaðartilgongd viðvíkur, og hvønn týdning menningin hevur fyri samansetingina og nøgdina av spillivatni, og fyri umhvørvið, ið spillivatnið verður leitt út í
- Grundgivna raðfesting av nær ætlaða kloakkeringsarbeiðið verður framt, og nær tað væntandi verður liðugt.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og leiðarin fyri heilsu- og umhvørvisdeildina mæla til, at spillivatnsætlanin verður samtykt, herundir at avseta neyðuga fígging, soleiðis at tíðarfreistin sambært lógarkrøvunum verður hildin.

**Heilsu- og umhvørvisnevndin 27. september 2011:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum og at beina málið í býráðið um teknisku nevnd og fíggjarnevndina.

**Ískoyti:**
Sambært framlagdari spillivatnsætlan (j. nr 2010-2190/25) er neyðugt at íløgujáttanin næstu árini er:

- 2012: 7,5 mió
- 2013: 7,5 mió
- 2014: 4,1 mió

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og leiðarin á plan- og rakstrardeildini mæla til at býráðið játtar 7,5mió kr. av íløgukarmunum í 2012, 7,5mió kr. av íløgukarmunum í 2013 og 4,1mió kr. av íløgukarmunum í 2014 – ella samanlagt 19,1 mió.

**Tekniska nevnd 18. oktober 2011:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum og at beina málið í býráðið, um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 19. oktober 2011:** Víst verður til fíggjarætlanina fyri 2012, har 5 mió. kr. eru settar av til spillvatnsætlanina. Málið um restfígging verður tikið upp í sambandi við viðgerðina av fíggjarætlanini fyri 2013 og 2014.

**Býráðið 20. oktober 2011:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Spillivatnsætlanin, sum varð samtykt í býráðnum 20. oktober 2011, varð send Umhvørvisstovuni til góðkenningar.

Kommunan fekk tá nakrar viðmerkingar, og ætlanin varð ikki góðkend av tí at nøkur viðurskifti ikki vóru nevnd í ætlanini. Viðmerkingar vóru m.a. til manglandi umsókn um undantaksloyvi fyri Syðradal og Norðadal viðvíkjandi kravinum um at útleiðingar skulu liggja 1 m undir størstu fjøru.
Tær viðmerkingar, sum kommunan fekk tá, eru viðgjørdar og ætlanin send Umhvørvisstovuni (US) av nýggjum. Spillivatnsætlanin varð góðkend av (US) 21. juni 2012, men verður hetta ikki lýst á heimasíðuni, fyrr enn ætlanin er góðkend av býráðnum.
Smærri broytingar eru í nýggju útgávuni av spillivatnsætlanini, og verður hon tí løgd fyri viðkomandi nevndir og býráð aftur.

Kostnaðarmetingin fyri tað arbeiðið sum skal gerast, sum er partur av spillivatnsætlanini í verandi líki, er tann sama sum í fyrru útgávuni.

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Tá spillivatnsætlanin varð skrivað í 2011, varð komið fram til eina kostnaðarmeting áljóðandi 19,5 mió. kr. fyri at fáa bygnaðin á spillivatnsskipanini góðkendan innan 2015, soleiðis sum ásett við lóg. Í langtíðarfíggjarætlan kommununar var skotið upp at fíggja írestandi íløgurnar soleiðis: 2012: 7 mió., 2013: 8 mió. og 2014: 5 mió. Játtanin fyri 2012 er samtykt.

Stórur partur av spillivatnsskipanini er ikki lýst nóg væl í FDS-skipanini og tískil mangla upplýsingar um stórar partar av skipanini. Tað krevur eitt umfatandi og drúgt skrásetingararbeiði og innlegging av talgildum data í skipanina, fyri at fáa hesar upplýsingar til vega. Hetta merkir sostatt, at tað eru nógvir trupulleikar og manglar í skipanini, sum ikki eru kendir í dag. Kanningar eru farnar í gongd fyri at kannað góðskuna á øllum leiðingum í kommununi. Hesar kanningar koma væntandi at taka langa tíð og væntast kann, at kostnaðurin av hesum ábøtum verður stórur. Tískil skal eisini roknast við, at dagføring av gomlum kloakkleiðingum o.l. er eitt arbeiði sum farast skal undir, tá arbeiðið at løggilda útleiðingar v.m. er komið á mál við ársenda 2014. Fígging til kloakkir má tí halda áfram í nøkur ár afturat, eftir 2015.

Listin yvir hesar trupulleikar eigur sum áður nevnt at verða tengdur at spillivatnsætlanini, tá hon skal endurskoðast, og kemur hetta at føra størri

kostnaðir við sær. Spillivatnsætlanin skal dagførast 3. hvørt ár og so hvørt, munandi broytingar ella ískoyti verða gjørd til ætlanina.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og leiðarin á heilsu- og umhvørvisdeildini mæla til at góðkenna spillivatnsætlanina og at beina málið í teknisku nevnd, fíggjarnevndina og býráðið.

**Heilsu- og umhvørvisnevndin 4. september 2012:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

**Tekniska nevnd 11. oktober 2012:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum og at beina málið í fíggjarnevndina og býráðið.

**Fíggjarnevndin 24. oktober 2012:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við heilsu- og umhvørvisnevndini og teknisku nevnd.

Bogi Andreasen luttók ikki í viðgerðini av hesum máli.

**Býráðið 1. november 2012:** Einmælt samtykt.

**272/12** **2011-2140 EYE**

**Óla Jákup Tvørfoss: Áheitan vegna Eigarafelagið undir Kongavarða, at kommunan yvirtekur gøtuljósini hjá Sp/f Valbjørn Dalsgarð**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Í skrivi dagf. 10. september 2011 verður heitt á Tórshvnar kommunu um at yvirtaka gøtuljósini undir Kongavarða.

Vegurin undir Kongavarða er ikki yvirtikin, og í tí sambandi hevur umsitingin í skrivi dagf. 30.11.2010 (j. nr.2010-2796/1) til sp/f Valbjørn Dalsgarð boðað frá, at kommunan var sinnað at yvirtaka raksturin av gøtuljósunum á 1. byggistigi og á atkomuvegi til hetta. treytað av at:

1. Kommunan fær fullfíggjaðar tekningar og teknisk data fyri nevndu gøtuljósskipan.
2. Ljósmastrarnar skulu vera "arbeiðsvinarligar". M.a. skulu lúkurnar vera lætt atkomuligar og vatn má á ongan hátt seta inn í mastrina um lúkuopið. Tað skulu vera minimum 25 cm frá lúkukarmi og niður til lendið.
3. Øll gøtuljós skulu vera í lagi áðrenn yvirtøku.

4. P/F Valbjørn Dalsgarð skipar so fyri, at bert eitt stýriskáp er til alt økið. Henda broyting kann bíða til 2. byggistig er liðugt. Kommunan er skaðaleys av hesi broyting.
5. Ynskið er eisini, at fullfíggjaðar tekningar yvir vatnleiðingar á sama øki, verða latnar kommununi.

Verða hesi krøv/ynskir gingin á møti, er kommunan sinnað at yvirtaka gøtuljósini frá 1. januar 2011 at rokna.

Kommunan hevur ongantíð fingið aftursvar frá sp/f Valbjørn Dalsgarð. Umsitingin greiðir annars frá gongdini í málinum.

**Tekniska nevnd 18. oktober 2011:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti:**
Sjúrður Olsen hevur biðið um at fáa málið á skrá. Víst verður eisini til mál nr. 2010-2796

**Fíggjarnevndin 12. september 2012:** Samtykt, at kommunan ger avtalu við SEV um at fáa gøtuljósini undir Kongavarða at lýsa, og at beina málið um yvirtøku av vegnum í teknisku nevnd.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin, leiðarin fyri heilsu- og umhvørvisdeildini og leiðarin fyri vatn- og gøtuljósdeildina mæla til, at kommunan yvirtekur raksturin av gøtuljósunum Undir Kongavarða, at útreiðslurnar verða fíggjaðar av konto 8210 og at lagt verður upp fyri øktum útreiðslum á gøtuljósøkinum á framtíðar rakstraræ tlanum.

**Heilsu- og Umhvørvisnevndin 2. oktober 2012:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.
Bogi Andreasen var ikki við til viðgerð av málinum.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur avgreitt spurningin um gøtuljós saman við SEV.
Umsitingin hevur eisini latið gera innanhýsis notat í málinum, sum lýsir teknisku støðuna av vegnum (sí skjal nr. 2011-2140/9).

**Tilmæli:**
Víst verður til undanfarnar samtyktir hjá teknisku nevnd og eftirfylgjandi býráðssamtykt frá 13. september 2007 (sí j. nr. 2000-2712/13), um almennar leiðreglur fyri yvirtøku av privatum vegum, har ásett er, at privatir vegir kunnu yvirtakast, um teir, umframt at lúka treytirnar í almennu byggisamtyktini, eisini við atliti til dygd, skulu lúka vanligar tekniskar treytir og í aðrar mátar ikki eru ein natúrligur partur av einum privatum grundstykki.

Vegurin undir Kongavarða lýkur ikki hesar treytir sum er. Men grundað á serlig viðurskifti í sambandi við at eigarin ikki longur hevur ræði á ognini, mæla tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin til at yvirtaka vegin. Samstundis verður tó mælt til at játta pening til ábøtur sambært notati í málinum.

**Tekniska nevnd 11. oktober 2012:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum og vísir á, at vegurin ikki skal kosta kommununi pening ísv. yvirtøkuna og beinir málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 24. oktober 2012:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við heilsu- og umhvørvisnevndini og teknisku nevnd.

Bogi Andreasen luttók ikki í viðgerðini av hesum máli.

**Býráðið 1. november 2012:** Einmælt samtykt.

**273/12** **2009-2301 (Sí eisini mál 2004-2542, 2009-2316, 2009-3181)**

**Umsókn frá Kaj Andreasen & Co um at keypa matr. nr. 1nd, Hoyvík**

**Lýsing av málinum - samandráttur:**
Kaj Andreasen & Co søkir um at keypa matr. nr. 1nd, Hoyvík, at leggja saman við verandi ogn teirra matr. nr 1æg, Hoyvík (Brekkutún 7).

Sambært umsøkjaranum er endamálið við keypinum er at skapa rúmd til tann partin av útigoymslu teirra, ið ikki rúmast á matr. nr. 1æg.

Matr. nr. 1nd, Hoyvík er 1.039 fermetur til støddar. Grundstykki liggur sambært byggisamtyktini í C1-øki "Tøtt miðstaðarbygging".

**Tilmæli:**
Deildarleiðarin á løgdeildini mælir til at málið verður beint í viðkomandi faknevnd(ir) til ummælis.

Deildarleiðarin á løgdeildini mælir eisini til, at ein møgulig avgerð um at játta umsókníni verður treytað av, at viðurskiftini viðvíkjandi stuðlamúrinum móti Vegnum Langa (sí mál nr. 2003-1537) verða fingin í rættlag.

**Fíggjarnevndin 28. oktober 2009:** Samtykt at beina málið í byggi- og býarskipanarnevndina og teknisku nevnd.

**Viðmerkingar frá teknisku deild:**
Nevnda umsókn, dagfest 10. september 2009, viðlagt kort sum vísir økið.

Um kommunan letur økið frá sær, eigur kommunan at treyta sær við tinglýsing á skeytið, at kommunan óhindrað sleppur fram at høvuðskloakkini frá Inni á Gøtu og økinum omanfyri m.a. Stórutjørn, ið liggur undir hesum øki. Somuleiðis eigur kommunan at tryggja sær, at teir skaðar, sum umsøkjarin hevur elvt til í sambandi við at grivið er ov tætt uppundir Vegin Langa, verða afturgjørdir av umsøkjaranum, áðrenn ein møgulig søla kann koma uppá tal.

Eisini eigur kommunan at treyta sær við tinglýsing á skeytið, at kostnaðurin fyri møguliga umlegging av høvuðskloakkini í sambandi við møguliga bygging á økinum, skal berast av eigaranum av stykkinum.

Tórshavnar kommuna kann heldur ikki lata økið frá sær, fyrr enn tað er avklárað við SEV, um tansformatorstøð skal setast á økið.

Skráin niður frá stykkinum er inni á matrikul, sum Skógrøktin eigur. Hesin er brattur og er lopin tvær ferðir. Nú er loksins plantað har, og tað veksur.

Áðrenn Tórshavnar kommuna letur lendið frá sær, so eigur Skógrøkt landsins sum hevur eina verkætlan í Dalinum Langa, saman við Lions, um planting av økinum, og sum næsti granni eigur at verða hoyrdur.

Bygging á økinum kann ikki fara fram uttan góðkenning frá friðingarmyndugleikunum.

Víst verður eisini til viðmerkingina frá deildarleiðaranum á løgdeildini um at møgulig avgerð eigur at verða treytað av viðurskiftunum um stuðlamúr móti Vegnum Langa.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til ikki at ganga umsóknini á møti at selja matr.1 ng, Hoyvík, orsakað av at høvuðskloakkin frá Inni á Gøtu og økinum omanfyri m.a. Stórutjørn, ið liggur undir hesum øki. Mælt verður eisini til at beina málið í teknisku nevnd.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 8. februar 2010:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

**Tekniska nevnd 11. februar 2010:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 17. februar 2010:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og teknisku nevnd og ikki ganga umsóknini á møti at selja

matr.1 ng, Hoyvík, orsakað av at høvuðskloakkin frá Inni á Gøtu og økinum omanfyri m.a. Stórutjørn, liggur undir hesum øki.

Spurningurin um ein møguligan brúksrætt til økið verður tikin upp aftur, tá ið ógreiðu viðurskiftini á økinum eru endaliga avgreidd.

**Fíggjarnevndin 19. januar 2011:** Samtykt at heita á umsitingina at gera tilmæli um treytir fyri einari møguligari sølu at leggja aftur fyri aftur politiska myndugleikan.

**Fíggjarnevndin 16. februar 2011:** Samtykt at mæla býráðnum til at selja Kaj Andreasen og Co. Økið , ið søkt er um at keypa, við treytum, sum umsitingin hevur sett, og harumframt treytað av góðkenning frá Innlendismálaráðnum.

**Býráðið 24. februar 2011:** Atkvøtt varð um tilmæli frá Boga Andreassen, um at beina málið aftur í byggi- og býarskipanarnevndina, ið varð samtykt við 11 atkvøðum fyri og tveimum ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Bogi Andreasen, Marin Katrina Frýdal, Halla Samuelsen, Jákup Símun Simonsen, Elin Lindenskov, Levi Mørk, Rúni Djurhuus, Vagnur Johannesen, Jan Christiansen og Inga Dahl.

Greiddu ikki atkvøðu: Annfinn Brekkstein og Jógvan Arge.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 14. mars. 2011:** Nevndin samtykti at vísa á at hon er sinnað at viðmæla umsóknini, men at ein møgulig avgerð um at játta umsóknini verður treytað av, at viðurskiftini viðvíkjandi stuðlamúrinum móti Vegnum Langa (sí mál nr. 2003-1537) eru fingin í rættlag sambært undiskrivaðu avtaluni og at beina málið í fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin: 16. mars 2011:** Ein minniluti: Heðin Mortensen og Sjúrður Olsen, mælir býráðnum til at selja umsøkjaranum økið við treytum, sum umsitingin setur, og treytað av góðkenning frá Innlendismálaráðnum. Sølan skal harumframt treytast av, at Kaj Andreasen átekur sær fyri egna rokning at gera stuðlamúr á matr. nr. 1nd móti Vegnum Langa, ið tryggjar vegin.

Ein minniluti: Jógvan Arge og Marin Katrina Frýdal, mælir býráðnum til at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og útvega góðkenning til møguliga sølu frá innlendismálaráðnum. Sølan skal harumframt treytast av, at Kaj Andreasen átekur sær fyri egna rokning at gera stuðlamúr á matr. nr. 1nd móti Vegnum Langa, ið tryggjar vegin.

Ein minniluti, Elin Lindenskov, tekur støðu á einum seinni fundi.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur samskift við SEV um nær arbeiðið teirra við at uppseta nýggjar trafostøðir er liðugt. Hetta er nakað seinkað í mun til upprunaligu tíðarætlanina.

Fyri at kunnað uppseta trafostøðina sum skal standa á matr. nr. 1 nd, Hoyvík er neyðugt, at kommunan og SEV semjast um staðsetingina, og hevur ástaðarfundur verið í hesum sambandi.

Umsitingin hevur eisini havt fund við umboð fyri Kaj Andreasen & Co, har ætlaða staðsetingin av trafostøðini, og treytir um stuðlamúr, atkomurætt til trafostøðina, møgulig marknaumskipan o.l. var umrøtt. Umboðið fyri Kaj Andreasen & Co upplýsti, at teir høvdu havt ráðgeva at kannað eftir, hvussu teir kundu útnyttað verandi ogn og matr. nr. 1 nd, Hoyvík sum frægast eystureftir, so teir fingu mest møguligt at nýtiligum økið til teirra virksemi.

Umsitingin og umboðið fyri Kaj Andreasen & Co samdust um, at kommunan og SEV skuldu avgreiða málið um staðsetingina av trafo-støðini sum skjótast, og at kommunan og Kaj Andreasen og Co skuldu samráðast víðari um sølutreytirnar annars.

**Tilmæli:**
Við grundarlagið í omanfyristandandi ískoyti mæla kommunustjórin, miðfyrisitingarstjórin og tekniski stjórin til:

1. at umsitingin fær heimild til, í samráð við SEV, endaliga at staðseta trafostøðina í norðara enda á matr. nr. 1 nd, Hoyvík, og at avgreiða málið við matrikulmyndugleikan v.m.
2. at umsitingin fær heimild at samráðast við keyparan um treytirnar fyri sølu av parti av matr. nr. 1 nd, Hoyvík, herundir
    a. at keyparin átekur sær at gera stuðlamúr í framhaldi av stuðlamúrinum á matr. nr. 1 æg, Hoyvík, ella at tryggja vegin á annan góðkendan hátt, og at tryggingin av vegnum framvið matr. nr. 1 nd skal verða liðug í seinasta lagið 1. nov. 2011
    b. at keypari og seljari kunnu gera avtalu um marknaumskipan framvið eystara markinum á matr. nr. 1 æg og 1 nd, og í hesum sambandi kunnu samráðast um makaskiftisavtalu soleiðis, at tað sum eigarin av matr. nr. 1 æg letur á eystaru síðu av matriklinum til kommununa, kann hann fáa aftur sum partur av søluavtaluni viðv. matr. nr. 1 nd.
    c. at kommunan tryggjar atkomurætt til transfostøðina hjá SEV og innasta partin av matr. nr. 1 nd, um hesin ikki verður seldur, og at hesin verður tinglýstur á selda øki og á matr. nr. 1 æg
    d. at verandi leiðingar á matr. nr. 1 æg og 1 nd verða ikki broyttar ella umlagdar í samband við søluna
    e. at samráðast um møguliga lokaða girðing framvið norðara og eystara markið á tí partinum av matr. nr. 1 nd hann keypir, sum ikki kann nýtast til skelting e.l. á útsíðuni á girðingini.

**Fíggjarnevndin 24. mars 2011:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og mæla býráðnum til at lata SEV lendi til trafostøðina.

**Býráðið fyri læstum hurðum 24. mars 2011:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Kaj Andreasen og Co./Sp/f KA Ognir hevur 11. november 2011 latið inn nýggja umsókn um byggiloyvi og loyvi til at keypa matr. nr. 1nd, Hoyvík, og part av litra o, Hoyvík.

Umsóknin um byggiloyvi snýr seg m.a. um eina ætlan at byggja út verandi bygning á matr. nr. 1æg, Hoyvík, og gera goymslu aftanfyri bygningin soleiðis, at dekk verður stoypt millum bygningin og markið móti Vegnum Langa, ið skal hýsa nýggju goymsluni. Eisini skal stuðlamúrur gerast millum ætlaða dekkið/goymsluna undir jørð og markið móti Vegnum Langa til tess at tryggja vegjaðaran.

Harumframt er ætlanin at gera garð, laða grót, planta og fríðka økið móti skógfriðaða økinum á matr. nr. 1nh, sambært ætlan, sum arkitektavirkið Albert Isfeldt & Gudmund Hansen hevur gjørt. Henda ætlan fevnir um matriklarnar 1æg og 1nd umframt litra o.

Við til lýsingina av fyriliggjandi mál hoyrir ein avtala, sum Tórshavnar kommuna og Sp/f KA Ognir (KA) undirritaðu 18. januar 2011, har KA bindur seg til at gera stuðlamúr, ið skal tryggja vegjaðaran á Vegnum Langa framvið matr. nr. 1æg, Hoyvík. Hetta arbeiðið skuldi sambært avtaluni verða lIðugt í seínasta lagi 15. juli 2011.

Hetta arbeiðið er tó ongantíð farið í gongd, og hevur KA m.a. grundgivið hetta við, at hann ynskir at fáa avgreitt umsóknina um byggiloyvi til ætlaðu goymsluna undir dekki/jørð og umsóknina um keyp av grannaognini matr. nr. 1nd og litra o áðrenn farið verður undir arbeiðið at gera stuðlamúrin.

Politiskt skulu tekniska nevnd og byggi- og býarskipanarnevndin taka støðu til eina prinsipiella/treytaða góðkenning av tekniska projektinum viðvíkjandi stuðlamúrinum framvið Vegnum Langa og umsóknini um byggiloyvi til dekk/nýggja goymslu og fríðkan av uttanumøkinum sambært fyriliggjandi ætlan.

Fíggjarnevndin skal taka endaliga støðu til umsóknina um keyp av matr. nr. 1nd og part av litra o at leggja saman við matr. nr. æh.

**Tilmæli:**
Mælt verður til at beina málið í býráðið um byggi- og býarskipanarnevndina, teknisku nevnd og fíggjarnevndina, at taka støðu til, um hildið verður fast við áður gjørdar samtyktir og treytir, ella um nevndirnar eru sinnaðar

1. at geva eina prinsipiella/treytaða góðkenning av tekniska projektinum viðvíkjandi stuðlamúrinum framvið Vegnum Langa,
2. at geva eina prinsipiella/treytaða tilsøgn um byggiloyvi til dekk/nýggja goymslu og fríðkan av uttanumøkinum sambært innsendari ætlan
3. og at játta umsóknina um keyp av matr. nr. 1nd.

og hvørjar treytir kommunan setir viðv. omanfyri standandi pkt. 1-3.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 8. oktober 2012:** Nevndin vísir á gjørdar avtalur í málinum. Til tess at fáa eina loysn á málinum er nevndin tó samd um:

1. at geva eina prinsipiella/treytaða tilsøgn um byggiloyvi til dekk/nýggja goymslu og fríðkan av uttanumøkinum sambært innsendari ætlan
2. at viðmæla umsóknina um keyp av matr. nr. 1nd

við hesum treytum:

a) at umsøkjarin stillar bankatrygd fyri kostnaðin at gera stuðlamúrin og fyri keypspeningin fyri matr. nr. 1nd, Hoyvík, umframt fyri aðrar skyldur sum umsøkjarin hevur bundið seg til sambært avtalum í málinum.
b) at umsøkjarin seinast 6 mánaðir eftir at hann hevur fingið byggiloyvi til dekk/nýggja goymslu og fríðkan av uttanumøkinum, hevur bygt stuðlamúrin lidnan.
c) at treytirnar í pkt. 2b til 2e í tilmælinum til fundin í fíggjarnevndini 24. mars 2011 verða galdandi.
d) at kommunan letur arbeiðið gera fyri stillaðu bankatrygdina, um umsøkjarin ikki heldur frammanfyri standandi treytir.

og at beina málið í býráðið um teknisku nevnd og fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 11. oktober 2012:** Nevndin tekur undir við byggi- og býarskipanarnevndini og beinir málið í fíggjarnevndina.

Maria Hammer Olsen var ikki við til hetta málið.

**Fíggjarnevndin 24. oktober 2012:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og teknisku nevnd.

Bogi Andreasen luttók ikki í viðgerðini av hesum máli.

**Býráðið 1. november 2012:** Einmælt samtykt.

**274/12** **2012-2320**

**Umbøn um eykajáttan**

**Lýsing av málinum - samandráttur:**
Undirskot var á fíggjarætlanini við endan av 2011, og tað hevur verið trupult at fáa burtur í 2012. Roknað verður við, at undirskotið við árslok 2012 er undir kr. 400.000,00.

Søkt verður um at fáa møguligt undirskot í 2012 dekkað, soleiðis at vit byrja 2013 uttan negativa framflyting.

**Brunanevndin 11. oktober 2012:** Samtykt at heita á býráðið, um fíggjarnevndina, at veita sløkkiliðnum eykajáttan áljóðandi kr. 400.000,00.

**Tilmæli**
Kommunustjórin mælir býráðnum, um fíggjarnevndina, til at ganga umbønini um eykajáttan á møti og fíggja 400.000 kr. av konto 1110 Býráð.

**Fíggjarnevndin 24. oktober 2012:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við brunanevndini.

Bogi Andreasen luttók ikki í viðgerðini av hesum máli.

**Býráðið 1. november 2012:** Einmælt samtykt.

**275/12** **2010-1319**

**Fimleikahøll til skúlan í Kaldbak**

**Kaldbaksnevndin 19. mai 2010: Nevndin ynskir at fáa eina fimleikahøll til** skúlan, sum eisini kann brúkast til ítrótt, ítriv og sum borgarahús.

**Kaldbaksnevndin 24. november 2010:** Borgarstjórin beinir málið í mentamálanevndina.

**Kaldbaksnevndin 22. februar 2012:** Ynski er framhaldandi um at fáa eina politiska viðgerð av málinum, við tí fyri eyga at fáa málið raðfest á eini langtíðaríløguætlan.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin vísa á, at eingin peningur er avsettur á íløguætlanini.

**Mentamálanevndin 14. mars 2012:** Samtykt at heita á umsitingina um at kanna møguligan tørv á fimleikahøll/felags hølum í bygdum kommununnar.

**Kaldbaksnevndin 29. mai 2012:** Borgarstjórin beinir málið í mentamálanevndina til víðari viðgerð.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur fingið áheitan um at kanna møguligan tørv á fimleikahøll/felagshúsum í bygdum kommununnar. Bygdirnar Kaldbak, Nólsoy og Velbastað eru ymiskt fyri í mun til innandura ítróttaumstøður og almenn felags- ella bygdahús, sum ikki eru átrúnaðarlig samkomuhús. Harumframt eru kommunalir skúlar og dagstovnar.

Í nógvum bygdum verða felagshús nýtt til størri samkomur so sum brúdleyp, ervi, føðingardagar, bygdastevnur o.a.. Hesi felagshús eru oftast skipað av einum felag, tað veri seg bygdafelag, ítróttafelag, dansifelag osfr., sum eigur og rekur húsið, aloftast við sjálvbodnari megi. Í Havn eru nøkur kommunal býlingshús, sum í ávísan mun hava somu funktiónir.

Á Velbastað er felagshús, men eingin fimleikahøll. Í Nólsoy er felagshús og ein lítil fimleikahøll í skúlanum. Harumframt stendur ein grund til svimjihyl. Í Kaldbak er eingin fimleikahøll og einki felagshús.

Umsitingin skilur áheitanina soleiðís, at ynskt verður tilfar til víðari støðutakan um ætlan at byggja ella betra um felagsumstøður til innandura ítrótt og fjøltáttað felags tiltøk og virksemi í nevndu bygdum.

Til tess skal gerast ein tørvsgreining. Harumframt er neyðugt við uppskotum til, hvussu hetta best kann loysast í ymsu bygdunum í mun til funktiónir, og hvussu hetta í skitsum kundi tikið seg út, har talan er um at byggja nýtt. Gerast skal meting um íløgutørv og eftirfylgjandi rakstrarkostnað. Eisini er neyðugt at fáa lýsing av, hvussu verandi felagshús og karmar annars eru skipaði í dag – privat og kommunalt, og uppskot til, hvussu hetta eigur at verða skipað í framtíðini eisini við atliti at, hvussu hetta er skipað aðrastaðni í kommununi.

Sum tað áður er gjørt vart við, so er eingin játtan sett av á íløguætlanini til hetta endamál. Mett verður neyðugt at fáa uttanhýsis ráðgeving at standa fyri omanfyri lýstu tørvsgreining. Mett verður, at hóskandi upphædd er kr. 300.000. Skal tørvsgreiningin fremjast eftir hesum leisti, er neyðugt at flyta játtan frá øðrum verkætlanum. Uppskot er at flyta játtan frá ætlanini at byggja svimjifelagnum felagshøli L57009, tí mett verður, at hetta kann takast við í ætlanina at byggja nýggja svimjihøll L57015.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at játta kr. 300.000 til felagshús í bygdum kommununnar av íløgukontu 5775 ítróttaanlegg, L57009 svimjifelagið hølir.

**Mentamálanevndin 5. september 2012:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 12. september 2012:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við tilmælinum.

**Kaldbaksnevndin 12. september 2012:** Borgarstjórin kunnaði um, at málið er viðgjørt í mentamálanevndini og fíggjarnevndini, har tað verður mælt býráðnum til at játta kr. 300.000 til at gera tørvsgreining viðvíkjandi felagshúsum í bygdum kommununnar.

Staðbundnu limirnir hildu ikki, at tørvur var á tørvsgreining, men at peningurin heldur skuldi verið brúktur til at gera høllina í Kaldbak.

**Býráðið 13. september 2012:** Einmælt samtykt.

**Býráðið 1. november 2012:** Jan Christiansen ynskti at fáa soljóðandi broytingaruppskot ført í protokol: Jan Christiansen mælir til at samtykkja at taka undir við býráðnum 13. September 2012, men at játtanin verður brúkt til gerð av fimleikarhøll í Kaldbak.

Síðan varð atkvøtt um tilmæli frá Heðin Mortensen, um beina málið aftur í mentamálanevndina, ið varð samtykt við 9 atkvøðum fyri og 4 ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Marin Katrina Frýdal, Jógvan Arge, Halla Samuelsen, Jákup Símun Simonsen, Elin Lindenskov, Levi Mørk, Maria Hammer Olsen og Anfinn Brekkstein.

Ímóti atkvøddu: Bogi Andreasen, Inga Dahl, Jan Christiansen og Sjúrður Olsen

**276/12** <u>2012-</u>

**<u>Umsókn frá miðfyrisitingarstjóranum um at verða loystur úr starvi</u>**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Í skrivi, dagfest 24. oktober 2012, biðir miðfyrisitingarstjórin um at verða loystur úr starvinum.

**Býráðið 1. november 2012:** Einmælt samtykt.

**277/12** <u>**2011-2497**</u>

<u>**Ásetan av fundardøgum býráðsins fyri 2012**</u>

Uppskot frá umsitingini til fundardagar:

| | | |
|---|---|---|
| 26. januar | 13. september | |
| 23. februar | 27. september | fíggjarætlan |
| 29. mars | 01. november | |
| 02. mai | 29. november | |
| 31. mai | 20. desember | |
| 28. juni | | |

**Býráðið 14. desember 2011:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**Ískoyti:**
Staðfesting av at flyta býráðsfundin 20. desember til 13. desember.

**Býráðið 1. november 2012:** Einmælt samtykt.

**FUNDUR LOKIN KL. 20:40**

**GERÐABÓKIN GÓÐKEND:**

| TÓRSHAVNAR BÝRÁÐ<br>1. november 2012 | Blað nr.: **10134**<br>Formansins merki: |
|---|---|

| | | |
|---|---|---|
| Jógvan Arge | Sjúrður Olsen | Bogi Andreasen |
| Marin Katrina Frýdal | Halla Samuelsen | Elin Lindenskov |
| Annfinn Brekkstein | Inga Dahl | Levi Mørk |
| Maria Hammer Olsen | Jákup Símun Simonsen | Jan Christiansen |
| | Heðin Mortensen | |